| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>27. februar 2020 | Blað nr.: 89<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 27. februar 2020 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr: 25/20 – 48/20**

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Jacobina Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Helena á Dam Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Bjørg Dam
Jógvan Arge luttók í máli 44/20

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðfríð Jacobsen
Marius Müller
Jóan Petur Hentze
Eyðna Justinussen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 25/20 | 20/00205-1 | Mál beind í nevndir 2020 | 92 |
| 26/20 | 18/00609-2 | Viðv. matr.nr. 138h, Hoyvík. Verandi eigari av ognini á Karlamagnussarbreyt, ynskir ikki at byggja á grundstykkinum, og hevur gjørt avtalu um víðarisølu av grundstykkinum til annan keypara. | 94 |
| 27/20 | 18/01821-3 | Grundstykki í útstykking í Nólsoy. Keypari ynskir at lata grundstykkið innaftur til kommununa. | 97 |
| 28/20 | 20/00299-2 | Uppskot til útstykking við gamla Velbastaðvegin matr. nr. 1090, Tórshavn | 99 |
| 29/20 | 19/02448-2 | Umsókn um at leiga part av øki matr. nr. 1112, Tórshavn | 101 |
| 30/20 | 19/01209-6 | Umsókn frá MC-felagnum um at leiga part av øki matr.nr. 1112, Tórshavn. | 105 |
| 31/20 | 18/02446-5 | Ljósviðurskifti við Tórsbreyt | 109 |
| 32/20 | 19/00756-1 | Anti-doping átak hjá ÍSF | 112 |
| 33/20 | 20/00339-1 | Víðka skipanina við ókeypis hallarleigu | 116 |
| 34/20 | 14/03408-18 | Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064) | 118 |
| 35/20 | 15/03761-9 | Veiðifelagið Byrsumúli : Áheitan um at fáa samstarv í lag við kommununa fyri at betra um viðurskiftini hjá skjótingini í høvuðsstaðnum. | 135 |
| 36/20 | 17/01362-1 | Virknishøll í Finsen | 146 |
| 37/20 | 18/03679-1 | Reglugerð fyri Tórshavnar musikkskúla – møgulig dagføring | 156 |
| 38/20 | 19/01973-3 | Gøtunavn til nýggja útstykking við Villingardalsvegin, matr. nr. 1345a, 1346a og 1347a, Tórshavn | 161 |
| 39/20 | 20/00480-1 | Heimild at taka gjald fyri at víga útlendingar | 163 |
| 40/20 | 19/01090-1 | Reingerð til fólkapensjonistar í Tórshavnar kommunu | 165 |
| 41/20 | 16/01038-5 | Liðuggerð av Karlamagnusarbreyt og vinnuøki | 171 |
| 42/20 | 20/00163-1 | Broyting av Serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina, Tórshavnar kommuna | 174 |
| 43/20 | 18/03494-5 | Umsókn um grundøki til vardar bústaðir – Sambýli í Reynstúni | 177 |
| 44/20 | 20/00130-1 | Útstykking á Hamrinum á matr. nr. 4a, Argir | 185 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 45/20 | 20/00097-1 | Ústykking á Velbastað | 187 |
| 46/20 | 18/03758-1 | Almenn wc í Tórshavnar kommunu | 189 |
| 47/20 | 18/03069-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt á Argjaboða, matr. nr. 43g, Argir | 192 |
| 48/20 | 20/00203-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2020 | 197 |

## *25/20 Mál beind í nevndir 2020*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 3/20 | 20/00205-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 25/20 | 20/00205-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

# 26/20 Viðv. matr.nr. 138h, Hoyvík. Verandi eigari av ognini á Karlamagnussarbreyt, ynskir ikki at byggja á grundstykkinum, og hevur gjørt avtalu um víðarisølu av grundstykkinum til annan keypara.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.02.2018 | 33/18 | 18/00609-2 |
| 2 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 33/18 | 18/00609-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 12.02.2020 | 34/20 | 18/00609-2 |
| 4 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 26/20 | 18/00609-2 |

**Upprunin til málið:** Umsókn komin frá verandi eigara, um at kunna víðariselja óbygt grundstykkið á Karlamagnussarbreyt.

**Lýsing av málinum – samandráttur.** Verandi eigari hevur slept ætlanunum um at byggja á grundstykkið við Karlamagnusarbreyt, og hevur gjørt søluavtalu við nýggjan keypara.

Sambært grein 3 í upprunaskeytinum, sum er tinglýst 19.10.2015, bindur eigarin seg til at byrja sína bygging innan 2 ár frá tí, at skeytið er tinglýst, og kann eigarin ikki selja stykkið víðari uttan góðkenning frá kommununi, fyrr enn bygningur sum kommunan kann góðkenna, er bygdur á byggifeltið frá Karlamagnussarbreyt og í minsta lagi 6 metrar inn. Grundstykkið liggur framvegis óbygt.

Avtalaður søluprísur sambært víðarisøluskeytinum er kr. 646.117,- sum er samsvarandi upprunaprísinum. Servituttirnir verða teir somu sum í upprunaskeytinum, herundir eisini servituttir um byggifreist. Vísandi til at talan er um nýtt skeytið, fær nýggi keyparin tí nýggja 2 ára byggifreist.

Í praksis eru víðarisøluni málini á Karlamagnussarbreyt avgreidd uttan at tey eru fyriløgd fíggjarnevnd so hvørt. Kommunan hevur havt grundstykkini á sølulista. Bæði tey grundstykkini sum kommunan hevur átt sjálv, og tey stykkini sum eru seld, har keypari hevur ynskt at lata sítt grundstykkið innaftur. Kommunan hevur hildið fast uppá keyparan, higartil at nýggjur keypari er til stykkini, men hevur eigarin tá eisini havt møguleika til at havt sítt stykkið til sølu, til upprunaprís. Kommunan hevur ikki ynskt at tikið stykkini innaftur, men vil heldur ikki forða fyri at annar keypari, sum hevur ætlanir um at byggja kann koma í staðin.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Umsókn frá advokati.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin av stjórnarskrivstovuni, mæla til at góðkenna víðarisølu av matrikul. nr. 138h, Hoyvík, sí uppskot til skeytið, skjal 18/00609-1

**Fíggjarnevndin 21. februar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**

Verandi eigari Sp/F Frami selur grundstykkið til Sp/F Frami Bygging, sum ætlandi fullførir verkætlanina um bygging av bygningi. ( Byggimálsviðger mál 18/02789 )

Avtalaður søluprísur sambært víðarisøluskeytinum er kr. 646.117,00 sum er samsvarandi upprunaprísinum.

Servituttirnir verða teir somu sum í upprunaskeytinum, herundir eisini servituttir um byggifreist.

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at góðkenna víðarisøluskeytið

**Fíggjarnevndin 12. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

## 27/20 Grundstykki í útstykking í Nólsoy. Keypari ynskir at lata grundstykkið innaftur til kommununa.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 12.02.2020 | 35/20 | 18/01821-3 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 27/20 | 18/01821-3 |

**Upprunin til málið:**Umsókn frá keypara.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Viðvíkjandi grundstykki nr. 3. Útstykking Nólsoy.**

Keyparar hava við fyrbilsskeytið bundið seg til at keypa grundstykkið nr. 3, í útstykkingini í Nólsoy, og hava goldið kr. 165.000,00 til kommununa.

Tey hava nú keypt eini sethús í Nólsoy, og ynskja at lata grundstykkið innaftur til kommununa.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin. Ongi.**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>27. februar 2020 | Blað nr.: 98 |
| | Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at keypa stykkið aftur og afturflyta keypara kr. 165.000,00

**Fíggjarnevndin 12. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

# 28/20 Uppskot til útstykking við gamla Velbastaðvegin matr. nr. 1090, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 04.02.2020 | 10/20 | 20/00299-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2020 | 38/20 | 20/00299-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 12.02.2020 | 48/20 | 20/00299-2 |
| 4 Vinnunevndin | 26.02.2020 | 18/20 | 20/00299-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | | | 20/00299-2 |
| 6 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 28/20 | 20/00299-2 |

**Upprunin til málið:**
Fleiri feløg hava umsókn inni um staðseting av teirra virksemi. Harímillum eru 2 MC feløg, sum hava víst á ymiskar staðsetingar í býnum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsitingin hevur gjørt uppskot um útstykking millum gamla og nýggja Velbastaðvegin. Uppskotið hevur 2 grundstykki/vinnustykki á uml. 1900 fermetrar hvørt og atkomu frá gamla Velbastaðvegnum.
Byggilinja til nýggja Velbastaðvegin er 20 m frá vegmiðju.
Uppskotið er at 2 MC feløg húsast á einum matrikli, og ein matrikul kann seljast.
Økið, har gamli Velbastaðvegur kemur inn á nýggja Velbastaðvegin, verður skotið upp at gera parkering og rastipláss, við almennum toiletti á økinum. Ferðafólk gera vart við, at tørvur er á almennum toilettum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
19/02448 Axia Advokatar: Umsókn vegna Harley Davidson Club - HDC : Umsókn um at leiga part av øki matr. nr. 1112, Tórshavn

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Uppskotið hevur verið til viðgerðar á Teknisku deild, sum hevði ongar viðmerkingar

**Skjøl**
20/00299-4 útstykking millum gamla og nýggja Velbastaðveg

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:

- at tikið verður undir við útstykkingarætlanini
- at mørkini í byggisamtyktini verða rættað til í mun til matrikulmørkini
- at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið til víðari viðgerð.

**Tekniska nevnd 04. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. februar 2020:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Vinnunevndin 26. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

# 29/20 Umsókn um at leiga part av øki matr. nr. 1112, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 184/19 | 19/02448-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.07.2019 | 132/19 | 19/02448-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 259/19 | 19/02448-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 24/20 | 19/02448-2 |
| 5 Tekniska nevnd | 04.02.2020 | 11/20 | 19/02448-2 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2020 | 39/20 | 19/02448-2 |
| 7 Vinnunevndin | 26.02.2020 | 17/20 | 19/02448-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 12.02.2020 | 57/20 | 19/02448-2 |
| 9 Fíggjarnevndin | 27.02.2020 | 59/20 | 19/02448-2 |
| 10 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 29/20 | 19/02448-2 |

**Upprunin til málið:** Umsókn frá felagnum dagfest 03.06.2019

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Harley Davidson Club Tórshavn (HDC) hevur sent kommununi eina umsókn um at kunna leiga eitt øki niðan fyri gamla vatnbrunnin undir Gráasteini, har felagið hevur ætlanir um at byggja sær felagshøli. Talan verður um ein bygning á uml. 100 – 150 $m^2$.

Felagið metir, at staðsetingin við gamla vatnbrunnin er væl hóskandi og vísir til at líknandi virksemi longu er í vatnbrunninum, har Føroya Ellisakfar heldur til.

Felagið stendur fyri øllum arbeiði og rindar eisini kostnaðin.

Felagið søkir um eina 4,5 ára brúksavtalu.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.** Mál nr. 19/01209. MC – Felagið, hevur eisini sent kommununi eina umsókn, um at kunna leiga/brúka eitt økið inni á sama matrikli, men beint sunnanfyri.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin.**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Umsókn frá felagnum við frágreiðing og korti.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mælir til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Økið, sum HDC søkir um at leiga, liggur í A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sí skjal *Byggisamtykt við Vatnbrunnin*. Ásetingin viðvíkjandi virkseminum í økinum er soljóðandi:

Kap. IV, §5, stk. 1. *Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.*
*Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi, so sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkum í Tórshavnar kommunu."*

Býarskipanardeildin metir ikki, at virksemið hjá HDC er samanberligt við ásetingarnar fyri A1 øki og metir somuleiðis ikki, at tað hóskar seg mitt í einum sethúsaøki. Motorsúkklurnar skulu koyra ígjøgnum sethúsaøki, og hóast økið uttanum ikki er so tætt bygt í løtuni, so er kommunan í holt við at skipa økið omanfyri býlingin undir Fjalli, og er tað nokk somuleiðis bert ein spurningur um tíð, áðrenn matr. nr. 1114a verður útstykkjað til bústaðir.

Vísast skal somuleiðis til eitt mál í Skemmingsgøtu á Norðasta Horni, har ein MC handil varð noyddur at flyta, grundað á grannaklagur, sí mál nr. 2006-1618. Tá var niðurstøðan hjá Føroya Rætti, at virksemið hjá einum MC handli ikki kundi koma undir ásetingina fyri A1 økir. Virksemið hjá HDC er í verandi støðu ikki líka umfatandi, sum tað, sum MC handilin hevði, men mett verður tó, at málini kunnu samanberast.

Umframt umsóknina frá HDC um leigu av lendi, er eisini ein umsókn frá MC-felagnum um leigu av lendi, og er tørvurin og virksemið hjá báðum feløgunum líkur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla frá at staðseta tílíkt virksemi í bústaðarøki av tí at mett verður ikki, at tað er í samsvari við almennu byggisamtyktina fyri økið og beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. juli 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Bæði feløgini vísa til møguleikan at staðseta bygningin á einum øki sum liggur beint vestan fyri Sløkkiliðstøðina. Kommunan eigur økið sum er til víddar uml. 1.400m2.

Á hesum økinum stendur frammanundan ein bygningur sum Landsverk eigur. Víddin á bygninginum er uml. 150 m2. Økið liggur út til Oyggjarvegin sum er landsvegur, og er 25 metra byggilinja galdandi.

Kommunan hevur havt fund við Landsverk (skjal. j.nr. 19/02448-12) har spurningurin um møguliga staðseting av klubbhúsi til Mc-feløgini, inni á økinum, varð viðgjørdur.

Landsverk brúkar bygningin. Í bygninginum stendur ein bátur á vogni, og er onnur útgerð inni í bygninginum. Talan er í høvuðsheitum um útgerð sum verður brúkt til dýbdarmátingar og aldumátingar ymsa staðni í Føroyum.

Pláss skal vera at koma til og frá við bátinum, og skal eisini vera pláss uttanfyri til bilar. Um vetrarnar stendur javnan ein gummihjólslessari á økinum, sum grevur kava.

Landsverk metir at staðseting av einum bygningi afturat á hesum økinum, letur seg illa gera, tí atkoman til teirra bygning tá verður skerd, og verður loyvi vanliga ikki givið til frávik ímun til 25 metra byggilinjuna frá Landsvegi.

Kommunan hevur ikki møguleika til at endurhýsa virkseminum hjá Landsverk, og hevur heitt á Landsverk um at kanna møguleikarnar fyri, at loyvi verður givið til nýggjan bygning innanfyri 25 metra byggilinjuna.

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at vísa á nevnda økið sum ein møguleika at staðseta eitt Klubbhús til bæði Mc-feløgini.
Staðsetingin skal góðkennast av Landsverk sum er vegamyndugleiki.
Um loyvi verður givið, verður møguligur sáttmáli um leigu av undirlendi at leggja aftur fyri fíggjarnevnd.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Tróndur Sigurðsson biður um at fáa málið á skrá í fíggjarnevndini í januar.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Ein samd nevnd heitir á byggi- og býarskipanarnevndina um at avgreiða málið.

Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen mæla til at staðseta klubbhús til bæði MC feløgini við vatnbrunnin undir Gráasteini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til nýggja útstykking við gamla Velbastaðvegin matr. nr. 1090, har víst verður á, at hesi feløgini kunnu verða, sí j.nr. 20/00299.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til, at motorsúkklu feløgini verða staðsett á einum av stykkjunum á matr. nr. 1090 og at beina málið í fíggjarnevndina umvegis vinnunevndina.

**Tekniska nevnd 04. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Jákup Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, mælir til at staðseta klubbhús til bæði MC feløgini við vatnbrunnin undir Gráasteini.

**Fíggjarnevndin 12. februar 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í vinnunevndina fyri síðani at koma aftur í fíggjarnevndina við atliti til at gera leigusáttmála.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, mælir til at staðseta klubbhús til bæði MC-feløgini við vatnbrunnin undir Gráasteini.

**Vinnunevndin 26. februar 2020:**

**Ein meiriluti:** Bogi Andreasen, Jákup Dam, Annfinn Brekkstein, Gunvør Balle tekur undir við tilmælinum.

**Ein minniluti:** Helena Dam á Neystabø atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til 10 ára leigusáttmála, ið skal samtykkjast av býráðnum umvegis fíggjarnevndina.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at góðkenna fyriliggjandi uppskot til leigusáttmála við Harley Davidson Club Tórshavn.

**Fíggjarnevndin 27. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

# 30/20 Umsókn frá MC-felagnum um at leiga part av øki matr.nr. 1112, Tórshavn.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 185/19 | 19/01209-6 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.07.2019 | 131/19 | 19/01209-6 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 258/19 | 19/01209-6 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 24.02.2020 | 42/20 | 19/01209-6 |
| 5 Vinnunevndin | 26.02.2020 | 16/20 | 19/01209-6 |
| 6 Fíggjarnevndin | 27.02.2020 | 58/20 | 19/01209-6 |
| 7 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 30/20 | 19/01209-6 |

**Upprunin til málið:** Umsókn frá MC-felagnum dagfest 01.04.2019. um at kunna leiga eitt øki til felagshús.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Mc-felagið hevur sent kommununi eina umsókn um at kunna leiga eitt øki niðanfyri gamla vatnbrunnin undir Gráasteini, har felagið hevur ætlanir um at byggja sær felagshøli. Ætlanin er at byggja ein bygning á uml. 80m2. Felagið søkir um at leiga eitt øki á uml. 900m2, til parkering v.m.

Felagið stendur fyri øllum arbeiðinum, og rindar eisini kostnaðin.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini.**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.** Mál 19/02448. Harley Davidson Club Tórshavn, hevur 03.juni 2019, sent kommununi umsókn um at leiga øki til staðseting av felagshúsum. Talan er um økið við vatnbrunnin, men staðsetingin er beint norðanfyri har MC-felagið ætlar at byggja.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Á fundi við umboð fyri MC-felagið varð greitt frá, at limir felagsins møtast eini tvey kvøld um vikuna – uml. 20 limir hvørja ferð. Summarhálvuna koma teir við motorsúkklum og vetrarhálvuna koyra teir við bilum. Onkran góðan summardag er ætlanin eisini at skipa fyri hugnaløtum fyri limum við grill o.s.fr.

Økið, sum MC-felagið søkir um at leiga, liggur í A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sí skjal *Byggisamtykt við Vatnbrunnin*. Ásetingin viðvíkjandi virkseminum í økinum er soljóðandi:

Kap. IV, §5, stk. 1. *Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.*
*Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi, so sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkum í Tórshavnar kommunu."*

Býarskipanardeildin metir ikki, at virksemið hjá MC-felagnum er samanberligt við ásetingarnar fyri A1 øki, og metir somuleiðis ikki, at tað hóskar seg mitt í einum sethúsaøki. Motorsúkklurnar skulu koyra ígjøgnum sethúsaøki, og hóast økið uttanum ikki er so tætt bygt í løtuni, so er kommunan í holt við at skipa økið omanfyri býlingin undir Fjalli, og er tað nokk somuleiðis bert ein spurningur um tíð, áðrenn matr. nr. 1114a verður útstykkjað til bústaðir.

Vísast skal somuleiðis til eitt mál í Skemmingsgøtu á Norðasta Horni, har ein MC handil varð noyddur at flyta, grundað á grannaklagur, sí mál nr. 2006-1618. Tá var niðurstøðan hjá Føroya Rætti, at virksemið hjá einum MC handli ikki kundi koma undir ásetingina fyri A1 økir. Virksemið hjá MC-felagnum er í verandi støðu ikki líka umfatandi, sum tað, sum MC handilin hevði, men mett verður tó, at málini kunnu samanberast.

Umframt umsóknina frá MC-felagnum um leigu av lendi, er eisini ein umsókn frá Harley Davidson club Tórshavn um leigu av lendi, og er tørvurin og virksemið hjá báðum feløgunum líkur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla frá at staðseta tílíkt virksemi í bústaðarøki av tí at mett verður ikki, at tað er í samsvari við almennu byggisamtyktina fyri økið og beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. juli 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti.**
Bæði feløgini vísa til møguleikan at staðseta bygningin á einum øki sum liggur beint vestan fyri Sløkkiliðstøðina. Kommunan eigur økið sum er til víddar uml. 1.400m2.

Á hesum økinum stendur frammanundan ein bygningur sum Landsverk eigur. Víddin á bygninginum er uml. 150 m2. Økið liggur út til Oyggjarvegin sum er landsvegur, og er 25 metra byggilinja galdandi.

Kommunan hevur havt fund við Landsverk ( J.nr. 19/01209-17 ) har spurningurin um møguliga staðseting av klubbhúsi til Mc-feløgini, inni á økinum, varð viðgjørdur.

Landsverk brúkar bygningin. Í bygninginum stendur ein bátur á vogni, og er onnur útgerð inni í bygninginum. Talan er í høvuðsheitum um útgerð sum verður brúkt til dýbdarmátingar og aldumátingar ymsa staðni í Føroyum.

Pláss skal vera at koma til og frá við bátinum, og skal eisini vera pláss uttanfyri til bilar. Um vetrarnar stendur javnan ein gummihjólslessari á økinum, sum grevur kava.

Landsverk metir at staðseting av einum bygningi afturat á hesum økinum, letur seg illa gera, tí atkoman til teirra bygning tá verður skerd, og verður loyvi vanliga ikki givið til frávik ímun til 25 metra byggilinjuna frá Landsvegi.

Kommunan hevur ikki møguleika til at endurhýsa virkseminum hjá Landsverk, og hevur heitt á Landsverk um at kanna møguleikarnar fyri, at loyvi verður givið til nýggjan bygning innanfyri 25 metra byggilinjuna.

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at vísa á nevnda økið sum ein møguleika at staðseta eitt Klubbhús til bæði Mc-feløgini.
Staðsetingin skal góðkennast av Landsverk sum er vegamynduleiki. Um loyvi verður givið, verður møguligur sáttmáli um leigu av undirlendi at leggja aftur fyri fíggjarnevnd.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til nýggja útstykking við gamla Velbastaðvegin matr. nr. 1090, har víst verður á, at MC feløgini kunnu verða, sí j.nr. 20/00299-4.

**Skjøl**
20/00299-4 útstykking millum gamla og nýggja Velbastaðveg.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til, at motorsúkklu feløgini verða staðsett á einum av stykkjunum á matr. nr. 1090 og at beina málið í fíggjarnevndina umvegis vinnunevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Vinnunevndin 26. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til 10 ára leigusáttmála, ið skal samtykkjast av býráðnum umvegis fíggjarnevndina.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at góðkenna fyriliggjandi uppskot til leigusáttmála við MC Felagið.

**Fíggjarnevndin 27. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

# 31/20 Ljósviðurskifti við Tórsbreyt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 07.06.2019 | 185/19 | 18/02446-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 163/19 | 18/02446-5 |
| 3 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 38/20 | 18/02446-5 |
| 4 Fíggjarnevndin | 12.02.2020 | 39/20 | 18/02446-5 |
| 5 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 31/20 | 18/02446-5 |

**Upprunin til málið:**
Áheitanir frá feløgum og sersambondum innan økið, umframt borgarstjórin.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Feløg og sersamband innan frælsan ítrótta ynskja betri ljósviðurskifti við Tórsbreyt bæði fyri at økja um trygdina og fyri at geva betri venjingarumstøður vetrarhálvárið og um kvøldið.

Tórsbreyt var liðug í 201?. Breytin er nógv brúkt at kalla allan sólarringin av bæði feløgum og einstaklingum. Virksemi er bæði innan renning, men eisini aðrar greinar av frælsum ítrótti so sum spjótkast, kúluvarp og kúlukast. Hesar greinar krevja ávís trygdaratlit. Serliga um veturin og annars um kvøldið stóran part av árinum hevði verið ynskiligt at ljósviðurskiftini vóru betri á stadion. Í fjør var játtan á 400 tkr. fingin til vega á kontu Smærri ítróttaanlegg til eina verkætlan við avmarkaðum inntrivum. Sí hjálagt uppskot til verkætlan. Feløgini tóku sum heild ikki undir við tí og var tí steðgað á, men ynskja heldur eina verkætlan við høgari mastur t.d. 25-30 m og við sterkari ljósum og uppá sikt eina afturat í hinum horninum og soleiðis fáa góð ljósviðurskifti kring stadion. Avbjóðingin er at ein slík verkætlan vildi kosta minst 1.000 tkr. pr. mastur.

Sí hjálagt skriv frá FÍF viðv. viðurskiftunum.

Í verandi støðu er peningin ikki avsettur á løguætlanini ella rakstrarkonstu fyri 2019 og í verandi støðu er sera trongt viðv. væntaðu løgukarminum fyri 2020. Tískil er mest sannlíkt at slík verkætlan má raðfestast á fíggjarætlanini fyri 2020 ella 2021. Mett verður tí hóskandi at umraðfesta peningin til annan átroðkandi tørv í 2019.

Verkætlanin Virknishøll í Finsen – mál 17/01362, ið eisini er á skrá á hesum fundinum, tørvar fígging og verður tí mett hóskandi at flyta hesa tøku upphæddina til ta verkætlanina.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ikki viðkomandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongir.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Virknishøll í Finsen.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongi.

**Umhvørvisárin**

Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar.

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til flyta 400 tkr. av løgukontu L57029 Smærri ítróttaanlegg til løgukontu L57030 Hallirnar í Finsen. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 07. juni 2019:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, mæla til at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, mælir til at avsetta upphæddin verður verandi sum partur av eini verkætlan at fáa nøktandi ljósviðurskifti.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunnvør Balle og Bergun Kass tekur undir vð meirilutanum í Mentamálanevndini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur undir við minnilutanum í Mentamálanevndini.

**Ískoyti**
Eftir viðgerðina seinast er fíggjarætlanin fyri 2020 samtykt. Á løgukontu 5775 eru fyri fíggjarárið 2020 játtaðar 1.000 tkr. til nýggj ljós við Tórsbreyt. Mett verður ein loysn við einari mastur, íroknað fundament, mastur, LED-projektørar, elarbeiðið, projektering v.m. fæst fyri umleið 1.000 tkr. Roknast má við at tað skulu minst tvær mastrar til fyri at fáa nøktandi ljós við Tórsbreyt og kann tað so vera gjørt í tveimum stigum. Slík verkløg krevja byggimálsviðgerð og verður málið tikið upp við byggivaldið.

Ætlanin er at fáa ein ráðgeva at gera hóskandi projekt at bjóða út til minst 2 arbeiðstakarar. Ætlanin er at verkætlanin kann vera útint innan á heystið 2020. Útbjóðingin verður ætlandi seint í vár og málið klárt til støðutakan í nevnd í nevnd og býráð fyri summarið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at heimila umsitingini til at gera avtalu við ráðgeva og at bjóða arbeiðið út.
b). at flyta 1.000 tkr av løgukarminum konta 5775 á nýggja projektkontu.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 05. februar 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Heðin Mortensen, mælir til at fáa eina nøktandi heildarloysn fyri ljósviðurskiftini á Tórsbreyt.

**Fíggjarnevndin 12. februar 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Halla Samulsen og Annfinn Brekkstein.

Bergun Kass greiddi ikki atkvøðu.

# 32/20 Anti-doping átak hjá ÍSF

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 151/19 | 19/00756-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.01.2020 | 12/20 | 19/00756-1 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 06.02.2020 | 7/20 | 19/00756-1 |
| 4 Eldranevndin | 06.02.2020 | 30/20 | 19/00756-1 |
| 5 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 32/20 | 19/00756-1 |

**Upprunin til málið:**
Áheitan frá ÍSF.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
ÍSF ynskir, at Tórshavnar kommunan tekur lógvatak saman við felagsskapinum, ið at virka fyri at doping ikki fer fram innan motións- og kappingarítrótt, herundir innan føroyska fittnessumhvørvið. ÍSF hevur gjørt avtalu við fleiri venjingarmiðstøðir og ynskir fegin at fáa allar við.

Ítróttasamband Føroya hevur síðani 2002 havt samstarv við ADD (Anti Doping Danmark) um anti-doping arbeiðið innan føroyska ítrótt. ADD er partur av heimsfelagsskapinum WADA, World Anti Doping Agency.

Í 2015 dagførdi WADA sína reglugerð, og merkti hetta, at bæði danska og føroyska reglugerðin eisini skuldu dagførast. Tann 1. januar í 2016 kom hendan nýggja dopingreglugerðin í gildi í Føroyum.

11. apríl 2016 undirskrivaðu Ítróttasamband Føroya og Andi Doping Danmark nýggja samstarvsavtalu.

Galdandi antidoping-reglugerð kann lesast her:
https://isf.fo/logir/dopingregluger%C3%B0-isf/

Nógv ítróttarfólk hava sína dagligu gongd í venjingarmiðstøðunum. ÍSF hevur tískil stóran áhuga í, at hesi venja í einum sunnum og tryggum venjingarumhvørvi.

ÍSF vil sjálvandi ganga á odda og heitir tískil á øll sersambond og ítróttafeløg, sum nýta venjingarmiðstøðir, um at venja í teimum venjingarmiðstøðum, ið hava eina samstarvsavtalu við Antidoping Danmark/Føroyar.

Seinastu tvey árini hevur ÍSF arbeitt miðvíst við antidoping. Fimm føroysk dopingeftirlitsfólk hava fingið góðkenning at taka royndir, og hevur hetta samstundis gjørt, at arbeiðið er vorðið meira miðvíst enn tað hevur verið. Hetta arbeiðið hevur tó bert fevnt um ítróttafólk, sum eru limir í einum ítróttafelag.

Tvørmegi var tann fyrsta venjingarmiðstøðin í Føroyum, sum gjørdi eina samstarvsavtalu við Antidoping Danmark/Føroya. Í 2018 hava Vælvera Fitness, sum hevur deildir í Tórshavn, Saltangará, Vestmanna og í Vági, Fullpower Føroyar, sum hevur deildir í Klaksvík og í Saltangará og ÍÐKA í Klaksvík gjørt samstarvsavtalu. Avtalurnar merkja, at venjingarmiðstøðirnar, saman við Antidoping Danmark/Føroyar, í felag ynskja at hava eitt skipað eftirlit.

Innan eldraøkið hevur TK í dag samstarvsavtalu við venjingarmiðstøð, ið ikki enn hevur gjørt avtalu við ÍSF- um anti-doping.

Um hetta mál verður samtykt, inniber tað, at TK framyvir bert vil samstarva við venjingarmiðstøðir, feløg v.m., ið eru partur av anti-doping skipan, umframt at TK vil eftir førimuni taka atlit til anti-doping í sambandi við umsiting og stuðul innan ítróttaøkið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ikki viðkomandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Sí omanfyri.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ongi.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ikki viðkomandi.

**Umhvørvisárin**
Ikki viðkomandi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | Ja | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka støðu til, um TK framyvir bert samstarvar við venjingarmiðstøðir, feløg v.m., ið eru partur av anti-doping skipan. Málið verður beint í býráðið umvegis trivnaðarnevndina og eldranevndina.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Sambært upplýsingum hjá ÍSF er tað nú bara ein venjingarmiðstøð í Tórshavnar kommunu, ið ikki er partur av anti-doping skipan. Heilsu- og Umsorganartænastan metir ikki, at tað er orsøk til at taka onnur stig hvat viðvíkur eldraøkinum.

Mett verður tí hóskandi, at tað nú verður tikin endalig støða til áheitanina frá ÍSF um, at Tórshavnar kommuna framyvir á ítróttaøkinum leggur seg eftir ikki at samstarva og geva innivist til tiltøk v.m., ið ikki eru partur av hóskandi anti-doping skipan.

Samstundis hevur landsstýrið júst send lógaruppskot um løgtingslóg um doping og óreiðiliga ávirkan í ítrótti til hoyringar. Sí hjálagt uppskot. Um henda verður samtykt kemur ein støðugur lógarkarmur um innsatsin móti doping. Henda lógin broytir ikki uppá at TK tekur støðu til sín leiklut í mun til samstarv, karmar v.m.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja, at kommunan framyvir á frítíðar- og ítróttaøkinum bert samstarvar við feløg og felagsskapir og gevur innivist til tiltøk, ið eru partur av hóskandi anti-doping skipan, tá slík finst og er viðkomandi. Málið verður beint í býráðið.

**Mentamálanevndin 15. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráið.

**Ískoyti:**
ÍSF ynskir, at Tórshavnar kommunan tekur undir við felagsskapinum at virka fyri at doping ikki fer fram innan motións- og kappingarítrótt, herundir innan føroyska fittnessumhvørvið.

Sambært upplýsingum hjá ÍSF er tað nú bara ein venjingarmiðstøð í Tórshavnar kommunu, ið ikki er partur av anti-doping skipan.

Heilsu- og Umsorganartænastan metir ikki, at tað er orsøk til at taka onnur stig hvat viðvíkur eldraøkinum, ið hevur venjingaravtalu við eina venjingarmiðstøðu, ið hevur anti-doping avtalu.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin hava mælt mentamálanevndini til at samtykkja, at kommunan framyvir á frítíðar- og ítróttaøkinum bert samstarvar við feløg og felagsskapir og gevur innivist til tiltøk, ið eru partur av hóskandi anti-doping skipan, tá slík finst og er viðkomandi.

Mentamálanevndin hevur 15. januar 2020 samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í Býráðið.

**Tilmæli til trivnaðarnevndina:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og fulltrúin í heilsu- og umsorgarnarfyrisitingini mæla trivnaðarnevndini til at taka støðu til samtyktina í mentamálanevndini.

**Tilmæli til eldranevndina:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og fulltrúin í heilsu- og umsorganarfyrisitingini mæla Eldranevndini til at taka støðu til samtyktina í Mentamálanevndini.

**Trivnaðarnevndin 06. februar 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Eldranevndin 06. februar 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

# 33/20 Víðka skipanina við ókeypis hallarleigu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 30.01.2020 | 31/20 | 20/00339-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 11/20 | 20/00339-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 33/20 | 20/00339-1 |

**Upprunin til málið:**
Annika Olsen, borgarstjóri.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Uppskot at lætta fíggjarliga um hjá ítróttafeløgum og sersambondum at brúka ítróttahallir, harundir Svimjihøllin, til venjingar soleiðis, at ítróttarfeløg og sersambond ikki gjalda hallarleigu til venjingar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Galdandi leiðreglur frá 6. juni 2018 áseta, at feløgini, sum lúka treytirnar, ikki skulu rinda hallarleigu sbrt. galdandi prísskrá í tíðarskeiðinum frá 15. august – 1. mai, meðan tey restina av árinum rinda sbrt. galdandi prísskrá.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Fyri hvønn tíma hesi brúka í kommunalum hallum verður rindað 150 kr./tíman frá kontu 5365 Stuðul til ítrótt til kontu 5717 Ítróttaanlegg. Fyri hvønn tíma hesi nýta í Gundadalshøllini (L/F Venjingarhøllin) rindar stuðulskontan 250 kr./tíman til L/F Venjingarhøllin.

Nýtslan hjá sersambondum o.l. er sbrt. galdandi prísskrá alt árið.

Skipan við stuðli til hallarleigu er ikki galdandi fyri Svimjihøllina kontu 5610, men feløg hava avtalu við kommuna um árligt gjald, ið er lágt sett.

Broytingin
Fyribils verður mett, at broytingin við ókeypis hallarleigu fyri ítróttafeløg og sersambond alt árið vil kosta umleið kr. 700.000 í 2020. Tá er roknað við, at feløgini og sersambondini ikki fullnýta allar tøku hallartímarnar til venjing alt summarið, tí virksemið gjarna er heldur lægri hesa árstíð. Helst verður talan um eina stigvísa tilgongd næstu árini, sum hædd kann takast fyri í komandi fíggjarætlanum.

Fíggjarstøðan hjá Svimjihøllina hevur við sær, at tað fær ongar virksemisavleiðingar, um svimjifeløg sleppa undan gjaldi í ár, men at hædd verður tikið fyri hesum til komandi fíggjarætlan.

Mett verður neyðugt at eftirhyggja verandi leiðreglur um lán og brúk av hallum, eitt nú í sambandi við býtið av hallartímum. Eisini skal støða takast til leigumál hjá øðrum ítróttafeløgum o.l.,. ið ikki eru í vanligum ítrótta- og fimleikahallunum, og sum fáa stuðul til leigu.

Nærri tilmæli av hesum viðurskiftum verða løgd fyri nevnd á seinni fundi í vár eisini saman uppskotinum um ítrótta- og frítíðarpolitikk.

Broytingin hevur við sær, at so siga øll hallarleiga hjá ítróttafeløgum og sersambondum verður ókeypis. Meginparturin av stuðlinum verður, sum omanfyri lýst, í praksis fluttur til rakstrarkontuna hjá Ítróttaanleggum. Í sambandi við fíggjarætlanina 2021 kundi upphæddin til hallarleigu tí heldur verið játtað beinleiðis til kontu hjá Ítróttaanlegg.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at flyta 700.000 kr. av kontu 20910 Aðrar inntøkur til kontu 5365 Stuðul til ítrótt ætlað ókeypis hallarleigu til venjingar hjá ítróttafeløgum og sersambondum alt árið. Málið verður beint í býráðið.

**Fíggjarnevndin 30. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir sum eykajáttan.

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

# 34/20 Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 151/14 | 14/03408-18 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.06.2014 | 203/14 | 14/03408-18 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 148/14 | 14/03408-18 |
| 4 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 207/14 | 14/03408-18 |
| 5 Mentamálanevndin | 11.02.2015 | 22/15 | 14/03408-18 |
| 6 Mentamálanevndin | 06.05.2015 | 72/15 | 14/03408-18 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2015 | 117/15 | 14/03408-18 |
| 8 Mentamálanevndin | 19.10.2015 | 209/15 | 14/03408-18 |
| 9 Tekniska nevnd | 20.10.2015 | 112/15 | 14/03408-18 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.10.2015 | 199/15 | 14/03408-18 |
| 11 Býráðsfundur | 21.10.2015 | 173/15 | 14/03408-18 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 236/15 | 14/03408-18 |
| 13 Fíggjarnevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 14 Býráðsfundur | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 15 Mentamálanevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 16 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 12/16 | 14/03408-18 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 24/16 | 14/03408-18 |
| 18 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 52/16 | 14/03408-18 |
| 19 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 38/16 | 14/03408-18 |
| 20 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 133/16 | 14/03408-18 |
| 21 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 158/16 | 14/03408-18 |
| 22 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 128/16 | 14/03408-18 |
| 23 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 222/16 | 14/03408-18 |
| 24 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 162/16 | 14/03408-18 |
| 25 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 273/16 | 14/03408-18 |
| 26 Mentamálanevndin | 27.10.2016 | 275/16 | 14/03408-18 |
| 27 Fíggjarnevndin | 27.10.2016 | 364/16 | 14/03408-18 |
| 28 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 247/16 | 14/03408-18 |
| 29 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 367/16 | 14/03408-18 |
| 30 Mentamálanevndin | 24.11.2016 | 300/16 | 14/03408-18 |
| 31 Fíggjarnevndin | 29.11.2016 | 396/16 | 14/03408-18 |
| 32 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 297/16 | 14/03408-18 |
| 33 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 323/16 | 14/03408-18 |
| 34 Mentamálanevndin | 06.12.2016 | 312/16 | 14/03408-18 |
| 35 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 404/16 | 14/03408-18 |
| 36 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 44/17 | 14/03408-18 |
| 37 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 71/17 | 14/03408-18 |
| 38 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 120/17 | 14/03408-18 |
| 39 Mentamálanevndin | 24.04.2017 | 89/17 | 14/03408-18 |
| 40 Fíggjarnevndin | 26.04.2017 | 103/17 | 14/03408-18 |
| 41 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 158/18 | 14/03408-18 |
| 42 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 140/18 | 14/03408-18 |
| 43 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 115/18 | 14/03408-18 |
| 44 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 190/18 | 14/03408-18 |
| 45 Mentamálanevndin | 18.06.2018 | 232/18 | 14/03408-18 |
| 46 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 205/18 | 14/03408-18 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 47 Mentamálanevndin | 02.07.2018 | 238/18 | 14/03408-18 |
| 48 Fíggjarnevndin | 04.07.2018 | 217/18 | 14/03408-18 |
| 49 Býráðsfundur | 04.07.2018 | 174/18 | 14/03408-18 |
| 50 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 196/18 | 14/03408-18 |
| 51 Mentamálanevndin | 26.02.2019 | 73/19 | 14/03408-18 |
| 52 Fíggjarnevndin | 28.02.2019 | 61/19 | 14/03408-18 |
| 53 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 36/19 | 14/03408-18 |
| 54 Mentamálanevndin | 11.09.2019 | 249/19 | 14/03408-18 |
| 55 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 235/19 | 14/03408-18 |
| 56 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 205/19 | 14/03408-18 |
| 57 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 57/20 | 14/03408-18 |
| 58 Fíggjarnevndin | 12.02.2020 | 45/20 | 14/03408-18 |
| 59 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 34/20 | 14/03408-18 |

## Málslýsing:

**2012-1064/17 SG**

**Fyrireika bygging av nýggjum skúla**

Arbeiðsbólkur og arbeiðssetningur
Í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging 2012-2021 (sí mál 2011-0679), sum skúlastýrini eisini hava viðgjørt og gjørt viðmerkingar til, verður m.a. mælt til at byggja nýggjan trý sporaðan skúla í staðin fyri Tórshavnar kommunuskúla og Venjingarskúlan. Mælt verður eisini til at skipa forskúla og frítíðarskúla í øllum skúlum. Haraftrat er lagt upp til at hava tilboð til næmingar við serligum avbjóðingum.

Hesin nýggi skúlin hevur arbeiðsheitið Vesturskúli við tað, at hann ætlandi verður staðsettur í Vesturbýnum inn frá Landavegnum, har økið eisini er lagt av til at byggja ítróttahøll. Inn frá Marknagilsvegnum verður miðnámsskúladepilin granni.

Tørvur er á at gera uppskot til eitt meira útgreinað konsept bæði um samlaða virksemið í skúlanum og bygningin sjálvan. Hetta arbeiðið er at meta sum ein fyrsta fyrireiking og hugskotsgrundarlag fyri víðari politiskari viðgerð og støðutakan til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild til at seta arbeiðsbólk við umboðum fyri umsitingina, skúlarnar, frítíðarskúlarnar og møguliga onnur at gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlanum at lata mentamálanevndina aftur til viðgerðar í seinasta lagi 15. juni 2012.

**Mentamálanevndin 30. apríl 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 2. mai 2012:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkurin hevur latið gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlan, sí frágreiðing. Arbeiðsbólkurin hevur m.a. lýst námsfrøðiliga profilin við atliti at eitt nú ætlanini um deildarbýti, floks- og hølisbýti, samstarv millum lærarar og pedagogar, samstarv millum skúlar, serundirvísing og næmingatrivnað. Harumframt verður nomið við staðsetingina, bygningsstødd v.m.

Konseptið er í góðum samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging eins og viðmerkingarnar frá skúlastýrunum (máltal 2011-0679).

Mett verður, at tilfarið, ið arbeiðsbólkurin hevur latið úr hondum, saman við álitinum um skúlabygnað og skúlabygging og viðmerkingunum frá skúlastýrunum er haldgott grundarlag fyri at fara víðari í tilgongdini at fyrireika bygging av nýggjum Vesturskúla. Næsta stigið er sostatt at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá.

Til endamálið skal fígging fáast til vega. Í sambandi við heildarætlanina fyri Kommunuskúlan eru uml. 3 mió kr. ikki brúktar. Nýggi Vesturskúlin er ein samanlegging av Kommunuskúlanum og Venjingarskúlanum, og tí verður mett, at hesir pengar kunnu játtast og flytast til nýggju skúlaætlanina fyri hesar báðar skúlar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá til nýggjan Vesturskúla í samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging, og at áður játtað upphædd kr. 3 mió frá kontu 4175 Dagføring av skúlum L41003 Kommunuskúlin høvuðsumvæling verður flutt til bygging av nýggjum Vesturskúla.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri leiðslur, lærarar og foreldur í skúlastýrunum í Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og umboðum fyri umsitingina (sí mál nr. 14/00423) hevur gjørt uppskot um bygnaðarliga samskipan og samanlegging av Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og tíðarætlan.

Á býráðsfundi 22. mai 2014 varð samtykt at broyta ætlaða talið av sporum í Vesturskúlanum soleiðis, at trý spor vera í yngru flokkunum og fimm spor í 8. og 9. flokki (sí mál nr. 14/00423).

Grundøkið við Landavegin, sum ætlanin er at byggja skúlan á, er 34.000 $m^2$, til samanberingar eru grundøkini hjá Skúlanum við Løgmannabreyt og Skúlanum á Argjahamri ávikavist 22.000 $m^2$ og 20.000 $m^2$.

Bygginevndin hevur viðgjørt uppskotið, sum ein arbeiðsbólkur læt úr hondum í juni 2012, og nevndin er samd um, at tað uppskotið er gott grundarlag at brúka í fyrireikingini at byggja nýggja skúlan í vesturbýnum.
Á fundi mikudagin 18. juni 2014 samtykti bygginevndin at biðja um, at 1.300.000 kr., sum settar eru av til av Vesturskúla, verða játtaðar til fyrireiking og til byggiskrá.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 1.300.000 kr. til fyrireiking og útvegan av byggiskrá av konto 4176 Nýbygging av skúlum.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Støðan í dag.

Tøkt lendi, sum ætlanin er at byggja á:

| | | |
|---|---|---|
| Matr.nr. | 1099 | 14.660 $m^2$ |
| Matr.nr. | 1100 | 15.280 $m^2$ |
| Matr.nr. | 1102c | 5.879 $m^2$ |
| Tilsamans | | 35.819 $m^2$ |

Hesir matriklar eru allir D3-øki Almennir stovnar.

Samtykt er, at skúlin skal byggjast til 850 næmingar, og við grundarlagi í verandi skúlum við Løgmannabreyt og á Argjahamri eru umleið 14 $m^2$ fyri hvønn næming.
Nýggi skúlin skal sostatt vera 850 x 14 $m^2$ = 11.900 $m^2$ til støddar.

Neyðugt er at útvega meiri lendi, tí serstaka byggisamtyktin fyri Marknagil ásetur nettonýtslustig 0,3, sum krevur eitt grundøkið uppá 39.700 $m^2$.

Ætlanin er at nýta matr.nr. 1104d ella partar av hesum matrikli afturat. Kommunan eigur grundøkið, sum er 6.576 $m^2$ til støddar.

Soleiðis verður samlaða víddin økt úr 35.819 $m^2$ til 42.395 $m^2$.

Bygginevndin hevur á fundi 11. desember 2014 samtykt at mæla til, at matr.nr. 1104d verður lagt afturat samlaða økinum til Vesturskúlan.

Upplýsast skal, at matr.nr. 1104d er C3-øki Miðstaða- bústaðarbygging.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur fingið 1.part av byggiskránni (Byggiskrá Fyritreytir) og mælir til at góðkenna hana við tí fyrivarni, at smærri tillagingar kunnu verða gjørdar av umsitingingini, áðrenn útbjóðað verður.

Víst verður til skjal 15/01528-2, sum er viðfest.

Sambært tíðarætlanini verða 2. og 3. partur av byggiskránni lidnir í september. 2. partur er námsfrøðilig viðurskifti og 3. partur er teknisk viðurskifti.

**Tilmæli til mentamálanevndina:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og góðkenna fyrsta part av byggiskránni.

**Ískoyti:**
Eftir at málið var fyri í mentamálanevndini, hevur fundur verið á teknisku deild við luttøku av umboðum fyri Landsverk og Rambøll um atkomuviðurskiftini til Vesturskúlan. Niðurstøðan frá fundinum var, at Rambøll skuldi koma við einum uppskoti til loysn og gera eina innkoyring frá Marknagilsvegnum ígjøgnum nevnda matr.1104d.
Mál 14-03118-22. Hjáløgdu kort sum vísa uppskot til loysn.

**Tilmæli til byggi- og býarskipanarnevndina:**
Tekniski stjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og teknisku deild og nýta matr. nr. 1104d fyri at halda kravið um nettunýtslustig til byggingina og møguligan atkomuveg frá Marknagilsvegnum til Vesturskúlan.

**Mentamálanevndin 6. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til mentamála-nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 12. oktober 2015 samtykt endaliga byggiskrá fyri byggiverkætlanina Skúlin á Fløtum. Byggiskráin, ið er hjáløgd, er í trimum pørtum:

1. Fortreytir
2. Námsfrøðilig viðurskifti
3. Teknisk viðurskifti

**Grundøki**
Eitt øki í Marknagili er lagt av til Skúlan á Fløtum www.saf.fo . Økið er tilsamans 42.335 m$^2$ og er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Sambært serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil kunnu bygningurin/bygningarnir í mesta lagi vera 10.583 m$^2$ við tilsamans 12.700 innrættaðum m$^2$. Støddin á skúlanum verður 11.600 m$^2$ við møguleika at byggja út til tveir flokkar aftrat í 7. árgangi.

**Kostnaður**
Metta samlaða íløgan til handverkaraútreiðslur uttan meirvirðisgjald verður:
11.600 m$^2$ av gólvvídd fyri 11.600 m$^2$ x 20.000 kr.= 232.000.000 kr.

**Tíðarætlan**
Byggingin verður skipað sum ein bygging í trimum byggistigum. Sambært tíðarætlanini verður fyrsta byggistig liðugt í juli 2018, og tá flytur miðdeildin (4.- 6-fl.) inn í skúlan. Annað byggistig er til hádeildina (7.-9.fl.), og tað verður liðugt í juli 2019. Í juli 2020 verður triðja byggisstig liðugt, og tá flytur grunddeildin (0-3- fl. og frítíðarskúli) inn í skúlan.

Málið verður viðgjørt í mentamálanevndini, tekniskunevnd, byggi- og býarskipanarnevndini, fíggjarnevndini og í býráðnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjóri og býararkitekturin mæla mentamálanevndini til at góðkenna byggiskránna og at beina málið víðari til teknisku nevnd, ið skal beina málið víðari til byggi- og býarskipanarnevndina, ið skal beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í avvarðandi nevndir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at nevndin tekur undir við byggiskránni fyri tann partin sum viðkemur vegaføringar, ferðsluviðurskiftir og leiðingar í sambandi við verkætlanina, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Timæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við byggiskránni, fyri tann partin, sum viðkemur býarskipan og staðseting, og at beina málið í býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Halla Samuelsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at góðkenna byggiskránna og at beina málið í býráðið, og heitt verður samstundis á teknisku nevnd um í góðari tið at skipa øll nøktandi vega- og ferðsluviðurskifti við skúlarnar.

**Býráðsfundir 21. oktober 2015:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti at góðkenna byggiskránna.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri Skúlan á Fløtum var útskrivað 23. oktober 2015 eftir at Tórshavnar býráð 21. oktober 2015 hevði samtykt byggiskránna fyri Skúlan.

Fýra ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey vóru:
- Elvi (Selmar Nielsen Arkitektar, Ósbjørn Jacobsen Arkitektar, LBF og SMJ)
- BIGKONTRAST (BIG-Bjarke Ingels Group, Kontrast byggilist og byggifrøði, LBF, SMJ)
- Árni Winter arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF
- MAP Arkitektar, Arkitektar 99, LBF og PB-Consult

18. desember 2015 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og var tað latið navnloynt soleiðis, at nevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

4. januar 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat

ráðgevaratoymið skal fáa møguleikan at innganga avtalu um ráðgeving, projektering og eftirlit av skúlabyggingini. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjórin og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um projektering og eftirlit, og at venda aftur við einum uppskoti til sáttmála.

**Mentamálanevndin 6. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. januar 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 06. januar 2016:** Einmælt samtykt at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og heimila umsitingini at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið: Árni Winther arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF og uppskoti teirra, Eindirnar í heildini.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur á fundi 9. februar 2016 samtykt samráðingarúrslitið frá samráðingunum hjá samráðingartoyminum (umboð frá bygginevnd og teknisku fyrisiting) við vinnandi ráðgevaratoymið í hugskotskappingini. Talan er um samtak, ið eitur Samtakið Eind Í/F (undir stovnan).

Hjálagdur er uppskot til sáttmála við tilhoyrandi fylgiskjølum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini til at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, fílist á, at tilmælið við tilfari kom ikki fyrrenn á sjálvum fundinum og tekur ikki støðu til málið í dag.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini og at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**

Verkætlanin er komin so mikið áleiðis at klárt er at fara undir jørðarbeiðið. Í fyrsta lagi avgrevstur, ið m.a. skal geva betri yvirlit til víðari jørðarbeiði t.e. spreinging, grovplanering, planering vm.

Útboð hevur verið av avgrevstrinum. Kostnaðarmetingin lá millum 1,1 og 1,4 mió. kr.

2 arbeiðstakarar vóru bodnir at bjóða. Lisitatión var 3. mai 2016 kl. 14.

Tilboðini vóru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| P/F Articon | kr. 1.294.147 |
| H. V. Lützen | kr. 1.772.448 |

Ikki íroknað MVG.

Farast kann í holt við arbeiðið innan umleið 3 vikur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka undir við at gera sáttmála við lægsta tilboðsgeva og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Sáttmálin væntast klárur til viðgerðina í figgjarnevndini.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson vóru ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndni og beina málið í býráðið.

***Býráðsfundur 19. mai 2016: Einmælt samtykt.***

*Ískoyti*
*Á karminum eru fyri 2016 játtaðar 30,8 mio.kr. á stovnsnr. 4174 – Nýbygging skúlar (íløgur). Projekteringin av skúlanu er nú gott ígongd, umframt at jørðarbeiðið er um at fara í gongd. Tørvur er á áleið upphæddini til virksemi í ár.*

*Tilmæli*
*Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla at játta 30,8 mio.kr. á projektkonto L41012.*

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Eftir at fyrra útbjóðingin bleiv annulerað í summar hevur bygginevndin saman við Ráðgevarasamtakinum Eind gjøgnumgingið skipanaruppskotið vm. og gjørt ávísar tillagingar. Yvirlit sæst í hjálagda skjali.

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka tillagingarnar til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
20. oktober 2016 kl. 14 var licitatión uppá bygging av nýggjum skúlabygningi til Skúlan á Fløtum.

Hesi feløg/samtøk vóru boðin at bjóða í innbodnari licitatión og teirra høvuðsboð eru:

P/F MT Højgaard Føroyar við undirarbeiðstakarum - 287.151.814 kr.
P/F J&K Petersen, Sp/f Húsavarðatænastan og Sp/f TG Verk við undirarbeiðstakarum - 298.955.524 kr.
(eisini nevnt: Samtakið í Havn)
P/F Articon og Sp/f Búsetur við undirarbeiðstakarum - 267.809.320 kr.

Høvuðsráðgevin Samtakið Eind Í/F hevur, eftir innanhýsis viðgerð og gjøgnumgongd av tilboðunum, saman við umboðum fyri Tórshavnar kommunu, latið tilmæli 26. oktober 2016 viðvíkjandi hvat av samtøkunum skal fáa í boði at gera eina partalagsavtalu (fasu I) og har ætlandi raka ein targetprís, sum síðani vil innibera eina endaliga partalagsavtalu (fasu II) og ein arbeiðstøkusáttmála.

Henda tilgongdin kemur ætlandi at byrja 1. november 2016 og gongur fram til í januar 2017, tá komið ætlandi verður aftur í nevndir og býráð við einum úrsliti og tilmæli.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur 26. oktober 2016 viðgjørt tilmælið frá Samtakinum Eind og umrøtt málið saman við teknisku fyrisiting. Bygginevndin tekur undir við tilmælinum frá Samtakinum Eind (sí tilmælið á nevndarportalinum).

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at fara í partalag (fasu I) við lægsta tilboðsgeva. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 27. oktober 2016:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Við atliti til tryggja javna gongd og framhald í verkætlanini, er nú klárt at innganga arbeiðstakarasáttmála um víðari jørðarbeiðið. Avgrevsturin er framdur og byggipláss-økið riggað til, herundir við skúrum til verkætlanarsamskipanina vm.

Næsta stigið, sum hesin arbeiðstøkusáttmálin fevnir um, er spreinging og planering. Uppskot til sáttmála og kostnaðarmeting verður tøkt til fundin. Sáttmálin um víðari jørðarbeiðið er við

lægsta tilboðsgeva frá lisitatiónini Samtakið Articon - Búsetur. Fígging er tøk á játtanini til Skúlan á Fløtum.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum viðger sáttmálan týsdagin áðrenn fundin í mentamálanevndini.

Sáttmáli um størra partin av høvuðsarbeiðstøkuni (byggingin) verður klárur tá fasa 1 í partalagnum verður liðug í fyrsta ársfjórðingi í 2017.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at innganga arbeiðstakarasáttmála við Samtakið Articon – Búsetur um jørðarbeiði fíggjað av kontu 4176 Nýggir skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Mett verður, at samlaði íløgutørvurin til byggingina av Skúlanum á Fløtum fíggjarárið 2017 verður umleið kr. 70 mió.

Í uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2017 eru settar kr. 42,075 mió av til endamálið. Í hesum sambandi er fráboðað, at írestandi fíggingin til komandi fíggjarár kr. 28 mió skal játtast sum eykajáttan í inniverandi fíggjarári av løgukarmi 5175 Musikkskúlin.

Partalagssáttmáli er undirskrivaður. Umframt avgrevsturin, sum er liðugur, verður grót- og spreingiarbeiðið byrjað í ár, og byggingin av sjálvum bygninginum byrjar ætlandi í apríl 2017.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjóri mæla til at samtykkja eykajáttan kr. 28 mió av løgukarmi 5175 Musikkskúlin til løgukontu 4176 Nýbygging skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Mentamálanevndin 24. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 28 mió av løgukarmi 5175 Musikkskúlin til løgukontu 4176 Nýbygging skúlar L41012 Skúlin á Fløtum við teirri viðmerking, at meirinntøkurnar fyri fíggjarárið 2016 skulu játtast til arbeiðið at byggja Musikkskúlan og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið at viðgera tvær ferðir.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Við atliti til tryggja javna gongd og framhald í verkætlanini, er nú klárt at innganga arbeiðstakarasáttmála um víðari jørðarbeiðið. Avgrevsturin er framdur og byggipláss-økið riggað til, herundir við skúrum til verkætlanarsamskipanina vm.

Næsta stigið, sum hesin arbeiðstøkusáttmálin fevnir um, er spreinging og planering. Uppskot til sáttmála er gjørt, kostnaðarmetingin fyri arbeiðið er kr. 7.386.512 u/mvg. Harumframt koma útreiðslur til byggipláss uml. kr. 500.000 og mvg, samlaður kostnaður umleið kr 8.500.000. Sáttmálin um víðari jørðarbeiðið er við lægsta tilboðsgeva frá lisitatiónini Samtakið Articon - Búsetur. Fígging er tøk á játtanini til Skúlan á Fløtum.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum viðger sáttmálan týsdagin áðrenn fundin í mentamálanevndini.

Sáttmáli um størra partin av høvuðsarbeiðstøkuni (byggingin) verður klárur tá fasa 1 í partalagnum verður liðug í fyrsta ársfjórðingi í 2017.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at innganga arbeiðstakarasáttmála við Samtakið Articon – Búsetur um jørðarbeiðið og játta kr. 8.500.000 av kontu 4176 Nýggir skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Mentamálanevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ì sambandi við, at byggiverkætlanin verður skipað í partalagssamstarvi millum Tórshavnar kommunu, Samtakið Eind Í/F og Samtakið Articon – Búsetur Í/F, skal sbrt. partalagsskipanini skipast ein stýrisbólkur við umboðum fyri Tórshavnar kommunu og bæði samtøkini.

Bygginevndin, sum hevur virkað higartil, gongur tí út, men mælt verður til, at býráðið velur umboð í stýrisbólkin.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla býráðnum til at velja umboð í stýrisbólkin í partalagnum.

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vóru Gunnvør Balle, Jákup Dam, Helena Dam á Neystabø og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**

Partalagsavtala varð undirskrivað 17. november 2016. Síðani hava partarnir arbeitt við at gjøgnumganga og menna verkætlanina sbrt. ætlanini í partalagsavtaluni, herundir at fáa sent myndugleikaprojekt til góðkenning hjá byggivaldinum. Hetta var gjørt fyrst í apríl og er endaligt svar væntandi um stutta tíð.

Eisini er arbeitt við at fáa ásett endaliga byggikostnaðin. Í tilgongdini eru fleiri tilagingar gjørdar við atliti til at náa ein nøktandi targetkostna samsvarandi upprunaligu ætlanini, sí hjálagt skjal. Eisini sæst at, í tilgongdini eru nakrar postitiónir, sum av misgáum ikki vóru við í upprunaliga útboðstilfarinum/nøgdarlistunum, og sum nú eru roknaðar við.

Targetprísurin er nú ásettur til kr. 247.000.000 við avhending í einum byggistigi 1. apríl 2020, tó so, at møguliga vilja partar av verkætlanini kunna verða liðug áðrenn, men er ov tíðiliga at áseta tað enn. Arbeiðið kann byrja at kalla beinanvegin. Verandi arbeiðstøka við planering er um at vera liðug.

Nú er klárt at taka støðu til um farast skal víðari í partalagsfasu 2 og gera høvuðsarbeiðstøkusáttmála.

Kostnaðarkarmurin fyri alla verkætlanina (HVÚ, ókent, prís- og lønarvøkstur, heildarráðgeving, eftirlit, listprýði v.m. umframt mvg) er nú kr. 383.073.750.

Higartil eru játtaðar kr. 101.752.000 til verkætlanina, harav kr. 42.075.000 er standa í løgukarmi 4176 Nýbygging skúlar fyri fíggjarárið 2017, og aðrar kr. 37.809.000 standa sum minninýtsla fyri 2016 og tí skulu framflytast í sambandi við ársroknskapin hjá kommununi.

Írestandi fíggjartørvur avrundað er sostatt kr. 281.323.000, ið skulu játtast yvir fíggjarárini 2018, 2019 og 2020. Mett verður, at fíggjartørvurin fyri inniverandi ár er kr. 61.015.000, tvs., at í inniverandi fíggjarárið er kr. 18.869.000 sett ov nógv av, og kann løgukarmurin tí lækkast fyri inniverandi fíggjarár.

Samlaði fíggjartørvurin fyri árini 2018, 2019 og 2020 verður sambært hesum tí kr. 300.192.000. býtt soleiðis samsvarandi væntaðum útreiðslutørvi fyri hesi ár: í 2018 kr. 110.175.000, í 2019 kr. 127.383.000, og í 2020 kr. 62.634.000.

Hjáløgd málinum er:
a) frágreiðing um fyriliggjandi forprojekt til góðkenningar
b) uppskot til høvuðsarbeiðstøkusáttmála við Samtakið Articon-Búsetur Í/F

c) kostnaðaryvirlit

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at góðkenna hjálagda forprojekt og høvuðsarbeiðstøkusáttmála og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina, har samlaði kostnaðarkarmurin fyri byggingina er kr. 383.073.750.

Til tess mæla trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin til at játta fyri fíggjarárið 2017 kr. 23.206.000 á løgukarminum 4176 Nýbygging skúlar út á løgukontu L41012 Skúlin á Fløtum, og flyta minninýtslu á somu løgukontu fyri fíggjarárið 2016 kr. 37.809.000, og at írestandi upphæddin kr. 300.192.000 fyri árini 2018, 2019 og 2020 verður játtað samsvarandi býtinum omanfyri, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 24. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevdini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Einmælt samtykt.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

**Ískoyti**:
Á løgukarminum L4176 Nýbygging skúlar fyri 2018 eru játtaðar 100 mio.kr til verkætlanina. Støðug gongd er á verkætlanini og væntandi verður tørvur á á leið 91 mio. kr til arbeiðstakarar og ráðgevar. Hartil koma ymiskar útreiðslur hjá byggiharranum. Samstundis er við 1 viðgerð samtykt í býráðnum framflytning av minnunýtsluni í 2017 á 6.541 tkr. (sí mál 18/01521 – Framflytingar fyri árið 2017). Mett verður hóskandi at hava eitt ávíst fíggjarligt rásarúm fyri um verkætlanin kemur at vinna inn á settu tíðarætlanina.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at játta 92 mio. kr. av løgukarminum 4176 á løgukonto L41012 - Skúlin á Fløtum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt**.**

**Ískoyti**:
Fíggjarnevndin biður um, at fáa málið á skrá til kunningar.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**:
Víst verður til skjal nr. 14/03408-83.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, virkandi tekniski stjórin, deildarleiðari á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við arbeiðstakara og ráðgeva um dagføring av partalagsavtaluni at leggja fyri aftur í nevndunum til góðkenningar. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 18. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur havt samráðingar við partarnar í partalagssamstarvinum t.e. Í/F Articon-Búsetur og Í/F Eind og er komin til eina semju. Sí hjálagt ískoyti til partalagsavtaluna (dagfest 17. November 2016) og ískoyti til arbeiðstakarasáttmálan (dagfestur 10. Mai 2017).

Ískoytini innibera at TK hækkar upphæddina til ókendu puljuna við 5 mio.kr., umframt setur 1 mio.kr. av til at lækka targetkostnaðin frá 248 mio.kr. til 247 mio.kr., umframt setur 1 mio.kr. av til tilkeyp í sambandi við eina betri takloysn, soleiðis at endamálið við at gera takið atkomiligt og brúkiligt kann vera rokkið.

Hesar broytingarnar innibera, at kostnaðarkarmurin fyri alla verkætlanina (HVÚ, ókent, prís- og lønarvøkstur, heildarráðgeving, eftirlit, listprýði v.m., umframt kommunalt MVG) fer úr 383.073.750 til kr. 390.511.250. Væntandi hava hesar broytingar ikki samanlagt fíggjarligar avleiðingar í 2018 og helst heldur ikki í 2019 og eisini tengt at, hvussu umfatandi brúkið av tí ókenda verður framyvir. Í sambandi við viðgerðina av fíggjaræltanini í heyst verður nærri nágreina um periodisering av játtanini til verkætlanina í 2019 og 2020.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin fyri verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við ískoytinum til partalagsavtaluna fyri Skúlan á Fløtum og at hækka samlaða kostnaðarkarmin fyri verkætlanina til kr. 390.511.250. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. juli 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 04. juli 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juli 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Helena Dam á Neystsbø hevur boðað frá, at hon ynskir at taka seg úr stýrisbólkinum fyri "Nýggjur skúli í vesturbýnum".

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Tikið til eftirtektar at Helena Dam á Neystabø tekur seg úr stýrisbólkinum og at Bjørghild Djurhuus tekur sætið í stýrisbólkinum.

**Ískoyti:**
Viðv. broyting av takbelegningi
Innanhýsis stýrisbólkurin og Stýrisbólkurin fyri skúlan á Fløtum hevur eftir áheitan frá Húsaumsitingini viðgjørt spurningin um, hvørt tað er betri at brúka takpapployns ístaðin fyri takmembran (takdúk) á tekjuni á oyggjunum (omaná bygningunum 1-7, tó ikki miðøkið). Takpapp er minni viðbreki fyri herverki, skaðum v.m., umframt nakað høgligari at røkja og viðlíkahalda.

Meirkostnaður fyri at skifta frá membrani til papp er 4.056.754 kr. + kommunalt MVG. Innanhýsis stýrisbólkurin mælir til at broyta takbelegningin til takpapp. Í mun til verkætlanina er broytingin at rokna sum eitt tilkeyp og kann tí ikki fara av puljuni til ókent og eiheldur er rúm fyri hesi íløgu á øðrum kontum í verkætlanini. Tí er neyðugt at økja samlaða kostnaðarkarmin fyri verkætlanina við hesi upphædd.

Ætlandi verður byrjað at leggja takpapp í mars 2019 og tekur tað arbeiðið nakrar mánaðir.

Viðv. innbúgvi og uttandura økið
Sum greitt frá í framløgu í sambandi við viðgerðina í nevndini á sumri 2018 er greitt, at áður gjørd meting í 2016 um kostnaðin av hóskandi innbúgvi v.m. ikki heldur í mun til tað, sum nú verður mett rímiligt. Á fundinum verður innleiðandi greitt frá metingini og atlitunum í málinum. Á einum komandi fundi kemur endalig tilráðing um málið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at leggja takkpapp á bygningin í staðin fyri membran, og í hesum sambandi at hækka samlaða løgukarmin fyri byggiverkætlanina við 4.056.754 kr. + kommunalt MVG at fíggja yvir løgujáttanina í 2020.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 26. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á løgukarminum L4176 Nýbygging skúlar fyri 2019 eru játtaðar 90.000 tkr til verkætlanina, umframt framflyting frá 2018 á 21.970 tkr. Støðug gongd er á verkætlanini og væntandi verður tørvur á umleið 110.000 tkr í 2019 til arbeiðstakarar, ráðgevar og byggiharraveitingar og -útreiðslur. Á framflutta løgukarminum 4176 Nýbygging skúlar eru 18.099 tkr. tøkar., ið tørvar at vera flutt á projektkontuna L41012 Skúlin á Fløtum.

Ískoyti viðv. játtan til innbúgv v.m.

Tekstur er ávegis

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at játta 18.099 tkr. av løgukarminum 4176 Nýbygging skúlar á løgukonto L41012 - Skúlin á Fløtum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á løgukarminum L4176 Nýbygging skúlar fyri 2019 eru játtaðar 116.000 tkr til verkætlanina.
Á projektkontuni L41012 Skúlin á Fløtum er væntað meirnýtsla á uml. 5 mio.kr. í 2019 (ikki endaliga uppgjørt enn!). Hetta vegna at tað hevur gingið væl at byggja í 2019.

Støðug gongd er á verkætlanini, ið ætlandi endar í ár. Tilgongdin viðv. útboð av innbúgvi og øðrum byggiharraveitingum er farin í gongd og kemur tann spurningur væntandi fyri aftur til viðgerðar í mars 2020.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at játta 116.000 tkr. av løgukarminum 4176 Nýbygging skúlar á løgukonto L41012 - Skúlin á Fløtum.
Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Mentamálanevndin 05. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. februar 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

# 35/20 Veiðifelagið Byrsumúli : Áheitan um at fáa samstarv í lag við kommununa fyri at betra um viðurskiftini hjá skjótingini í høvuðsstaðnum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 108/17 | 15/03761-9 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 162/17 | 15/03761-9 |
| 3 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 234/17 | 15/03761-9 |
| 4 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 310/17 | 15/03761-9 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 85/18 | 15/03761-9 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2018 | 104/18 | 15/03761-9 |
| 7 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 159/18 | 15/03761-9 |
| 8 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 203/18 | 15/03761-9 |
| 9 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 178/18 | 15/03761-9 |
| 10 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 152/18 | 15/03761-9 |
| 11 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 270/18 | 15/03761-9 |
| 12 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 31/19 | 15/03761-9 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2019 | 26/19 | 15/03761-9 |
| 14 Tekniska nevnd | 12.03.2019 | 18/19 | 15/03761-9 |
| 15 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 98/19 | 15/03761-9 |
| 16 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.04.2019 | 13/19 | 15/03761-9 |
| 17 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 143/19 | 15/03761-9 |
| 18 Mentamálanevndin | 22.10.2019 | 278/19 | 15/03761-9 |
| 19 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 306/19 | 15/03761-9 |
| 20 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 268/19 | 15/03761-9 |
| 21 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 42/20 | 15/03761-9 |
| 22 Fíggjarnevndin | 12.02.2020 | 43/20 | 15/03761-9 |
| 23 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 35/20 | 15/03761-9 |

**Málslýsing:**
Veiðifelagið Byrsumúli sendi í 2015 áheitan um at fáa samstarv í lag við kommununa um at betra um viðurskiftini hjá skjótingini í høvuðsstaðnum (sí hjáløgd skjøl). Síðani hevur verið nakað av samskifti millum kommununa og felagið.

4. apríl 2017 sendir felagið umsókn um stuðul til projektering av eini verkætlan at dagføra skjótibreytirnar.

Talan er um tilboð frá Sp/f HMP Consult

“Prísurin fyri at gera eitt projekt er 450.000,- umframt MVG.
Við í hesum er:

- Myndugleikaprojekt og projekt klárt til útbjóðing.
-

Í hesum er íroknað:

- Lendisprojekt við vegum og gøtum.
- Dekkgrót fram við fjørðuni.

Skal viðmerkja, at vanliga er neyðugt at gera simuleringar á Hydraulisk institut í DK, fyri at áseta stødd á dekkgroti og hvussu stórur verjugarðurin skal gerast.
Hettar er so ikki íroknað prísin og kostar hettar neyvan undir 100.000,- at fáa gjørt. Tað kunnu vit so venda aftur til, kanska "overkill" frá mínari síðu.

- Innbyggja skýli, smærri bygningar o.t. í samb. við skjótivøllin.
- Ljós fram við vegum og gøtum.
- Uppmáting av lendinum.
- Visualisering av verkætlanini.

Tit senda okkum mát og plasering av skýlum, lutum o.t.
Er nakað eg havi gloymt, so hoyri eg frá tykkum. Eg hugsaði at tit skuldu hava eina samlaða loysn frá okkum."

Í sambandi við at skjótibreytin bleiv gjørd í farnu øld og síðani hevur verið drúgt samskifti við ymiskar myndugleikar v.m. um viðurskiftini har.

Møgulig útbygging vil kunna viðføra at ymisk viðurskifti skulu takast uppaftur, herundir:
- atlit til friðing sbrt. lógini um náttúrufriðing: http://www.logir.fo/Logtingslog/48-fra-09-07-1970-um-natturufriding-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-110-fra-29
- atlit til landsvegalógina sbrt. lógini um landsvegir: http://www.logir.fo/Logtingslog/51-fra-25-07-1972-um-landsvegir-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-18-fra-8
- atlit til lógina um umhvørvisvernd: http://www.logir.fo/Logtingslog/134-fra-29-10-1988-um-umhvorvisvernd-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-128-fra-22

Í fall farið verður undir hesa tilgongd og herundir projektering er hóskandi at gera eina nærri avtalu við felagið um innihald og treytir í verkætlanini.
Samstundis er ivasamt um tað er skilagott at gera eina projektering áðrenn neyvari loyvi fyriliggja. Í sofall má eini meiri principiell tilgongd vera fyrst. Spurningurin er so eisini um tað er felagið ella kommunan sum skal standa fyri tí?

Ongin peningur avsettur til endamálið Konta 5365 - Stuðul til ítrótt rúmar ikki slíka játtan í verandi støðu.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a). at taka principiella støðu til um farast skal víðari við umsóknini
b). at taka støðu til møguliga raðfesting á fíggjarætlan 2018 ella seinni ella á eykajáttan.

**Mentamálanevndin 03. mai 2017:** Ein minniluti, Gunvør Balle og Marin Katrina Frýdal, tekur ikki støðu til tilmælini, men vil taka málið upp aftur á seinni fundi.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen, tekur undir við tilmælunum.

**Tilmæli:**
Til tess at taka málið upp aftur mæla trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin til, at umsitingin saman við felagnum nágreinar verkætlanina við Sandvíkir, bæði í mun til neyðug myndugleikakrøv og verkseting sum grundarlag fyri seinni støðutakan til projektering, útboð og fígging.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Í summar hevur umsitingin havt samskifti við Býrsumúla um málið. Mett verður at mest hóskandi er at fyrireikingarnar av verkætlanini verða í tveimum stigum. Í fyrstu atløgu at fáa ment verkætlanina fram til sonevnt skipanaruppskotsstig og við støði í tí fáa til vega dagførdar góðkenningar, áðrenn farið verður undir detailprojektering og myndugleikaverkætlan. Leysliga mett kann eitt slíkt fáast til vega fyri 150 tkr.

Í samskiftinum hevur kommunan eisini fingið avrit av góðkenningum fyri verandi skjótianlegg t.e.:
- góðkenning frá yvirfriðingarnevndini
- skjótiloyvi frá politinum
- umhvørvisgóðkenning

Viðv. viðurskifti í mun til lógina um landsvegir, so er tað samskifti ikki endaliga avklárað.

Ítøkiliga er hugsanin at gera eina samstarvsavtalu við Byrsumúla og ráðgevarafelag um menning av verkætlanini. Uppskot til avtalu kann ætlandi verða klárt til nevndarfundin í oktober. Tá tann tilgongdin er komin á mál ber til at projektera verkætlanina lidna og bjóða hana út.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at fáa heimild at gera samstarvsavtalu við Byrsumúla og ráðgevarafelag um menning av skipanaruppskoti fíggjað av rakstri kontu xxx.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Samtykt at umsitingin fer undir samskifti við Byrsumúla og aðrar áhugapartar innan skjóting fyri at kanna aðra møguliga staðseting og felags loysn við skjótibreyt. Málið verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Við støði í samtyktini í mentamálanevndini frá 29. november 2017, varð fundur fyriskipaður við Byrsumúla, Veiði- og skjótifelagið, Ark. Kommando og løgregluna, har feløgini/eindirnar vóru biðin um at greiða frá sínum virksemi og staðsetingum. Umrøtt varð, um til ber at samantvinna fleiri áhugapartar innan skjóting á einum stað.

Tørvurin hjá ymsu áhugapørtunum innan skjóting er ymiskur. Byrsumúli hevur aðrar fortreytir enn hinir partarnir, sum heilt avgjørt kundu verið saman um eina felags loysn við skjótibreyt. Millum annað hevur rætningurin og sólargangurin stóran týdning fyri Byrsumúla, meðan hesi ongan týdning hava fyri hinar partarnar. Í verandi støðu er ikki nøkur eyðsæð staðseting

eyðmerkt ella uppskot komin um framtíðar staðsetingar, har hesi feløgini/eindirnar kunnu savnast á einum stað.

Um hugt verður eftir økinum, matr. 139e, har Byrsumúli heldur til í dag, so hóskar staðsetingin avbera væl til teirra virksemi, og stuðlar økið undir fortreytunum, sum skulu til fyri at skapa góðar karmar til skjótingina hjá Byrsumúla. Tó skal hædd takast fyri, at breytirnar verða góðkendar av altjóða serfrøðingum fyri at skipa altjóða kappingar. Umframt at øll trygdarkrøv, fráleika- og fráboðanarkrøv verða lokin í mun til almenna ferðslu á landi og sigling fram við landi. Í Danmark er tað ”Politiets og Justitsministeriets skydebane inspektør”, sum tekur sær av slíkum málum.

Óljóð- og dálkingarstøðan eigur eisini verða endurskoðað aftaná seinastu umhvørvisgóðkenning, ið var í 2006. Skjótibreytir eru kap. 5 virkir, ið Umhvørvisstovan hjá landinum varðar av. Virksemið er broytt, har skotið verður sunnu- og halgidagar. Virksemið í økinum hevur aftaná 30 ár sett síni neiligu merki á annars serstaka vakra lendið í Sandvíkum.

Í dag liggur økið á markinum til útjaðaran av Havnini, og er økið náttúruvakurt við fjøru og fríum útsýni út á sjógv. Ídnaðarøkið á Hjalla er nærmasti granni og ber økið brá av nógvari ferðslu. Í nærmastu framtíð, tá tunnilin verður liðugur, fer økið at liggja mitt í einum knútapunkti, ið verður bindilið millum oyggjarnar við øktari ferðslu. Tá hugsað verður um rekreativ øki, so leita fólk vanliga burtur frá ferðslu og óljóði, tískil er í mun til býarskipanarlig viðurskifti einki til hindurs fyri, at Byrsumúli heldur fram á verandi øki. Umsitingin mælir tó til at fáa altjóða grundreglur og serkønan at meta um staðsetingina.

Byrsumúli hevur fleiri vitjandi, ið øll fáa ágóðan av hesum náttúruvakra øki, men samanborið við almenningin er talið á borgarum lítið í mun til um hetta lendið lá sum fríøki til almenningin.

Harafturat er ynski frá umsitingini, at Byrsumúli ikki ger seg inn á rættina, ið liggur tætt upp at ynskta matrikli. Rættin er áleið túsund ára gomul, men verður ikki brúkt longur orsakað av skjótivirkseminum og øðrum, hegning o.s.fr. Men rættin er tó eitt mentanar- og siðsøguligt minni, ið er vert at varðveita.

Ynski er um at atlit verða tikin til fjøru, og at farið verður væl um náttúruna sum heild, bæði í sambandi við dálking og ovurnýtslu, men náttúruvakurleikin er ikki tann sami aftaná 30 ára virksemi, økið treingir til at ruddast og hampast sum heild. Stranga eftirlitið, sum sigst vera, er ikki sjónligt.

Onnur staðseting er á Glyvursnesi, at gera skjótibreyt í grótbrotinum á Glyvursnesi ella í økinum sunnanfyri, har er vítt lendi burturfrá fjølbygdum øki. Men henda staðseting er partur av heildaruppskotinum í sambandi við gerð av golfvølli á Glyvursnesi.

Treytirnar, sambært umhvørvisgóðkenning í máli nr. 61010-200300445-36 (skjal 1), *Góðkenningartreytir frá 4. juli 2006, frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni*, eiga at dagførast, og eftirkannast, um treytirnar eru hildnar seinastu 22 árini. Virksemið er munandi broytt hesi árini, t.d. er nógv tons av stálhøglum skotin út á økið.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til, at Byrsumúli heldur fram á økinum, har teir eru í dag, at øll loyvi verða dagførd, umhvørvisgóðkenning verður framd og altjóða ásetingar til kappingar verða hildnar og at beina málið aftur í mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2018:** Nevndin mælir til at Byrsumúli heldur fram á økinum, har teir eru í dag**.**

**Ískoyti**:
Síðani fundin í Byggi- og býarskipanarnevndini er komið uppskot frá Politinum og Arktiskt kommando um staðsetingar av skjótibreyt til teirra tørv. Sí hjálagt skriv.

Á løgukonto 5775 er játtan á 1.500 tkr, ið er ætlað til fyrireikingar v.m. í sambandi við ymiskar verkætlanir innan ítróttaanlegg, herundir skjóting. Kontan er ikki fult disponerað enn.

Mál um endurnýggjan av leigusáttmála við Byrsumúla um økið verður lagt fyri fíggjarnevndina í næstum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at geva umsitingini heimild til at gera uppskot til samstarvsavtalu við Byrsumúla og ráðgevarafelag um menning av skipanaruppskoti og koma aftur í nevnd við einum uppskoti.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Sambært umbøn frá nevndini, kemur umboð fyri nevndina í Byrsumúla á fundin at greiða frá um virksemi og um útbyggingarætlanir felagsins.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Umboð fyri nevndina í Byrsumúla greiddi frá virkseminum og um útbyggingarætlanir felagsins.

**Ískoyti:**
Nýggjur 25 ára leigusáttmálið verður ætlandi undirskrivaður. Sí skjal 15/03761-32.

Avtalað er, at kommunan letur gera seyðasmogu, og annars letur tilfarð til hegn og pelar v.m. leystliga mettur kostnaður í alt kr. 87.000,00 Upphæddin verður at rindað av konto 6275 ( vetrarfriðing ) Sí útrokning skjal 15/03761-42

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni mæla til at gera nýggjan 25 ára leigusáttmála við leigaran, sí skjal 15/03761-32, og at rinda gerð av seyðasmogu umframt tilfarð til hegn,pelar v.m. áleið kr. 87.000,00 av konto 6275 ( Vetrarfriðing )

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í økinum í Sandvíkum eru atlit at taka til umhvørvi, frítíðarvirksemi, seyðahald o.a. Felagið hevur í dag nógv stríð av upprudding sambært galdandi umhvørvisgóðkenning. Sum liður í at menna verkætlanina og tryggja neyðug atlit, verður mett hóskandi saman við felagnum at fáa landslagsarkitekt at gera uppskot um skipan av øki og lendi. Mett verður neyðugt at seta kr. 100.000 av til endamálið av játtan ætla til smærri ítróttarverkætlanir, sí mál 18/03320.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við ætlanini og vísa til mál 18/03320 viðvikjandi játtan.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og tryggja, at atlit verða tikin til umhvørvið, fjøruna, gomlu ættina og møguleikan fyri almennum uppihaldi.

**Ískoyti:**
Uppskot um skipan av øki og lendi er nú tókt, sí hjáløgdu fílu, umframt at limirnir fáa handaða mappu á fundinum.

Málið kemur fyri í nevnd 13. februar 2019.

**Mentamálanevndin og byggi- og býarskipanarnevndin 16. januar 2019:** Limirnir fingu handað tilfar.

**Ískoyti:**
**Samandráttur av skipanaruppskotinum**
Skipanaruppskotið fevnir um uppskot til nýtt skjótianlegg í Sandvíkum hjá Veiðufelagnum Byrsumúli. Tað hevur verið týdningarmikið í sambandi við gerð av skipanaruppskotinum, at anleggið (skjótibreytin við tilhoyrandi viðurskiftum) hóskar inn í lendið og náttúruna kring økið. Harumframt hevur tað verið týdningarmikið, at nýggja anleggið er vakurt á at líta, er vælvirkandi og nútímans við fleiri virkismøguleikum og skjótibreytum.

Tað sum eyðmerkir uppskotið er, at serlig atlit eru tikið fyri uppruddingar arbeiðinum í sambandi við skjóting. Breytirnar vera fluttar longur frá fjøruni, lendið verður drenað og slættað so gjørligt verður at skipa ruddingina betur.

Ein vallgarður er teknaður at liggja á markinum millum anleggið og fjøruna, hann skal forða splintrum frá leirdúgvunum í at enda í fjøruni. Somuleiðis skal vallgarðurin tryggja, at tað framvegis verður atkomuligt hjá almenninginum til fjøruna. Men upplýsast skal, at tá anleggið er í brúk, tá verður ikki møguligt at nýta fjøruna til uppihald.

Anleggið skal vera fyri øll, tí eru atkomuviðurskiftini fyri rørslutarnað raðfest høgt. Hetta verður gjørt við at ein gøta kemur at leggja seg gjøgnum lendið og virka sum bindiligur millum felagshúsið við yvirdekkaðum hátúni, áskoðaraskýlið og skjótistøðini.

Í dag hevur Byrsumúli eitt felagshús, sum er gjørt av tveimum bingjum, men í skipanaruppskotinum er lagt upp til, at eitt felagshús verður gjørt við øllum hentleikum, so sum hølum/umstøðum til innivist, smærri móttøkur, veitslur, vesir o.a. hugsanin er, at sjálvt felagshúsið er uppbygt sera einkult, bygningsgrindin verður gjørd í pørtum, ið skjótt kunnu setast upp.

Yvirhøvur er tilfarsvalið sera einkult við timbri og flagtekju, sum hóskar væl til umhvørvið og náttúruna.

Vallgarðurin og ymisk skot á gøtuni vera prýdd við stórum gróti og vøkstri, ið somuleiðis hóskar væl til lendið og umhvørvið.

Aftrat hesum kemur ein eyrvegur at liggja aftanfyri anleggið, ið skal nýtast í sambandi við rakstur. Hesin skal flætta natúrliga inn í umhvørvið. Framvið eyrvegnum verður grót og runnar, hjálpirót og onnur planta, ið hóskar til umhvørvið.

**Góðkenning til altjóða kappingar:**
Fyrispurningar hava verið um viðurskiftini viðvíkjandi góðkenning til altjóða kappingar. Veiðifelagið Byrsumúli hevur greitt frá hesum viðurskiftunum í skrivið til kommuna,
*sí skjal Svar vidvíkjandi krøvum til skjótibreytir.*

Fyrst er at viðmerkja, at eingin altjóða felagsskapur góðkennir nakra skjótibreyt yvirhøvur, hvørki her ella aðra staðni. Góðkenningarnar koma frá lokalum myndugleikum í mun til teirra lógarkrøv um trygd og umhvørvi v.m., meðan ítróttarligu reglurnar um kappingarnar eru ásettar av ISSF.

<u>Ítróttarlig krøv</u>: Ásetingar fyri mát/stødd á breyt, longd/ferð og vinklar, hvussu dúgvurnar skulu flúgva o.s.fr. eru at finna í kappingarreglunum frá ISSF. Sí skjal *ISSF reglur um skjótibreytir.* Skipanaruppskotið er í tráð við hesar ásetingarnar. Harumframt vendir økið rætt í mun til ljósviðurskiftini, sum ISSF mælir til, og veðurlagið á staðnum er tað besta, sum felagið kann ynskja sær.

Tað er kappingarleiðslan til einstøku kappingina, sum góðkennir ''breytina'', og tað snýr seg um, hvørt kastimaskinurnar eru innstillaðar rætt í mun til ítróttargreinina, til dømis OL-trap og OL-skeet.

Tá tað kemur til umstøðurnar rundan um breytina; felagshús, vesir o.a. er ikki talan um ítróttarlig krøv, tó sum liður í verkætlanin skulu hesi viðurskiftir; felagshús, vesir o.a. vera á nøktandi støði eftir BK17. Harumframt er tað ynski hjá kommununi, at nøktandi athølir/umstøður eru funktionel til virksemið.

<u>Trygdarkrøv</u>: Tað er løgreglan, sum góðkennir trygdina, her er talan um trygdarfrástøðu og hvønn veg skotið verður. Verandi breyt er góðkend, og skal nýggja breytin somuleiðis góðkennast, tá hendan er liðug.

<u>Umhvørviskrøv</u>: Umhvørvisstovan umsitur Umhvørvisgóðkenningina fyri virksemið á breytini. Somuleiðis er verandi breyt góðkend. Skipanaruppskotið leggur upp til, at virksemið tekur enn størri hædd fyri umhvørvinum.

Nevnast skal at Veiðifelagið Byrsumúli hevur sett seg í samband við Danmarks Jægerforbund. Og fingið tey at meta um skipanaruppskortið viðvíkjandi góðkenning til altjóða kappingar. Danmarks Jægerforbund er av tí fatan, at nýggja skjótibreytin lkur allar treytir, ið eru galdandi til kappingar í OL-trap og OL-skeet. Sí skjal *190204 DJ skrivelse/MLMAL.*

Umsitingin hevur sett seg í samband við Skjótisamband Føroya við fyrispurning um viðurskiftini viðvíkjandi góðkenning til altjóða kappingar. Skjótisamband Føroya hevur kanna skipanaruppskoti og greitt frá í skrivið til kommuna, sí skjal *Svar til Tórshavnar kommunu.*

Sagt verður at uppskotið um nýggja breyt lýkur allar treytir til heimligar kappingar eins væl og hon lýkur treytirnar til einar komandi oyggjaleikir. Breytin kemur sjalvsagt ongantíð at rúma heimmeistarakappingar ella Olympisku leikunum, men við einari OL-trap breyt og tveimum OL-skeet breytum, kunnu flest allar aljtóða og millumtjóðakappingar um okkara leiðir haldast her.

Verður hugt at møguligum framtíðarkrøvum til kappingar, so bendir einki á at møgulig broyting í reglunum fyri kappingargreinarnar skuldi viðført, at broytingar skulu gerast á sjálva breytina, so hon ikki kann nýtast longur. Áður, tá ið broytingar hava verið so hevur tað snúð seg um ferð og vinklar á dúgvunum viðvikjandi kastimaskinunum og ikki sjálvari breytini.

Í sambandi við oyggjaleikir so við breytin kunna rúma, OL.trap, Automatic Ball Trap og OL-skeet, eins væl og ovara skeet breytin í uppskotinum kann brúkast til Compak-Sporting-breyt. Til tað síðst krevst tó, at fleiri kastimaskinur verða settar upp, men hetta rúmar breytin væl.

Sjótisamband Føroya metir tí, at uppskotið uppá nýggja breyt vil tryggja skjótiítróttin í Føroyum í mong ár.

**Átøk í verkætlanini:**
Skipanaruppskotið leggur upp til, at anleggið kann skipast í pørtum. Ynskiligt hjá felagnum er, at skjótibreytirnar verða gjørdar sum tað fyrsta, soleiðis at uppruddingin gerst meiri lagalig. Síðani skulu vollarnir gerast, umframt gøtur og felagshús.

**Víðari fyrireikingar**
Í sambandi við viðgerð í mentamálanevndini kemur umsitingin at gera ítøkiligt tilmæli um, hvussu farast kann fram í mun til møguliga víðari fyrireikingar, herundir projektering, samstarvið við felagið, kostnaðarmetingar, fígging v.m.

**Skjøl:**
*- Journal nr. 15-03761-55 BYRSUMÚLI SKIPANARUPPSKOT DES.2018*
*- Journal nr. 15-03761-58 Svar vidvíkjandi krøvum til skjótibreytir*
*- Journal nr. 15-03761-58 ISSF reglur um skjótibreytir*
*- Journal nr. 15-03761-60 190204 DJ skrivelse/MLMAL*
*- Journal nr. 15/03761-61 Svar til Tórshavnar kommunu*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla byggi- og býarskipanarnevndini til, at skipanaruppskotið verður samtykt sum ætlan fyri økið/virksemið, at øll loyvi og myndugleikakrøv verða dagførd, nú skjótibreytin verður endurnýggjað, og at beina málið í mentamálanevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina, teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Við støði í skipanaruppskotinum er nú klárt at fyrireika verkætlanina víðari saman við Veiðifelagnum Byrsumúla. Fyrsta stig er at fáa í lag avtalu við ráðgevarafelag um projektering av lendisarbeiðinum.

Til ber at projektera verkætlanina í einum ella í stigum, har sjálvt lendisarbeiðið eisini tekur atlit til, at felagið kann halda fram við venjingum í arbeiðstíðarskeiðnum. Á fundinum verður greitt frá viðurskiftum kring kostnað vm. í sambandi við projektering av slíkum anleggi/lendi og bygningum.

Mett verður hóskandi at seta av 300 tkr. í fyrstu atløgu til víðari tilgongdina. Sí tilmæli í máli 19/00144 Játtan í 2019 til smærri ítróttaanlegg.

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja, at farið verður í tilgongd at bjóða út ráðgeving um projektering av skjótibreytini at leggja aftur fyri nevndina.

**Tekniska nevnd 12. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina 13. februar 2019.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019:** Samtykt at gera samstarvsavtalu við Veiðifelagið Byrsumúla um víðarimenning av verkætlanini og at bjóða út ráðgeving um projektering av skjótibreytini, at leggja aftur fyri nevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at samstarvsavtalan eisini umfatar regluliga rudding.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur verið í innleiðandi samráðingum við Veiðifelagið Byrsumúla um samstarvsaavtalu.

Umsitingin hevur eisini mett um, hvør leistur er tann frægasti í mun til at fáa projektera og útint verkætlanina. Mett verður at mest átroðkandi er at fáa drenað skjótiøkið og fáa gjørt vøllgarðarnar. Í fyrsta lagi tí at tað verður tað sum gerð mest mun at vera framt fyrst og í øðrum lagi at avmarkað kostnaðin til hetta fyrsta verkætlanarstigið.

Viðv. framferðarhátti kann veljast millum:

a). Projektera verkætlanina og síðani fara í útboð
Fyrimunurin er at ymsar møguligar óvissur vera færri og tað fæst eitt gott tilfar til grund fyri útboðnum av lendisarbeiðinum.

b). Bjóða arbeiðið út sum eina heildararbeiðstøku
Høvuðsfyrimunurin er at arbeiðið helst verður lættari at laga til og innan fyri ásettan kostnaðarrammu. Tó er neyðugt við nakað av nøgdarmetinginum áðrenn farið verður undir útboð so tað er nøkulunda greitt hvørjar nøgdir talan er um so skulu flytast, herundir gera nakrar kanningar viðv. dýpinum av tilfari í økinum. Hetta er mett til nakrar 10 tkr. og kann dekkast av kontu 5365 Stuðul til løgur.

Kostnaðarmeting
Í verandi støðu er ikki nøkur dagført kostnaðarmeting. Talan er um verkætlan, ið helst kostar fleiri mio.kr. Felagið bjóðar seg fram til at gera arbeiðir við bygningar, pallar o.a. meðan lendisarbeiðið sum heild krevur arbeiðstakara við røttu amboðunum og royndunum.

Fígging
Byrsumúli hevur ikki nakra fíggjarogn av týdningi og sum munar í hesum føri. Kommunan hevur ikki tøka fígging til verkætlanina í ár og tí má støða takast til um fígging skal setast av í løguætlanini fyri 2020 ella 2021.

Felagið bjóðar seg hinvegin at gera sjálvboðið arbeiðið innan onnur viðurskifti enn grót og moldarbeiðið og kann tað so innganga sum egininnsatsur.

Skotið verður upp at felagið og TK í næstum fara undir fyrireikingar til at søkja uttanhýsis stuðul til verkætlanina ella partar av henni.

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til:

a). Um verkætlanin í fyrsta umfarið verður avmarkað til at drena skjótiøkið og gera vøllgarðar.

b). Um antin at projektera verkætlanina og síðani fara í útboð ella at bjóða arbeiðið út sum heildararbeiðstøku.

c). Við støði í valinum av pkt. a og b. at fara undir endaligar samráðingar um eina samstarvsavtalu at leggja fyri nevndina aftur.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Samtykt ikki at taka undir við tilmælinum. Nevndin staðfestir, at játtan ikki er tøk í ár og at málið verður tikið upp í sambandi við fíggjarætlanar-arbeiðið og langtíðarløguætlanina.

**Ískoyti:**
Við atliti til at fáa betri grundarlag fyri møguligari verkætlan og útbjóðing verður mett hóskandi at fáa gjørt ymiskar fyrireikingar, herundir:

Við støði í skipanaruppskotinum at:
1. Søkja um loyvi hjá friðingarmyndugleikunum til verkætlanina
2. Søkja um nýggja umhvørvisgóðkenning

Umframt:
3. Fáa gjørt lendis- og jørðkanningar, uppmátingar og avseting av verkætlanarøkinum fyri m.a. at fáa metingar um nøgdir av tilfari, ið skal flytast og útvegast og herundir kostnaðarmeting.
4. Fáa gjørt samstarvsavtalu við Byrsumúla um verkætlanina, herundir egininnsatsin hjá Byrsumúla og ætlan um at søkja um uttanhýsis fígging.

Fyribils verður mett, at pkt. 3 kostar 100 tkr. Mett verður at fígging til endamálið kann útvegast av upphæddini, ið var játtað til konto 5717 Ítróttaanlegg til fyribils bingjuloysn við Hoyvíksvøll (mál 18/00009), ein verkætlanin, ið ikki er útlit fyri at útinna í ár. Ætlanin er at fáa ráðgeva til kanningarnar.

Tíðarætlan:
Mett verður, at tilgongdin viðv. pkt. 1-4 tekur nakrar mánaðir og at eitt útboð helst kann vera í 2020, treytað av neyðugum loyvum og fígging.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at fáa til vega uppskot til ráðgevaraavtalu um fyrireikingar til at bjóða út arbeiðstøku uppá drening, planering og gerð av vøllgarðum til nýggja skjótibreyt, herundir neyðug loyvi.

**Mentamálanevndin 22. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Jákup Dam var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Eftir viðgerðina seinast er fíggjarætlanin fyri 2020 samtykt, umframt at tað í langtíðaríløguætlanini er lagt upp til fígging til skjótibreyt hjá Byrsumúla í 2021 og 2022.

Á løgukontu 5775 eru fyri fíggjarárið 2020 játtaðar 3.000 tkr. til skjótibreyt, t.e. játtanin skal brúkast til at byggja skjótibreyt, herímillum drening og vøllgarðar at verja fjøruna, umframt ætlaðar 4.000 tkr. til 2021 og 1.000 tkr. til 2022.

Við hesum ber sannlíkt til at fara undir at fyrireika og byggja nýggja skjótibreyt í Sandvíkum, ið nýtast kann til venjing, frálæru og altjóða kappingar.

Ætlanin er at gera avtalu við felagið, ið gjørdi skitsuprojektið at standa fyri liðugt projektering og útboðnum av verkætlanini.

Tilgongdin við at fáa neyðug loyvi til vega og tekur væntandi nakrar mánaðir.

Málið er at arbeiðið kann vera klárt at bjóða út í vár, tá neyðug loyvi væntandi eru fingin til vega, og fara undir útinning í summar. Byggiarbeiðið í lendinum væntast at ganga inn í 2021.

Forkanningar viðv. lendinum byrja í næstum og er dialogur í gongd við felagið um samstarvsavtalu. Ætlandi verða úrslitini av forkanningunum, uppskot til samstarvsavtalu og ráðgevaraavtala klár til fundin í nevndini 11. mars 2020.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at heimila umsitingini at fara undir samráðingar um ráðgevaraavtalu.
b). at flyta 3.000 tkr av løgukarminum konta 5775 á nýggja projektkontu.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 05. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. februar 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

# 36/20 Virknishøll í Finsen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 107/17 | 17/01362-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 174/17 | 17/01362-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 5/18 | 17/01362-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 357/18 | 17/01362-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 352/18 | 17/01362-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 5/19 | 17/01362-1 |
| 7 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 313/18 | 17/01362-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 84/19 | 17/01362-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 03.04.2019 | 117/19 | 17/01362-1 |
| 10 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 150/19 | 17/01362-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 07.06.2019 | 186/19 | 17/01362-1 |
| 12 Mentamálanevndin | 17.06.2019 | 207/19 | 17/01362-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 192/19 | 17/01362-1 |
| 14 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 140/19 | 17/01362-1 |
| 15 Býráðsfundur | 04.07.2019 | 173/19 | 17/01362-1 |
| 16 Mentamálanevndin | 27.11.2019 | 318/19 | 17/01362-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 15.01.2020 | 4/20 | 17/01362-1 |
| 18 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 44/20 | 17/01362-1 |
| 19 Fíggjarnevndin | 12.02.2020 | 40/20 | 17/01362-1 |
| 20 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 36/20 | 17/01362-1 |

**Málslýsing:**
Í samgonguskjalinum er m.a. ásett: "**Framsøknan ítróttarpolitikk -** Ítróttur og rørsla hava stóran týdning fyri trivnaðin í kommununi. Møguleikarnir fyri ítrótti verða áhaldandi útbygdir bæði fyri breiddina og úrvalsítrótt."

Nú Finsen í næstum verður liðugt, er hugsan frammi um at lata niðaru fimleikahøllina í Finsen (fyrrv. kommunuskúlanum) til virknis- rørsluendamál. Sí hjálagdar myndir og tekning av hølunum.

Høllin er partur av høvuðsumvælingin av Finsen til lestrarbústaðir hvat viðvíkur útveggum, vindeygum og taki, men er annars ogn hjá kommununi. Høllin fær hita frá Finsen. Samráðingar eru í gongd við Bústaðir um bygningsviðlíkahald uttan, hita o.a.

Skotið verður upp at høllin verður í dagtíð tøk hjá skúlanum og frítíðarskúlanum hjá Eindini í Kongagøtu hjá Skúlanum á Fløtum og frítíðarskúlanum í Sankta Frans skúla, umframt dagstovnum í økinum. Høllin kundi eisini í dag verið tøk hjá eldraøkinum at brúkt til virknistiltøk hjá Heilsuhúsinum. Eftir uml. kl. 16 ella 17 kundi høllin verið tøk at leiga hjá borgarum, fyritøkum o.s.fr., ímóti gjaldi at kunna brúka høllina til alskyns spæl, ítrótt, rørslu o.a., t.d. til fótbólt, kurvabólt, flogbólt, fimleik og aðra likamsvenjing.

Í sunnara enda av høllini er eitt goymslurúm, sum kann rúma ymiskum reiðskapi, tólum o.ø. Í norðara enda eru eisini rúm. Høllin kemur at vera hædd um hædd við virksemi á ovaru hæddini og er málið at hesi kunna og megna at virka lið um lið.

Sbrt. núverandi praksis vildu skúlarnir og frítíðarskúlarnir ikki rindað fyri nýtslu, meðan aðrir brúkarabólkar/eindir vera at rinda ásett tímagjald sbrt. galdandi gjaldsskrá hjá Ítróttaanleggum. Bílegging v.m. vildi farið fram á www.hallirvallir.fo. Hugsanin er at høllin sum útgangsstøði ikki verður disponerað til fast virksemi hjá t.d. hondbólts-, flogbólts- og fimleikafeløgunum.

Samskift hevur verið við teknisku fyrisiting/Húsaumsitingina um standin av hølunum v.m. Ætlanin er at halda fram við greiningunum og fáa endaliga avkláring í mai 2017. Sannlíkt er at ávísir kostnaðir eru av at fáa høllina brúkiliga.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða nærri frá fyribils metingum viðv. uppstartskostnaðum og rakstri av hølunum, umframt WC-bygninginum, ið er partur av hallunum. Málið er at raksturin í stóran mun kann verða fíggjaður av leiguinntøkum frá brúkarum.

Henda verkætlan vil innibera at verkætlanin um innandura spæliland í hallunum í Finsen (mál 16/02253) verður slept í hesum umfari.

Við hesi verkætlan ber til at fáa eitt viðkomandi virknishøli miðskeiðis í býnum, tøk til grannalagi, tey lesandi í Finsen, býin sum heild og soleiðis eitt nú stuðla undir visjónina um tann virkna og vakna høvuðsstaðin.

Um neyðugu fyritreytirnar eru til staðar er sannlíkt, at høllin kundi latið upp í heyst.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini at viðgera og samtykkja, um farast skal víðari við fyrireiking av verkætlan um virknishøll í Finsen

**Mentamálanevndin 03. mai 2017:** Samtykt at farast skal víðari við fyrireiking av verkætlanini. Nevndin mælir til at kanna í hvønn mun til ber at hava atgongd til frítt spæl ávísa tíð í vikuni.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mikudagin.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Útsett.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við ráðgeva fyrireika arbeiðsætlan og kostnaðarætlan fyri virknishøllina. Sí hjálagt kostnaðarmeting, umframt skitsur. Talan er um metingar, ið skulu takast við ávísum fyrivarni. Eisini hevur verið samskift við Byggi- og umhvørvisdeildina viðv. fyritreytum og krøvum um í mun reglurnar í byggikunngerðini fyri Føroyar.

Samanlagt er samlaða metingin fyri hondverkaraútreiðslur (HVÚ) 1.458 tkr., umframt ráðgeving (ca. 6% av HVÚ) og ókent (ca. 15% av HVÚ) og MVG (6,25% av øllum postum). Hugsanin er at starvsfólk hjá Ítróttaanleggum kunnu gera nakað av arbeiðinum og sostatt spara nakað í metingini, umframt at møguliga eru einstakir postar sum kunnu takast út.

Málið hongur lutvíst saman við máli 16/03404, ið eisini er á skrá á fundinum og har tilmæli er at flyta uml. 941 tkr. frá aðrari verkætlan til hesa. Tískil vantar nakað av fígging til at kunna fremja verkætlanina.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at viðgera metingina við atliti til at umsitingin kemur við endaligum tilmæli um verkætlanina og fíggingina til komandi fund.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Sbrt. avtaluni við Bústaðir um Finsen skal TK taka sær av lonini har hallirnar eru.

Tilmæli um hallirnar er enn í gerð og er væntandi til komandi fund, bæði viðv. virknishøll og listaverkstøðum.

Samstundis rykkir Bústaðir eftir, at ljós kemur í serliga skrellirúmið, vesirúmið og almenna garðin og metir hetta ikki kann bíða. Eisini er støðan at hallirnar standa kaldar og eru ikki íbudnar hita í verandi støðu. Í áður gjørdari meting, er HVS -(útskifta radioatorar, montering o.a). arbeiðið mett til 50 tkr.

Íbinding hjá SEV, talva, montering, o.a. er mett til 94 tkr. til samans. Við tí fæst ljós í bygningin, skrellirúmið, vesirúmið og almenna garðin. Afturat upphæddunum skal roknast umleið 10% til eftirlit o.a., 10% til ókent, umframt kommunalt MVG. Tilsamans mett til 182 tkr. Húsaumsitingin og verkætlanardeildin samstarva um verkætlanina og at fáa arbeiðstakarar at útinna arbeiðið.

Á framflutta løgukarminum L00002 eru 1.051 tkr. tøkar til verkætlanina í hallunum í Finsen.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á verkætlanardeildini, deildarleiðarin á Húsaumsitingini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fremja el&hvs arbeiði í Finsen og at flyta 1.051 tkr. á nýggja løgukontu til hallirnar í Finsen. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtyk at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Vísandi til mál 17/01362 Listaverkstøð í Finsen er aftur aktuelt at viðgera ætlanina um virknishøll í niðaru høllini í Finsen.

Fleiri fyrispurningar hava verið um innandura spæliland í Finsen, sum mentamálanevndin 11. apríl 2018 eisini viðgjørdi. Mett verður framvegis, at tær ætlanirnar ikki eru hóskandi til givnu karmarnar. Hinvegin kundi verið áhugavert at latið uttanhýsis veitara staðið fyri at gjørt nakrar royndir við tilboði um spæl og leik útvaldar dagar, men har uppsetingin er meiri avmarkað og letur seg samanseta við, at høllin annars eisini virkar sum virknishøll fyri skúla, frítíðarskúla og borgarar annars.

Til verkætlanirnar í hallunum í Finsen eru pt. tøkar: 1.051 tkr. Hetta røkkur neyvan til verkætlanirnar og verður helst neyðugt við eyka fígging til endamálið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:

a). at heimila umsitingini at fara undir útboð av umvælingararbeiðinum av niðaru høllini.

b). at heimila umsitingini at fara undir at gera útbjóðingartilfar til at reka virksemi við spæli og leiki í niðaru høllini í Finsen aftrat almennari nýtslu sum lýst omanfyri.

**Mentamálanevndin 16. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
**Viðv. útboði av umvælingararbeiðinum**
Tilgongdin er ávegis og væntast klár til næsta fund.

**Viðv. gerð av útboðstilfari til at reka virksemi við spæli og leiki í niðaru høllini**
Sí hjálagt uppskot til lýsing og rakstraravtalu til eina royndarverkætlan.
Á fundinum verða uppskotini gjøgnumgingin.

Hugsanin er at fara undir eina tilgongd, har áhugaði kunnu senda inn uppskot til konsept og virksemi og út frá tí verða 2-3 vald út til eitt endaumfar til at fáa møguliga avtalu við kommununa. Í hesum konseptinum liggur, at TK útvegar nærri tilskilað leikur, amboð v.m.

Ráðgeving frá fakpersóni til fyrireikingarnar
Hugsanin er at gera avtalu við ein fakpersón við vitan innan rørslu, børn og tøkni/innrætting til at ráðgeva TK viðv. málinum og at gera undankanningar viðv. hvat kundi verið hóskandi at fingið til vega. Hetta verður gjørt innan raksturin á kontu 1312 trivnaðarfyrisitingin.

Til komandi fund er ætlanin at hava eina nærri meting um væntaðan kostnað av tilboðnum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotið til royndarverkætlan við atliti til at umsitingin kemur við endaligum tilmæli um útbjóðing til komandi fund.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019:** Umrøtt. Samtykt at umsitingini arbeiðir víðari við málinum.

**Ískoyti**
Útboðstilfarið uppá høvuðsarbeiðstøkuna viðv. umvæling av niðaru høllini (og ovaru) fór út í farnu viku til tvey byggifeløg. Tilmæli um val av veitara verður ætlandi klárt til fundin 8. mai 2019.

Á fundinum í mentamálanevndini verður kostnaðarmeting løgd fram. Á kontu L57030 eru tøkar umleið 900 tkr., sum mett verður ikki røkkur til alt arbeiðið.

**Tilmæli**
Kunnað verður um málið.

**Mentamálanevndin 03. apríl 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**
Umsitingin kunnar um innkomnu tilboðini.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við ráðgeva gjørt liðugt projekt fyri verkætlanina í niðaru høllini og ovaru høllini (sí eisini mál 17/01361 listaverkstøð í Finsen – samtykt 13. januar 2019).

Ráðgevin hevur síðani heintað inn undirhondstilboð frá Sp/f ÁTS og Sp/f JJ Byggitænastan. Sí hjálagt skjal við neyvari upplýsingum um tilboðsupphæddir og viðurskiftini annars.

Ráðgevin hevur síðani eftirkannað tilboðini og samskift við tilboðsgevararnar og mælir til at gera arbeiðstøkusáttmála við Sp/f JJ Byggitænastuna.

Av tí at útlit ikki eru fyri fígging í hesum umfari til bæði ovaru og niðaru høllirnar, verður mett best at gera sáttmála um niðaru høllina fyrst og at málið um ovaru høllina verður tikið uppaftur í sambandi við fíggjarætlanina fyri 2020 og langtíðarløguætlanina.

Sí hjálagt uppskot til arbeiðstøkusáttmála fyri niðaru høllina á tkr. 1.960.479.

Hartil koma koma útreiðslur til reinsing av veggum við turrísi, ráðgeving&eftirlit, ókent og kommunalt MVG mett til tils. 627 tkr.

Samanlagt eru útreiðslurnar mettar til 2.588 tkr.

Á projektkontu L57030 Hallirnar í Finsen eru tøkar umleið 900 tkr. tá fråroknað útreiðslur til el-íbinding o.a., ið var samtykt í fjør. Tískil er fíggjartørvurin til at gera niðaru høllina umleið 1.687 tkr. Í máli 18/02446 Ljósviðurskifti við Tórsbreyt verður mælt til at flyta 400 tkr. av projektkontu L57029 Smærri ítróttaanlegg til projektkontu L57030 Hallirnar í Finsen. Til resttørvin á 1.287 tkr. verður mælt til at flyta ta upphæddina av løgukontu 6175 Umsiting og rakstur av fastari ogn (íløgur).

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at gera arbeiðstøkusáttmála við Sp/f JJ Byggitænastuna á tkr. 1.960.479 um umvælingar av niðaru høllini í Finsen og útinna verkætlanina innan ein samlaðan kostnaðarkarm á 2.577 tkr.

b). at samtykkja at heita á fíggjarnevndina um at samtykkja at flyta 1.287 tkr. av løgukontu 6275 Fríðkan av kommununi (íløgur) til projektkontu L57030 Hallirnar í Finsen.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 07. juni 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við ráðgeva gjørt liðugt projekt fyri verkætlanina í niðaru høllini (virknishøll) og ovaru høllini (mál 17/01361 Listaverkstøð í Finsen).

Ráðgevin hevur síðani heintað inn undirhondstilboð frá Sp/f ÁTS og Sp/f JJ Byggitænastan. Sí hjálagt skjal við neyvari upplýsingum um tilboðsupphæddir og viðurskiftini annars.

Ráðgevin hevur síðani eftirkannað tilboðini og samskift við tilboðsgevararnar um tilboðini og mælir til at gera arbeiðstøkusáttmála við Sp/f ÁTS, um báðar hallirnar á 2.781.823 kr.

Hartil koma útreiðslur til reinsing av veggjum við turrísi, ráðgeving&eftirlit, ókent og kommunalt MVG mett til tils. kr. 897.000.

Samanlagt eru útreiðslurnar mettar til kr. 3.700.000.

Á løgukontu L57030 Hallirnar í Finsen eru tøkar umleið kr. 900.000 tá fråroknað útreiðslur til el-íbinding o.a., ið var samtykt í fjør. Restfíggjartørvur er sostatt kr. 2.800.000, ið kann fáast til vega við at flyta kr. 400.000 av løgukontu 57029 smærri ítróttaranlegg ætlað betran av ljósviðurskiftum á Tórsbreyt, og kr. 2.400.000 av løgukontu 6175 Umsiting og rakstur av fastari ogn til løgukontu L57030 Hallirnar í Finsen.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at gera arbeiðstøkusáttmála við Sp/f ÁTS á 2.781.823 um umvælingar av hallunum í Finsen og útinna verkætlanina innan ein samlaðan kostnaðarkarm uppá kr. 3.700.000,

b). at samtykkja at heita á fíggjarnevndina um at flyta kr. 400.000 av løgukontu 57029 smærri ítróttaranlegg og kr. 2.400.000 av løgukontu 6175 Umsiting og rakstur av fastari ogn til løgukontu L57030 Hallirnar í Finsen.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 17. juni 2019:** Ein meiriluti Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti Halla Samuelsen og Bjørghild Djurhuus atkvøða blankt.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Ein meiriluti, annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í Mentalamálanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur ikki undir við málinum og mælir til at halda fast við upprunaligu ætlanina at brúka báðar hallirnar til innandura spælipláss.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bogi Andreasen, og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

Minnilutin viðmerkir, at hann ikki tekur undir við málinum og vísir ístaðin til uppruna ætlanina um at brúka hallirnar til innandura spælipláss.

**Býráðsfundur 04. juli 2019:** Samtykt við aðru viðgerð við 7 atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jógvan Arge, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

Minnilutin viðmerkir eisini við aðru viðgerð, at hann ikki tekur undir við málinum og vísir í staðin til uppruna viðgerðina.

**Ískoyti**:
Arbeiðið við at umvæla ovaru høllina í Finsen gongur sína gongd og verður ætlandi liðugt í mars 2020.

Nevndin samtykki 13. mars 2019 at umsitingin skuldi arbeiða víðari við gerð av útboðstilfari til at reka virksemi við spæli og leiki í niðaru høllini í Finsen sum eina royndarverkætlan.

Komandi víðkaða dagstovnavirksemi í økinum fer ætlandi at útvega nakað av amboðum og útgerð, ið verða tøk í hølunum, umframt at Margarinfabrikkin eisini kemur at hava ávíst ungdómsvirksemi har. Tískil verður mett hóskandi at fara undir útboðið og vita hvat kemur inn av hugskotum og ætlanum. Sí hjálagt útboðstilfar v.m.

Helst verður neyðugt at útvega ávíst amboð og útgerð afturat – fyribils mett til eini 100 tkr., ið verður fíggjað av konto 5363 Stuðul til ítrótt í 2020. Somuleiðis er ætlanin at royndarverkætlan við spælitilboði verður fíggjað av somu konto.

<u>Býtið av tíðunum í høllini</u>
Hugsanin er at tíðirnar verða luttaðar soleiðis at rúm verður fyri fjølbroyttum virksemi, bæði vanliga borgaranum, eldraøkinum, ungdómsvirksemi og spælilandi, herundir spæliland serliga leygardagar, sunnudagar og aðrar frídagar.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at fara undir útboð av at reka spælitilboð í Virknishøllini í Finsen og at venda aftur til nevndina við einum tilmæli um royndarverkætlan og samstarvsfelaga.

**Mentamálanevndin 27. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Freistin at boða frá áhuga at veita spælitilboð í Finsen var úti 13. januar 2020, og 7 fólk/feløg hava víst áhuga, sí nærri i mál nr. 19/04952 útboð um spælitilboð í Finsen.
Tey, sum hava víst áhuga, eru:
Gunnhild Alstrup, Hans Korsgaard / Innspark, Sigfríður á Plógv / Tatanka, Kirstin, Esbern á Geilini, Andreas Winkler og Unn Thomsen.

Tað eru ikki øll av teimum innkomnu tilboðunum, ið eru so ítøkilig, her er ein stuttur samandráttur:
<u>Hans Korsgaard / Innspark</u> ger t.d. greitt í síni fráboðan, at hann kann vera partur av samstarvi sum veitari av útgerð o.a., men kann ikki taka sær av at reka tilboðið. Tilboðið er tískil ikki relevant at arbeiða víðari við í hesum umfari.

<u>Sigfríður á Plógv / Tatanka</u> hava í 20 ár arbeitt innan hettar økið og hava eitt lítið innanduraspæliland á Tórsgøtu 11, men tað hølið er ov lítið. Tatanka hevur alla útgerðina sum skal til longu nú, tvs. tað hevði ikki verið neyðugt at keypa serliga nógv afturat.

<u>Esbern á Geilini / Tabletop Føroyar</u> hevur uppskot um at gera hølini í Finsen til karmar fyri borðspølum. Fyri m.a. at tryggja borðspælarum eitt høli, geva nýggjum spælarum ein pall at royna seg á og fáa miðsavna teir vítt spjaddu bólkarnar, ið longu spæla borðspøl. Alt hetta birtir undir ta uppgongdina, sum er í borðspølum í Føroyum. Tilboðið skal vera til yngri sum eldri, roynd sum óroynd, og skal vísa ta gleðina og góðu samveruna borðspøl kunnu geva. Málbólkurin er 12 ár og eldri. Afturvendandi tiltøk verða hildin til familjur við børnum millum 6-12 ár. Hetta er samstundis eitt tilboð til rørslutarnað. Borðspøl eru so mikið fjølbroytt, at tey væl kunnu røkka øllum teimum sjey intelligensunum hjá Howard Gardner, talan kann eisini vera um rolluspøl. Tørvur er ikki á øllum 185m2 í høllini. Tað er ein møguleiki at hava ein

skilavegg sum koyrir høllina í tvey, so tað er møguligt at hava eina aðra tænastu (ella aktivitet) í høllini samstundis ella aðrar tíðir. Ætlanin er at hava opið hesar tíðir: Yrkadagar kl. 17-21, vikuskifti kl. 15-21. Áhugi er at hava opið longri í vikuskiftum.

Unn Thomsen, barnaergoterapeut. Áhugin fyri spælilandi byrjaði í 2007, tá Unn búði í Beograd. Har var spæliland á hvørjum horni og fór dagliga við soninum til ymisk spælilond. Hon setti sær fyri at gera eitt spæliland, tá hon kom aftur til Føroyar og gjørdi tí eitt research har hon skrivaði saman við fleiri fyritøkum, sum bygdu hesi spælilondini og fekk tilboð uppá ymisk konsept, og skrivaði niður, alt tað sum hon helt riggaði serliga væl í hesum ymsu spælilondunum.

Gunnhild Alstrup og Andreas Winkler hava víst áhuga fyri útboðnum uttan at geva ítøkilig uppskot – men ynskja samstarv og fund við kommununa. Sambært uppskot til rakstraravtalu og teimum spurningum, ið eru svaraðir (er hjálagt), meta nøkur av teimum áhugaðu ikki at teirra tankar til at menna eitt spæliland samsvara við tær treytir, ið verða settar. M.a. í mun til, at høllin skal brúkast til annað virksemi eisini. Samanumtikið verður tí mett frægast at fara í ein dialog við fleiri av tilboðsgevarunum og fáa avklárað fleiri av staklutunum og møguleikunum og á tann hátt geva fleiri høvi til at lata inn meiri fullfíggjaði uppskot.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka undir við, at umsitingin fer í víðari dialog við Gunnhild Alstrup, Sigfríð á Plógv / Tatanka, Kirstin E., Esbern á Geilini, Andreas Winkler og Unn Thomsen, sum hava áhuga og uppskot um spæli- og virknistilboð í Finsen, og koma aftur í nevnd við einum endaligum tilmæli um samstarvsfelaga.

**Mentamálanevndin 15. januar 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Helena Dam á Neystabø, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at verkætlanin er væl áleiðis at vera útint er umsitingin komin eftir, at tað er rættast at taka nøkur viðurskifti upp til viðgerðar. Her er talan um viðurskifti, ið tað væntandi ikki er rúm fyri hesum í avsettu puljuni til ókent.

Talan er um fylgjandi viðurskifti:

- Gólvhiti í durarnar: Havandi í huga stóra talið av brúkarum í øllum aldri, ið koma at brúka høllina, verður mett betri hóskandi at fáa lagt gólvhita í durarnar.

- Køkshentleikar: Tá spælitilboð skal vera í høllini, umframt brúk hjá barnagarðum v.m. er praktiskt at kunna gera kaffi og annað einfalt og verður tí mett hóskandi at gera ein einfaldan hentleika til tað. Ætlanin krevur eisini tillagingar viðv. gólvi og leiðingum..

- Vindfang við inngongir: Fyri at fyribyrja at regn setur inn í durarnar verður mett hóskandi at gera tvey slík eftir fyrimynd í teimum sum eru í Finsen.

Metti kostnaðurin fyri hesi átøkini eru 250 tkr.

Fígging

Á kontu 5365 verður væntandi minninýtsla í 2019 á uml. 350 tkr. og verður tí mett ráðiligt at fíggja hesi betranarátøkini av hesi kontu.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:
a). at gera betranarátøk sum nevnd omanfyri innanfyri fíggjarkarm á 250 tkr.
b). at fíggja møgulig betranarátøk av løgukarminum og at flyta 250 tkr. av konto 5365 Stuðul til ítrótt á projektkontu L57030 Hallirnar í Finsen og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina sum eykajáttan.

**Mentamálanevndin 05. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. februar 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

# 37/20 Reglugerð fyri Tórshavnar musikkskúla – møgulig dagføring

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 07.11.2018 | 340/18 | 18/03679-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.01.2020 | 5/20 | 18/03679-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 48/20 | 18/03679-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 12.02.2020 | 42/20 | 18/03679-1 |
| 5 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 37/20 | 18/03679-1 |

**Upprunin til málið:**
Samskifti við nevndina fyri Tórshavnar musikkskúla.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Nevndin fyri Tórshavnar musikkskúla ynskir at fáa dagført reglugerðina og gjørt greiðari leiklutin hjá nevndini.

Sí hjálagt galdandi reglugerð, umframt uppskot til dagførda reglugerð. Hugsanin er at senda uppskotið til hoyringar hjá Tórshavnar musikkskúla, herundir musikkskúlanevndini, námsfrøðiliga ráðnum og leiðslu skúlans.

Høvuðsbroytingarnar eru at tað er útgreinað nærri hvørjar uppgávur nevndin hevur.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál 2005-0855 Broyting í reglugerð fyri Tórshavnar Musikkskúla – samtykt 30. september 2009.

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at senda uppskotið til reglugerð til hoyringar hjá Tórshavnar musikkskúla.

**Mentamálanevndin 07. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá Tórshavnar musikkskúla, herundir leiðsluni og námsfrøðiliga ráðnum og musikkskúlanevndini.

Hoyringssvar eru komin frá Musikklærarafelagnum, Annette Nielsen, Angelika Nielsen, Birgitte Schnakenburg, Musikkskúlanvendini íroknað leiðara og varaleiðara skúlans. Sí hjáløgdu skjøl.

Alment um viðmerkingarnar
Hvat viðv. svarinum frá serliga Musikklærarafelagnum, verður mett mest hóskandi at strika §§ 2-6, tí talan er um dupultásetingar í mun til galdandi lóg og reglur annars í TK.
Við hesum broytingunum snýr reglugerðin seg í høvuðsheitum um virki hjá musikkskúlanenvndini.

Hvat viðv. innliti í fíggjarviðurskifti hjá almennum stovnum, herundir fíggjarætlan, so er at kalla fult innlit í øll viðurskifti og ber til hjá starvsfólkum, eins og almenningi at fáa innlit í tey viðurskiftini, eins og tað eisini er náttúrligt at leiðsla á einum stovni kunning starvsfólk um játtanarviðurskifti og umrøður tey við álitsumboð.

Hvat viðv. viðm. viðv. umboðum og ráðgevandi uppgávuni í § 7, so verður mælt til at halda fast við verandi skipan har býráðið velur limirnar og kunnu harvið breitt umboðað kommununa. Eins og námsfrøðiliga ráðið ráðgevur leiðsluni viðv. námsfrøðiligum viðurskiftum so ráðgevur nevndin leiðsluni meiri breitt, tó so at fleiri viðurskifti vilja vera tey somu.

Viðv. nøgdsemiskanning sbrt. § 11, nr. 10. Er fyrst og fremst ein leiðsluavgerð og kann eisini koma undir onnur pkt. sum longu eru á listanum. Verður tí strikað.

Viðv. hoyringssvarinum frá Anette Nielsen og Angeliku Nielsen
Mett verður at tað er sjálvsagt at fakfólk skúlans, lærararnir v.m., umframt álitsfólk, verða kunnaði og tikin við uppá ráð í øllum komandi viðurskiftum.

Viðv. hoyringssvari frá Birgitte Schanakenburgh

Vísandi til at reglugerðin nú burturav er viðv. musikkskúlanevndini eru flestu viðmerkingarnar ikki viðkomandi. Mett verður ikki at tað er upplagt at foreldur v.m. hava møtirætt í nevndini. Vildi verið heldur ógreitt. Hinvegin kunnu foreldur v.m. gott senda mál til nevndina. Viðv. APV kanningum verður mett at tað kann koma undir verandi § 11, nr. 9 og annars ein leiðsluuppgáva. Av tí at her er talan um innanhýsis og ráðgevandi viðurskifti hjá TK verður ikki mett neyðugt at reglugerðin skal góðkennast av landsmyndugleikanum.

Viðv. hoyringssvari frá Musikkskúlanevndini og skúlaleiðsluni

Viðv. viðm. til § 7 og § 11. Orðið tilráðing verður broytt til ráðgeving.

Viðv. viðm. til § 8. Mett verður hóskandi at leggja afturat: "Stk. 7. Umsitingin í TK kemur á samstarvsfund við musikkskúlanevndina 1-2 ferðir árliga, har mál, ið viðvíkja musikkskúlanum verða viðgjørd.

Viðv. viðm. til § 13. Mett verður hóskandi at gera vart við at tað kunnu vera viðurskifti sum innlit ikki verður givið í.

Dagførda reglugerðin verður soleiðis:

**Reglugerð frá x. januar 2020 fyri musikkskúlanevndini á Tórshavnar Musikkskúla**

**Kommunalur stovnur**
§ 1. Tórshavnar Musikkskúli er ein kommunalur stovnur, ið virkar undir Musikkskúlaskipanini hjá landinum, og er skipaður sbrt. Ll. nr. 83 frá 29. mai 2017 um musikkskúlaskipan.

**Musikkskúlanevnd**
§ 2. Ein nevnd við fimm limum verður sett at ráðgeva skúlaleiðaranum. Nevndarlimirnir verða tilnevndir av Tórshavnar býráð fyri eitt býráðsvalskeið í senn.

Stk. 2. Nevndin arbeiðir fyri góðum korum hjá musikkskúlanum, miðar eftir at vekja ans fyri tónleiki og arbeiðir sum heild fyri áhugamálum musikkskúlans. Nevndin eigur saman við musikkskúlanum at eggja til eitt ríkt og fjøltáttað tónleikalív.

Stk. 3. Nevndin skipar seg við formanni og næstformanni á fyrst komandi fundi eftir nýval av limunum í nevndini. Skúlaleiðarin kallar inn til fundin.

Stk. 4. Valið av formanninum er galdandi fyri valskeiðið.

Stk. 5. Í tann mun formaðurin fellir frá, ella ynskir at fara frá sum formaður, skipar nevndin seg av nýggjum fyri restina av valskeiðnum. Inntil nýggjur formaður er valdur røkir næstformaðurin uppgávurnar hjá formanninum.

Stk. 6. Leiðarin í Tórshavnar Musikkskúla er skrivari hjá nevndini.

**Fundir í musikkskúlanevndini**
§ 3. Nevndin hevur fund á teimum fundardøgum, sum nevndin hevur viðtikið, og annars so oftani, sum formaðurin ella skúlaleiðarin metir, at tørvur er á at hava fund, vanliga í minsta lagi 5 fundir um árið.

Stk. 2. Kallað verður inn til fundar við eini freist upp á í minsta lagi 7 dagar, um ikki formaðurin tekur aðra avgerð vegna tað, at eitt mál hevur skund.

Stk. 3. Limur, sum ynskir mál á skránna, skal boða formanninum frá hesum í seinasta lagi 7 dagar fyri fundin.

Stk. 4. Um 2 limir krevja tað skal formaðurin kalla til fundar sbrt. stk. 2.

Stk. 5. Við fundarinnkallingini skal fylgja ein dagsskrá, sum skal tilskila, hvørji mál skulu viðgerast á fundinum, og hjálagt skal vera tað tilfar, sum er neyðugt til tess at viðgera málini.

Stk. 6. Limir, sum ikki kunnu møta til fundar, skulu boða formanninum frá hesum skjótast gjørligt.

Stk. 7. Umsitingin í TK kemur á samstarvsfund við musikkskúlanevndina 1-2 ferðir árliga, har mál, ið viðvíkja musikkskúlanum verða viðgjørd.

§ 4. Fundirnir í nevndini eru ikki almennir.
Stk. 2. Formaðurin leiðir fundirnar.
Stk. 3. Fundir verða vanliga hildnir á skrivstovuni hjá Musikkskúlanum.

**Dagsskrá**
§ 5. Føst punkt á dagsskránni fyri fundir í nevndini eru hesi:
1). Fíggjarstøðan
2). Kunning frá formanninum, nevndarlimum og skúlaleiðaranum
3). Mál, ið kommunan ella skúlaleiðarin hevur lagt til nevndina at viðgera.
Stk. 2. Dagsskráin fyri nevndarfundir verður gjørd tøk á intraneti skúlans, tó so at mál, sum krevja tagnarskyldu, verða tikin av skránni, áðrenn hon verður tøk.

**Málevni hjá musikkskúlanevndini at ráðgeva um:**
§ 6. Nevndin viðgerð og ráðgevur skúlaleiðaran m.a. viðv.:
1). námsfrøðiligum menningararbeiði
2). undirvísingarútboð skúlans
3). árligu fíggjarætlanini, gjøld og virksemisætlanina
4). samarbeiðið ímillum skúla og heim
5). samstarvi við vinnu, stovnar, felagsskapir
6). marknaðarføring, samleiki og branding av skúlanum
7). hølisviðurskifti
8). undirvísingarmiðlar og -ljóðføri
9). við skúlans virksemi sum heild (undantikið starvsfólka- og næmingamál).

**Atkvøðureglur**
§ 7. Nevndin er viðtøkufør, tá formaðurin, ella næstformaðurin, um formaðurin ikki er á fundi, og í minsta lagi 2 av hinum limunum, eru møttir.

Stk. 2. Nevndin tekur avgerð við vanligum atkvøðumeiriluta. Í førum, har tað stendur á jøvnum millum atkvøðurnar, er atkvøðan hjá formanninum ella næstformanninum, um formaðurin ikki er á fundi, avgerandi.

Stk. 3. Skúlaleiðarin tekur lut á fundum í nevndini, hevur talurætt, men ikki rætt at greiða atkvøðu.

**Fundarfrágreiðingar**

§ 8. Fyri hvønn fund í nevndini skrivar skúlaleiðarin saman við formanninum fundarfrágreiðing, har tilskilað verður:

1). Hvørjir limir hava verið við í viðgerðini av málunum.

2). Avgerðin hjá nevndini í teimum einstøku málunum. Um atkvøtt hevur verið, verður atkvøðutalið og atkvøðubýtið tilskilað.

3). Minnilutasjónarmið og orsøkirnar til hesi í tann mun tað er neyðugt.

Stk. 2. Limirnir í nevndini skulu í seinasta lagi 5 dagar eftir ein fund hava sendandi fundarfrágreiðing. Mótmæli og uppskot til rættingar til fundarfrágreiðingina frá teimum limum, sum vóru á fundinum, verða skrivliga send formanninum í seinasta lagi 5 dagar eftir, at limirnir hava móttikið hana.

Stk. 3. Fundarfrásøgn skal við teimum avmarkingum, sum tagnarskyldan og møgulig onnur týðandi atlit hava við sær, verða tøk á intraneti skúlans.

**Ársfrágreiðing**
§ 9. Skúlaleiðarin og musikkskúlanevndin letur kommununi ársfrágreiðing í juni á hvørjum ári, ið greiðir frá virksemi skúlans í farna ári, viðkomandi hagtøl, ætlanir fyri komandi árið o.a.

**Árshjól hjá nevndini**
§ 10. Skúlaleiðarin og nevndin gera eitt árshjól fyri evnir, ið ætlanin er at viðgera komandi árið. Árshjólið verður dagført so hvørt eftir tørvi.

**Gildiskoma**
§ 11. Henda starvs- og fundarskipan kemur í gildi dagin eftir, at hon er góðkend av Tórshavnar býráði.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja broytta uppskotið til reglugerð og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 15. januar 2020:** Tikið av skrá.

**Mentamálanevndin 05. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. februar 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

# 38/20 Gøtunavn til nýggja útstykking við Villingardalsvegin, matr. nr. 1345a, 1346a og 1347a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevndin | 20.05.2019 | 5/19 | 19/01973-3 |
| 2 Mentamálanevndin | 07.06.2019 | 191/19 | 19/01973-3 |
| 3 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 143/19 | 19/01973-3 |
| 4 Gøtunavnanevndin | 11.11.2019 | 6/19 | 19/01973-3 |
| 5 Mentamálanevndin | 27.11.2019 | 325/19 | 19/01973-3 |
| 6 Býráðsfundur | 12.12.2019 | 300/19 | 19/01973-3 |
| 7 Mentamálanevndin | 15.01.2020 | 29/20 | 19/01973-3 |
| 8 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 13/20 | 19/01973-3 |
| 9 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 38/20 | 19/01973-3 |

**Lýsing av málinum:**
Byggi- og Umhvørvisdeildin heitir á gøtunavnanevndina um at finna eitt gøtunavn til nýggja útstykking við Villingardalsvegin í Havn, sum Tórshavnar kommuna hevur góðkent.
Talan er um matr. nr. 1345a, 1346a og 1347a. Útstykkingin hevur vegatkomu frá Villingardalsvegnum. Hædd er tikin fyri, at trøðin sunnanfyri, matr. nr. 1344a, kann knýtast uppí útstykkingina.

Kort eru hjáløgd.

**Gøtunavnanevndin 20. mai 2019:** Nevndin mælir til, at gøtunavnið verður «Ryskigøta».

Ryski er planta í sevættini og veksur í haga og fjallalendi. Navnið er kent t.d. í Ryskivatni.

**Mentamálanevndin 07. juni 2019:** Samtykt at taka undir við gøtunavnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Skriv er komið frá stjóranum í Sp/f 10.09.2018, sum søkir um, at gøtunavnið verður broytt til *"Fípugøta"*. Skrivið er viðheft.
Í skrivinum stendur m.a.:
"Eigarin metir, at gøtunavnið er torført at siga/úttala hjá nógvum og kann skjótt misskiljast. Tí verður søkt um, at gøtunavnið verður broytt, og vit vóna, at tit ganga ynskjum okkara á møti. Okkara uppskot er, at navnið á gøtuni verður broytt til "*Fípugøta*"."

**Gøtunavnanevndin 11. november 2019:** Samtykt at broyta navnið til «Fípugøta».

**Mentamálanevndin 27. november 2019:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, heldur fast við samtyktina 7. juni 2019.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, krevur málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 12. desember 2019:** Annika Olsen skeyt upp at beina málið aftur í mentamálanevndina, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri og seks atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Mentamálanevndin 15. januar 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, heldur fast við samtyktina 7. juni 2019.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen, mælir til navndið «Fípugøta».

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Útsett.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Annfinn Brekkstein legði fram broytingaruppskot um at navnið á gøtuni verður Fípugøta.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við seks atkvøðum fyri, sjey ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Halla Samulsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um samtyktina hjá meirilutanum í mentamálanevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, seks ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Halla Samulsen og Annfinn Brekkstein.

# 39/20 Heimild at taka gjald fyri at víga útlendingar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 12.02.2020 | 51/20 | 20/00480-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 39/20 | 20/00480-1 |

**Upprunin til málið:**
Eitt vaksandi tal av útlendingum ynskja at verða vígdir í Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Eitt vaksandi tal av útlendingum ynskja at verða vígdir í Tórshavnar kommunu.

Í fjør vóru 60 vígslur avgreiddar av Snarskivuni og vóru 23 av hesum millum útlendingar, tvs. millum ikki-føroyingar, sum ikki hava bústað í Føroyum, men einans koma til Føroyar til tess at verða vígdir.

At fyrireika eina vígslu krevur rættiliga nógva tíð. Óansæð um talan er um føroyingar ella útlendingar. Talan er jú um stóra avgerð, so hvør vígsla hevur sum oftast við sær eitt langt samskifti aftur og fram millum parið og Snarskivuna, um alt frá formellum viðurskiftum til slíkt, ið meira hoyrir ferðavinnuskrivstovum til.

Tá talan er um vígslu av útlendingum er málsviðgerðin eyka krevjandi, tí samskiftið má ganga fyri seg á enskum máli, og tað krevur fleiri skjøl, enn tá talan er um føroyingar. Og tað kann vera rættiliga avbjóðandi at fáa umsøkjarar at skilja øll krøvini til skjølini, ið skulu fyllast út, møguliga umsetast av góðkendum tulki og latast Snarskivuni.

Sostatt er her talan um stórt arbeiði, ið verður gjørt fyri fólk, ið ikki eru borgarar ella rinda skatt í Tórshavnar kommunu, og kemur meira enn so fyri, at útlendingar spyrja, hvat teir skulu rinda fyri ómakin.

Í Danmark kostar ein “vígsluviðgerð” 1.650 kr, og er hetta ásett í “Bekendtgørelse om størrelse af offentlige gebyrer på det familjeretlige område”, men hesa heimild hava føroyskar kommunu ikki.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:** Fyrisitingarstjórin og leiðarin á Snarskivuni mæla til, at Tórshavnar kommuna vendir sær til Almannnaráðið við eini áheitan um at fáa neyðugu heimildina at taka eitt hóskandi gjald frá útlendingum, sum søkja um verða vígdir í Tórshavnar kommunu.

**Fíggjarnevndin 12. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. februar 2020: Samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.**

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Halla Samulsen.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

# 40/20 Reingerð til fólkapensjonistar í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 19.03.2019 | 6/19 | 19/01090-1 |
| 2 Eldranevndin | 13.05.2019 | 12/19 | 19/01090-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 129/19 | 19/01090-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 109/19 | 19/01090-1 |
| 5 Eldranevndin | 07.11.2019 | 21/19 | 19/01090-1 |
| 6 Eldranevndin | 06.02.2020 | 29/20 | 19/01090-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 12.02.2020 | 46/20 | 19/01090-1 |
| 8 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 40/20 | 19/01090-1 |

**Upprunin til málið:**
Býráðið hevur fyri fíggjarætlanina 2019 havt ynski um at uppraðfesta heimatænastuna við m.a. at gera eina eyka rutu. Harafturat bleiv á fíggjarætlanini fyri 2019 settar 500.000 kr. av til betran av heimatænastuni. Politiskt ynski er um, at hesir pengar skulu nýtast til reingerð hjá fólkapensionistum.

Fyri áleið 10 árum síðani var reingerð ein partur av tí tænastu sum heimatænastan veitti heimabúgvandi borgarum. Reingerð bleiv tá tikin úr tí tænastu, sum heimatænastan veitir og hevur ikki verið partur av tænastuni síðan.

Gjøgnum øll árini hava røddir tó verið frammi um saknin av hesari tænastu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsitingin hevur arbeitt við at gera eina skipan, sum tryggjar at serligur bólkur av borgarum, kunnu fáa tilboð um reingerð í heiminum. Talan verður um royndarverkætlan fyri 2019.

Vegna trot á starvsfólk ber ikki til at leggja hesa uppgávu afturat verandi uppgávum hjá heimatænasuni.

Umsitingin hevur tí verið í samband við 5 fyritøkur og spurt um prís og um áhugan fyri uppgávuni og um hvussu uppgávan kann skipast.

Viðvíkjandi kostnaði er lítil munur á fyritøkunum,  heldur sæst munurin á hvussu reingerðin kann skipast í praksis hjá borgarunum.

Royndarverkætlanin verður skipa soleiðis, at tað eru teir borgarar (fólkapensionistar), sum ikki megna sjálvir at gera reint og sum eftir skipanini um heimahjálp hava rætt til ókeypis heimahjálp, sum kunnu fáa reingerðartænastu frá  Heilsu- og umsorganartænastuni.

Serstakt umsóknarblað verður til reingerðartænstuna. Umsóknarblað verður tøkt á heimasíðuni. Visitatiónin kann eisini hjálpa borgaranum at útfylla umsóknarblað. Tá umsóknarblað er móttikið ger visitatiónin eina meting av, um umsøkjarin lýkur treytirnar fyri, at fáa reingerðartænstu frá Heilsu- og umsorgartænastuni. Tá avgjørt er, at umsøkjarin kann fáa reingerðartænastu verða praktisku viðurskiftini fingin uppá pláss og reingerðin sett í verk.

Møguleiki verður at velja at fáa tænastu eina ferð aðru hvørja viku ella eina ferð fjórðu hvørja viku.

Brúkaragjald verður sett á tænastuna eins og á aðrar tænastur hjá heilsu- og umsorganartænastuni t.d. matartænastuna. Tey sum hava rætt til reingerðartænastu eru fólkapensjónistar, ið ikki kunna gera reint sjálvi.

Viðkomandi skal hægst tjena 15.000 kr. afturat fólkapensjónina við samhaldsfasta.

Fyri hjún má ársinntøku í mesta lagi vera 22.500 kr. útyvir fólkapensjón og samhaldsfasta.

Sum tummilsregla verður ikki latin stuðul til reingerð til fólkapensjonistar, sum búgva saman við frískum hjúnafelaga/maka ella øðrum vaksnum fólki, yvir 18 ár, ið eru før fyri at gera reint.

Borgari sum fær reingerðartænastu avtalar sjálvur, ella í samráð við visitatiónina, við reingerðarfyritøkuna, hvat ein ynskir at fáa gjørt reint.

Tá borgarin far endaliga játtaðan stuðul til reingerð, skal viðkomandi undirskriva serstakt skjal, ið gevur loyvi til sjálvvirkandi gjald av tænastuni, umframt loyvi til, at Heilsu- og umsorganartænastan kann úvega skattaupplýsingar hjá borgaranum.

Er ein borgari ónøgdur við tænastuna, verður hann í fyrstu syftu, at taka tað upp við reingerðarfyritøkuna.

Førir tað ikki á mál, skal borgarin boða móttøkuni í umsitingini frá á mail: heilsuhusid@torshavn.fo ella telefon: 302000

Verkætlanin verður eftirmett í septembur við atliti til framhald komandi fíggjarár.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarliga/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:** Heilsu- og umsorganarstjórin og fakligi dygdarmennarin í Heilsu- og umsorganartænstuni mæla eldranevndin til at taka undir við omanfyri lýstu royndarverkætlan og geva umsitingini heimild at gera samstarvsavtalu við umrøddu reingerðarfyritøku.

**Eldranevndin 19. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Sambært kunngerð um heimatænastu og gjald fyri heimatænastu, eldrarøkt o.a. hevur kommunan heimild í § 10 at krevja gjald frá borgarum fyri tænastur og tilboð, sum verða veitt sbr. § 10 í lógini.

Eftir nærri kanning av leistinum fyri reingerðartænastu, metir kommunufelagið ikki, at kommunan hevur heimild at nýta inntøkuna hjá borgaranum sum grundarlag fyri, um borgarin kann fáa reingerðartænastuna ella ikki. Hinvegin skal kommuna gera eina fakliga tørvsmeting og staðfesta ein tørv, fyri at veita reingerðartænastu. T.d. at hetta er ein tænasta sum verður veitt borgarum sum eru óhjálpnir og ikki hava møguleika á annan hátt at fáa gjørt reint í heiminum.

Sostatt verður gjørd ein broyting í royndarverkætlanini soleiðis, at allir fólkapensionistar hava møguleika at søkja um reingerðartænastu uttan mun til inntøku.
Á sama hátt, sum til alla aðra tænastuveiting til heimatænastuna, ger visitatiónin eina ítøkilig fakliga grundaða tørvsmeting av tørvinum hjá tí einstaka umsøkjaranum í mun til hvørt reingerðartænasta verður veitt.

Skipanin annars av reingerðartænastuni og brúkaragjald er lýst nærri fyrr í málinum og verður verðandi óbroytt.

Av tí at ein partur av tilmælinum er ásetan av brúkaragjaldið skal hesin parturin leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til samtyktar.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og fakligi dygdarmennarin í Heilsu- og umsorganartænastuni mæla eldranevndini til at taka undir við broytta leistinum av reingerðartænastuni, sum lýst omanfyri.

Heilsu- og umsorganarstjórin og fakligi dygdarmennarin í Heilsu- og umsorgarnar-tænastuni mæla eldranevndini til at taka undir við, at brúkaragjaldið verður ásett til 300 kr. fyri hvørja reingerð og at leggja brúkaragjaldið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Eldranevndin 13. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við Eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá minnilutanum, Anfinni Brekkstein, Tróndi Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Bjørg Dam, Helenu Dam á Neystabø og Hallu Samuelsen: Mælt verður til at taka undir við málinum við teirri broyting, at eingjaldið verður strikað.

Broytingaruppskotið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, seks ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Halla Samulsen, Annfinn Brekkstein og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Turid Horn, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur.

**Eldranevndin 07. november 2019:** Eftirmetingin varð løgd fram og umrødd av nevndini.

**Ískoyti:**
Frá juni 2019 hevur koyrt ein royndarverkætlan við reingerð til fólkapensjónistar.

Játtaðar vóru 500 tkr. til verkætlanina. Reingerðartænastan var ókeypis fyri borgaran, 104 borgarar vóru í skipanin við ársenda 2019.

Ein eftirmeting varð gjørd av royndarverkætlanini, ið varð løgd fyri eldranevndina tann 07.11.2019.

Eftirmetingin vísti, at nakrar tillagingar eiga at gerast, um tænastan skal halda fram. M.a. at tað hevði verið skynsamari at reingerð verður veitt triðju hvørja viku, ístaðin fyri aðru- ella fjórðu hvørja viku. Eisini varð mett at avbjóðingin við at fólk ikki boða frá, tá tey eru burturstødd, ella ikki tryggja sær, at reingerðarfólkið sleppur inn, í stóran mun kann avmarkast við einum brúkaragjaldi.

Samanumtikið vísti eftirmetingin eitt stórt nøgdsemi við tænastuna, sum riggaði væl. Eitt stórt ynski er um, at tænastan heldur fram.

Á býráðsfundinum tann 12.12.2019 (J.nr. 19/04681) varð upplýst, at um reingerðartænastan skal halda áfram, og sama tal av borgarum verða í skipanini, er fíggjartørvurin mettur at verða 1.2 mió. kr., harav 1/3, skal fíggjast við brúkaragjaldi. Samtykt varð at játta 800 tkr. til reingerðartænastuna fyri 2020.

Heilsu- og umsorganarfyrisitingin hevur bjóða reingerðartænastuna alment út á útboðsportalinum sambært innkeyps- og útboðspolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu.

Í útboðstilfarinum eru tillagingar gjørdar við støðið í eftirmetingini, ið m.a. hevur við sær at borgarin frameftir fær reingerð svarandi til 2 tímar, triðju hvørja viku.

Reingerðin varð boðin alment út á útboðsportalinum hjá Tórshavnar kommuna tann 08. Januar. 2020. Freistin at koma við boðum var mánadagin 27. januar 2020. Í útboðstilfarinum er m.a. útgreina hvat kann og skal gerast reint, nær reingerðin skal fara fram, gjaldstreytir v.m. Sáttmálin verður galdandi í 1 ár við føstum prísi pr. tænastuveiting, tó við møguleika hjá TK at leingja sáttmálan 2 ferðir í 12 mánaðir.
TK hevur tilskilað sær rætt at velja millum innkomnu tilboðini og til ikki at taka av nøkrum tilboði.

Ein fyritøka hevur givið tilboð uppá at veita reingerð til fólkapensjónistar.

Dømt varð eftir hesum leisti: Kostnaður 70 %, Tænastuveiting 15 %, Gjaldstreytir og avrokning 5% og Umhvørvið og CSR 10 %.
Eftir at tilboðið er kannað og dømt, er fyrisitingin komin til, at tilboðið frá veitaranum líkur øll krøv, ið eru sett til tænastuna. Harumframt verður mett, at kostnaðurin er nøktandi, við støði í kostnaðinum í royndarverkætlanini. Viðmerkjast skal, at veitarin krevur fult gjald um borgarin ikki gevur boð um fráveru/avlýsing, ella tá tey ikki sleppa inn at gera reint, sum avtala. Hetta var ikki ein treyt í royndarverkætlanini.

Útgangsstøði er tikið í at pláss er fyri 110 borgarum í skipanini.

Upprunaliga varð tørvurin á játtan mettur til 1,2 mió. fyri 2020. Við støði í innkomna tilboðið verður árligi kostnaðurin á tænastuni eitt vet bíligari enn upprunaliga mett, og harvið kann brúkaragjaldið lækka samsvarandi. Við støði í útrokningunum eigur brúkaragjaldið at ásetast til 170 kr. fyri hvørja reingerð svarandi til tveir tímar.

Fyrisitingin metir at eitt brúkaragjald eigur at setast á tænastuna eins og við øðrum tænastum hjá Heilsu- og umsorganartænastuni, sum t.d. matartænastan.

800 tkr eru játtaðar til reingerðartænastuna í 2020. Við støði í royndarverkætlanini mælir Heilsu- og umsorganarfyrisitingin til, at pláss skal verða fyri 110 borgarum í skipanini. Tískil mælir Heilsu- og umsorganartænastan til at eitt brúkaragjald verður ásett á tænastuna á 170 kr. ið er undir 1/3 av kostnaðinum á tænastuni.

**Tilmæli**
Heilsu- og umsorganarstjórin og fulltrúin í Heilsu- og umsorganarfyrisitingini mæla eldranevndini til:

- At taka undir við tilmæli um at taka av tilboðnum frá tí veitara, sum vann útboðið
- At heimila Heilsu- og umsorganarfyrisitingini at gera sáttmála við veitaran ið vann útboðið
- At taka undir við at brúkaragjaldi verður ásett til 170 kr. fyri hvørja reingerð
- At taka undir við at reingerðartænastan verður sett í verk sum føst skipan

Og at leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Eldranevndin 06. februar 2020:** Ein meiriluti, Bergun Kass, Turið Horn og Jákup Dam, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Bjørghild Djurhuus og Annfinn Brekkstein, tekur undir við punkt 1, 2 og 4, men taka ikki undir við punkt 3 um brúkaragjald.

**Fíggjarnevndin 12. februar 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass taka undir við meirilutanum í eldranevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, taka undir við minnilutanum í eldranevndini.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Halla Samuelsen, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein seta fram broytingaruppskot um at avtaka brúkaragjaldið áljóðandi kr. 170 fyri hvørja reingerð, og at peningur verður funnin innan økið til meirkostnaðin av skipanini.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið, ið fall við seks atkvøðum fyri, sjey ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Halla Samulsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um samtyktina hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, seks ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Halla Samulsen og Annfinn Brekkstein.

# 41/20 Liðuggerð av Karlamagnusarbreyt og vinnuøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.10.2016 | 268/16 | 16/01038-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 372/16 | 16/01038-5 |
| 3 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 302/16 | 16/01038-5 |
| 4 Tekniska nevnd | 08.10.2019 | 61/19 | 16/01038-5 |
| 5 Tekniska nevnd | 14.01.2020 | 3/20 | 16/01038-5 |
| 6 Tekniska nevnd | 04.02.2020 | 9/20 | 16/01038-5 |
| 7 Fíggjarnevndin | 12.02.2020 | 47/20 | 16/01038-5 |
| 8 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 41/20 | 16/01038-5 |

**Málslýsing:**
Áðrenn Vinnustykkini við Karlamagnusarbreyt vóru liðugtgjørd og handað kommununi, var asfaltering av felagsøkjum/P-plássum tikin burturúr verkætlanini, av tí at mett var, at asfaltið fórst meðan bygging fór fram á vinnustykkjunum og at asfalteringin tískil átti at bíða til bygging var framd.

Nú bygging hevur tikið seg upp á vinnustykkjunum, hava borgarar, sum byggja, í fleiri førum vent sær til kommununa um at fáa felagsøkini/P-plássini asfalteraði frammanfyri hjá teimum og hava eisini víst á, at leiðingar so sum kloakk, vatn og el ikki liggja soleiðis sum prosjekttekningarnar tilskila og at tað í fleiri førum tískil hevur verið neyðugt, at leggja leiðingar av nýggjum.

Umsitingin mælir til:

- at skipað skráseting av verandi leiðingum og manglum verður sett í verk.
- at samlað prosjekt verður útvegað til liðuggerð av Karlamagnusarbreyt, vinnustykkjum og felagsøkjum/P-plássum.
- at asfaltering av felagsøkjum frammanfyri verandi bygningum í gerð verða sett í verk beinanvegin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at játtaðar verða kr. 800.000,- til nevndu arbeiðir sum partur í liðuggerð av verkætlanini L69001 Vinnuøkir við Karlamagnusarbreyt og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at tá arbeiðið er framt at asfalteringin av gongubreytunum verður raðfest beinanvegin.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Av tí at talið á íbúðareindum kring Karlamagnusarbreyt er økt munandi í mun til tað, sum var væntað, tá útstykkingin varð gjørd, er útbygging av reinsiverkum til kloakkskipanina í økinum átrokandi neyðug.
Ráðgevi hevur prosjektera og kostnaðarmett arbeiðið at økja reinsikapasitetin og tilhoyrandi kloakkskipan (sí j. nr. 16/01038-16).
Um kloakkarbeiðið verður boðið út, er høvi til samstundis at seta í útboð gerð av gongubreyt millum Karlamagnusarbreyt og P-økið hjá Skúlanum við Løgmannabreyt – hetta seinna arbeiðið fíggjað av tøkari játtan á verkætlan L64015 Karlamagnusarbreyt asfaltering parkering o.a.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla til at heimila umsitingini at seta arbeiðið í útboð, at økja reinsikapasitetin og tilhoyrandi kloakkskipan, samsvarandi prosjekti frá ráðgeva, og at seta arbeiðið í útboð, at gera gongubreyt millum Karlamagnusarbreyt og P-økið hjá Skúlanum við Løgmannabreyt, og at innkomin boð verða løgd fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 08. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Vegna Tórshavnar kommunu hevur ráðgevi kommununnar boðið arbeiðið at økja reinsikapasitetin og tilhoyrandi kloakkskipan út til tríggjar arbeiðstakarar, sum lótu kommununi fylgjandi boð:

- Spf. Maskinkoyring kr. 2.114.500,00
- Spf. RJ Brockie kr. 726.582,50
- Spf. Konsax kr. 1.232.135,00

Ráðgevi kommununnar mælir til at samráðast við lægstbjóðandi um gerð av sáttmála um arbeiðið.

Við støði í tilboðnum frá Spf. RJ Brockie hevur umsitingin latið gera samlaða kostnaðarmeting, har prosjektering, byggileiðsla, óvæntað, byggiharraveiting (reinsiverk) og MVG v.m. er íroknað (sí j. nr. 16/01038-22 Samlað kostnaðarmeting).

Eftir samlaðu kostnaðarmetingini metir umsitingin, at nevndu arbeiðir kunnu gerast fyri kr. 1.739.000,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla til, at játtaðar verða kr. 1.739.000,- til arbeiðini av konto 8110, vegir í 2020 treytað av at neyðug játtan hesum viðvíkjandi verður framflutt frá 2019 til 2020 og at heimila umsitingini at gera sáttmála við RJ Brockie um gerð av nevndu arbeiðum.

**Tekniska nevnd 14. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Fleiri av bygningunum, sum hava verið í gerð við Karlamagnusarbreyt, eru um at gerast lidnir, ella eru longu lidnir og klárir til innflyting. Roknast kann tí við, at borgarar í næstum fara at venda sær til kommununa um at fáa túnið/P-plássið frammanfyri hjá teimum asfalterað.
Tøka játtanin, sum er eftir til nevnda endamál, er nú um ársskiftið komin niður á góðar kr. 208.000,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla til:

1. at fluttar verða kr. 2.000.000,- av konto 6475, L00001 “Løgukarmur fyri árið”, til konto 6475, L64015 “Karlamagnusarbreyt, asfaltering, parkering o.a”
2. at fluttar verða kr. 400.000,- av konto 6475, L00002 “Framfluttur løgukarmur”, til konto 6475, L64015 “Karlamagnusarbreyt, asfaltering, parkering o.a”
3. at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Talan er um flyting av karminum innan somu høvuðskonto, og tí krevst bert ein viðgerð í býráðnum.

**Tekniska nevnd 04. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. februar 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen, tekur ikki undir við málinum og vísir á, at fleiri viðurskifti eiga at verða fingin í rættlag framvið Karlamagnusarbreyt, herundir gongubreytir allan vegin framvið vegnum, at ljósviðurskiftini fáast í rættlag, at útkoyringin frá Bónus verður móti Atlagøtu, at øll Karlamagnusarbreyt verður einsrættað, og at kommunan fer undir eina tilgongd at ogna sær óbygdu grundøkini framvið Karlamagnusarbreyt og nýtir hesi til at betra um parkerinsviðurskiftini v.m.
Klik her for at angive tekst.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

# 42/20 Broyting av Serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina, Tórshavnar kommuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2020 | 30/20 | 20/00163-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 42/20 | 20/00163-1 |

**Upprunin til málið:**
Umsøkjari ynskir at innrætta eini hús á Reyni til íbúðir, ið standa innanfyri C3 øki, sum sambært serstøku byggisamtykt fyri Tinganes og Gomlu Havnina verður lagt til almenn endamál.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tórshavnar kommuna hevur móttikið eina umsókn við tveimum uppskotum um at innrætta bygningin í Fjósinum, matr. nr. 107, Kirkjuvegur 2 / Bringsnagøta til íbúðir.

15. oktober 2019 samtykti serstaka byggiráðið fyri Tinganes og gomlu Havnina, at bygningurin eigur at verða innrættaður sambært uppskoti A, sum lýsir tríggjar íbúðareindir, av tí at hetta verður mett at vera ein hóskandi íbúðarstødd. Harafturat var tilmælt at loyva Tjóðsavninum at skráseta bygningin, áðrenn broytingarnar fara fram.

Serstaka byggisamtyktin fyri Tinganes og gomlu Havnina varð gjørd í samstarvi millum Tórshavnar býráð og Føroya landsstýri til tess at tryggja og varðveita dámin, sum hevur sermerkt Reyn. Økið, har bygningurin stendur, hevur síðani serstaka byggisamtyktin var góðkend í 1973, ligið innanfyri C3 økið, ið er sett til minni stovnar sum til dømis vøggustovu og barnagarð. Tískil má orðingin í byggisamtyktini broytast, áðrenn íbúðarbygging kann verða loyvd á viðkomandi øki.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í C3 í 1. grundumráði í Serstøk byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina, Tórshavnar kommuna.

Eindirnar C: Almenn endamál og bústaðarendamál

- Eindirnar C1, C2, C3 og C4 kunnu bert verða nýttar til almenn endamál, C4 tó eisini til bústaðarendamál.

- C1. Høvuðsbygningurin er friðaður og skal varðveitast sum bókahandil ella annað slag av smásøluhandli. Urtagarðurin skal varðveitast og skal, tá eigarin ynskir tað, latast kommununi fyri endurgjald, og skal hann tá skipast sum almennur urtagarður. Ognin má ikki uttan serstakt loyvi frá býráðnum seljast uttan til kommununa.

- C2. verður lagt til kirkju og kirkjugarð.

- C3. verður lagt til minni stovnar sum til dømis vøggustovu og barnagarð.

- C4. verður lagt til almennar stovnar, skrivstovur og bústaðarendamál.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Upprunaliga vóru eindirnar í C (C1, C2, C3 og C4) einans tilætlaðar almenn endamál, men í 2002 var broyting gjørd fyri C4, soleiðis at eindin umframt almennar stovnar og skrivstovur,

eisini fevnir um bústaðarendamál. Broytingin var gjørd í samband við eina umsókn (sí mál 1999/840), og mett hóskandi, av tí at hús uttanum ognina vóru brúkt sum sethús, og ongin heildarætlan enn er gjørd fyri økið.

Býarskipanardeildin metir, at somu grundgevingar kunnu nýtast í sambandi við broyting av byggisamtyktini fyri C3 soleiðis at eindin eisini fevnir um bústaðarendamál. Tveir av teimum tilsamans fimm bygningunum á økinum verða í dag nýttir til bústaðarendamál, og enn er ongin heildarætlan gjørd fyri nakað C øki (sí 20/00163-3 Serstøk byggisamtykt nr. 4, Tinganes og Reyn vm kort) Harafturat er hendan broytingin í samsvar við ynskið um at fáa fleiri at búseta seg í miðbýnum, sambært miðbýarætlan frá 2016.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Fyrispurningur um innrættan av smáum íbúðum til lesandi á matr. nr. 107, Kirkjuvegur 2 / Bringsnagøta, Tórshavn 19/02754

Johan Mac Donald umsókn um byggiloyvi - leigusáttmáli um økið omanfyri neystið úti á Bakka matr. nr. 151a 1999-0840

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Serstaka byggiráðið fyri Tinganes og gomlu Havnini ynskja at tað verður sett krøv til hvat bústaðirnir verða brúktir til.

**Skjøl**
*Serstøk byggisamtykt nr. 4, Tinganes og Reyn vm kort*
*Serstøk byggisamtykt nr. 4. – broyting*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at 2.gr í serstøku byggisamtykt nr. 4 verður broytt sambært skjali *20/00163-3 Serstøk byggisamtykt nr. 4. - broyting,* m.a. soleiðis, at eind C3 eisini verður løgd til bústaðarendamál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

# 43/20 Umsókn um grundøki til vardar bústaðir – Sambýli í Reynstúni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.11.2018 | 214/18 | 18/03494-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.11.2018 | 318/18 | 18/03494-5 |
| 3 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 65/18 | 18/03494-5 |
| 4 Fíggjarnevndin | 28.11.2018 | 335/18 | 18/03494-5 |
| 5 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 280/18 | 18/03494-5 |
| 6 Tekniska nevnd | 07.05.2019 | 32/19 | 18/03494-5 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2019 | 86/19 | 18/03494-5 |
| 8 Tekniska nevnd | 04.06.2019 | 43/19 | 18/03494-5 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2019 | 96/19 | 18/03494-5 |
| 10 Tekniska nevnd | 10.09.2019 | 50/19 | 18/03494-5 |
| 11 Tekniska nevnd | 05.11.2019 | 63/19 | 18/03494-5 |
| 12 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 17/20 | 18/03494-5 |
| 13 Fíggjarnevndin | | | 18/03494-5 |
| 14 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 43/20 | 18/03494-5 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Almannaráðið sendi í mars mánað í fjør kommununi umbøn um grundøkir til vardar bústaðir í Tórshavn. Vísandi til bráðfeingis tørvin á nýggjum og tíðarhóskandi vardum bústøðum og bústovnum í Tórshavn, hevur landstýriskvinnan í almannamálum gjørt eina raðfestingarætlan fyri at loysa bráðfeingis tørvin á bústøðum fram til 2022. Tørvur er á fýra grundøkjum í Tórshavn til nýtt barnaheim og trý sambýli, tískil er ynskiligt, at kommunan kann veita Almannaráðnum fýra grundøkir til endamálið í Tórshavn, íroknað Argir og Hoyvík.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsitingin umrøddi spurningin um økir til barnaheim og sambýlir í tráð við býarplanleggingina, og vísti í hesum sambandi á nøkur økir í ávikavist Tórshavn, Hoyvík og á Argjum. Har ímillum varð víst á eitt øki við Reynstún/Glyvursveg á Argjum, matr. nr. 4cl, 4cm og 4bs, sum í fyrsta umfari ikki varð ynskt til eina staðseting til eitt sambýli, sí kortskjalið *Økið á Argjum_Kort*. Almannaráðið hevur seinni víst økinum ans, har ynski er at staðseta eitt sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki.

Trý lógaruppskot vóru í desember mánað løgd fyri Tingið, sum fevna um bygging av nýggjum barnaheimi, bú- og umlættingarheimi til børn og ung við autismu og bygging av tveimum vardum bústøðum til fólk við menningartarni. Landsverk hevur tí latið evnað eina byggiskrá til eitt sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki, har tað verður víst til økið í Reynstúni á Argjum við tí í huga, at Tórshavnar kommuna skal samtykkja staðsetingina til endamálið, sí byggiskrá og fylgiskjøl.
Eitt sambýli hóskar væl í einum øki, sum longu er merkt av at vera bústaðarøki. Byggingin verður staðsett fyri endan av einum vegi við sethúsum, og kann byggingin tí skapa ein samanhang við verandi býling, samstundis sum byggingin kann skapa sítt egna nærumhvørvið. Heimið skal staðsetast á byggiøkið soleiðis, at hetta liggur skilabest í mun til atkomu og parkering.

Ástaðarfundur var hin 16. februar 2018, har kommunan saman við umboðum frá ymsu áhugabólkunum vísti á ymsu økini og møguleikarnar. Býarverkfrøðingurin var somuleiðis við á staðnum, har staðfest varð, at besta atkoman til økið er umvegis Reynstún.

Ferðslan til og frá heiminum verður væntandi tann sama sum á líknandi bústøðum, ið Almannaráðið hevur í dag. Húsfólk verða koyrd við mini-bussum, og starvsfólk hava persónbilar. Fyri ein vanligan gerandisdag er ferðlsan sum fylgjandi:

| | |
|---|---|
| Húsfólk: | 3 fráferðir við bussi millum kl. 8.00-9.00 |
| | 1 fráferð kl. 10.00 |
| | 1 fráferð kl. 10.30 |
| | 1 heimferð kl. 14.00 |
| | 3 heimferðir ímillum kl. 15.00-16.00 |
| Starvsfólk: | 7 starvsfólk møta kl. 7.00 |
| | 8 starvsfólk møta ímillum kl. 15.00-16.00 |
| | 2 starvsfólk møta kl. 23.00 |
| | 2 starvsfólk fara heim kl. 7.00 |
| | 4 starvsfólk fara heim kl. 12.00 |
| | 2 starvsfólk fara heim kl. 15.00 |
| | 8 starvsfólk fara heim ímillum kl. 20-23 |

Í dag hava øll starvsfólkini ikki koyrikort, summi búgva í grannalagnum og ganga til arbeiðis, meðan onnur taka bussin. Væntast kann tískil við minni bilferðslu enn lýst omanfyri. Eingin føst vitjanartíð er, og vitjandi eru allar gerandisdagar og í vikuskiftinum, væntast skal við áleið einum bili um dagin. Í vikuskiftinum er ferðslan hjá húsfólkum áleið 1-2 túrar um dagin, meðan ferðslan hjá starvsfólkunum er hin sama, sum í gerandisdøgunum. Ruskinnsavnan og vørumóttøka er einaferð um vikuna.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið í Reynstúni, matr. nr. 4cl, 4cm og 4bs, liggur í umráðispartinum A3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar eru:

1. *Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*
2. *Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.*
3. *Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 m$^2$ fyri stakhús, 300 m$^2$ fyri tvíhús og 250 m$^2$ fyri raðhús. Ein partur av hesum kann leggjast sum fríøki, tó í mesta lagi 100 m$^2$ fyri hvørt grundstykki.*
4. *Byggistig 0,3*
5. *Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, ella raðhús. Tó kann tað fyri grundstykkir, sum eru 200 m$^2$, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 m$^2$ og 500 m$^2$ verða sett javnt minkandi niður til vanliga ásetta minstuvídd. Í serstakari byggisamtykt kann nýtslustigið verða roknað út frá heildarbyggingini í mun til eitt natúrliga avmarkað øki.*

**Upplýsingar frá umsitingini:**

Í sambandi við at Tórshavnar býráð á fundi 26. apríl 2001 samtykti at broyta almennu byggisamtyktina fyri økið millum Reynstún og dagstovnin frá at vera B3 vinnuøki til A1 sethúsaøki, varð mótmæli frá eigarafelagnum Havnardalur ABC sent kommununi.

Í mótmælisskrivinum, dagfest 30. mai 2001, verður víst á, at eitt sethúsaøki kemur at økja um virksemið í verandi býlingi, og undrast tey á, at kommunan ikki hevur aðrar ætlanir við einum so høgligum øki, umframt at økið ikki er partur av eini størri heildarætlan. Grundað á, at ongin ítøkilig ætlan er fyri einum atkomuvegi til økið, vilja undirritaðu greitt mótmæla, at tey á ongan hátt kunnu góðtaka, at vegurin Reynstún verður nýttur sum møguligur atkomuvegur til økið. Mótmælið fevnir somuleiðis um nýtslu av Reynstúni sum fyribils arbeiðsveg ella atkomuveg til økið, meðan bygging fer fram.

Í sambandi við bygging av sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki hevur eigarafelagið Havnardalur ABC aftur sent kommununi skriv, har víst verður til mótmælið frá 2001, umframt at tey gera vart við sína ónøgd, at tey ikki eru kunnaði og hoyrd um eina slíka stóra byggiætlan, sum tey meta fer at broyta umhvørvið í økinum munandi, sí mótmælið.

Økið er seinni broytt til A3 í almennu byggisamtyktini, og loyvir ásetingin tí, at eitt nýtt sambýli verður bygt í økinum. Tórshavnar kommuna ynskir somuleiðis at rúma øllum borgarum, tí er góð grundgeving at sameina eitt sambýli í eitt bústaðarøki, sum er við til at skapa ein fjølbroyttan bý.

Umsitingin var saman við býarverkfrøðinginum á staðnum, har staðfest varð, at vegurin Reynstún er egnaður sum atkomuvegur. Víst varð somuleiðis á, at ongin vegatkoma skal vera frá Glyvursvegnum. Økið er byggiøki, sum sjálvsagt hevur eina økta ferðslu við sær, men grundað á virksemið lýst omanfyri, metir umsitingin ikki, at ferðsluviðurskiftini verða stórliga broytt. Einki er tí til hindurs fyri byggingini, tó skal vegatkoman góðkennast av teknisku nevnd. Harumframt verður mett, at eitt 17 ára gamalt mótmælisskriv er óviðkomandi í eini viðgerð, har fleiri broytingar eru farnar fram.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:**
Umsókn um grundøkir til vardar íbúðir, journal nr. 17/00903

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum:**
Serstøk byggisamtykt skal gerast í sambandi við útstykkingina.

**Umhvørvisárin:**
Einki

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum):**
Hevur ikki verið til viðmerkingar hjá øðrum.

**Skjøl:**
*Økið á Argjum_Kort,* journal nr. 18/03494-9
*Byggiskrá_Sambýlið í Reynstúni*, journal nr. 18/03494-8
*Fylgiskjal 01_Sambandi millum eindirnar*, journal nr. 18/03494-8
*Fylgiskjal 02_Gentle teaching*, journal nr. 18/03494-8
*Fylgiskjal 03_Námsfrøðiliga arbeiðið á Eirargarði*, journal nr. 18/03494-8
*Fylgiskjal 05_Tíðarætlan*, journal nr. 18/03494-8
*Mótmæli*, journal nr. 18/03494-7

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**
Tórshavnar kommuna skal selja Almannaráðnum lendið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna staðsetingina í Reynstúni til eitt nýtt sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki, og at beina málið í teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. november 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal og Turið Horn, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Bogi Andreasen atkvøður blankt.

Tróndur Sigurðsson mælir til at finna aðra staðseting.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 14. november 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tekniska deild hevur viðgjørt málið við atliti til reinsiverki, leiðingum og atkomu til sambýlið.
Verkætlanin má taka atlit til at nýtt reinsiverk til ovara part av Reynstúni og Reynsgøtu skal staðsetast har (P-økið kann brúkast), umframt til hetta byggjaríið, hetta má takast við í skipanina av økinum. Ætlandi skal eisini fjarhitaleiðing leggjast gjøgnum økið, frá rundkoyringini niðan til hitamiðstøðina. Mett verður at hetta kann gerast uttan størri ávirkan á verkætlanina. Viðvíkjandi atkomuvegum verður mett, at ferðslutrýstið frá stovninum er so mikið lítið, at tað ikki er til stórvegis ampar fyri íbúgvarnar har. Hinvegin kann byggingin vera við til at betra um vendimøguleikarnar við endan á Reynstúni, og møguliga eisini geva nøkur P-pláss at nýta í sambandi við føðingardagar o.l.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at góðkenna staðsetingina í Reynstúni til eitt nýtt sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki.

Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at selja Almannamálaráðnum lendi at byggja sambýli á fyri kr. 156/m².

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum, treytað av at góð parkeringsviðurskifti verða.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, atkvøða ímóti og mæla til at finna aðra staðseting.

**Fíggjarnevndin 28. november 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við meirilutanum í Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Eon minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein atkvøða ímóti og mæla til at finna aðra staðseting.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og tveimum blonkum.

Fyri atkvøddu Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus, Halla Samuelsen og Bjørg Dam.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Kunningarfundur var tann 7. januar 2019 hildin fyri grannunum í Reynstúni, har Almannaverkið og Tórshavnar kommuna høvdu eina framløgu, har fleiri sjónarmið viðvíkjandi bygging av nýggjum sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki vórðu løgd fram.

Greitt varð frá, hvussu byggingin er ætlað skipað í eindum við lítlum íbúðum (35 $m^2$ til støddar), arbeiðstíðir hjá starvsfólkum, og hvørjar dagligar fráferðir og vitjanir búfólk og vitjandi gera. Økisásetingarnar í almennu byggisamtyktini vórðu lýstar, umframt at greitt varð frá ferðslu- og generellu parkeringsviðuskiftunum í økinum. Um eitt sambýli verður gjørt fyri endan á vegnum, so er ætlanin, at vendiplássið verður gjørt nøktandi, og hugsast kann, at nøkur parkeringspláss verða tøk til eitt nú føðingardagar v.m.

Grannarnir førdu fram sína ónøgd í sambandi við, at atkoman til sambýlið skal vera umvegis Reynstún, og ynsktu at vita hví íbinding ikki kann gerast í Glyvursvegin. Sum áður nevnt, so ynskir kommunan ikki, at innkoyring er frá Glyvursvegnum, tí hesin vegurin verður helst høvuðsæðr við nógvari ferðslu út á Glyvursnes. Og tá Glyvursvegurin er ikki egnaður til íbinding, er eyðsætt, at Reynstún verður atkomuvegur, og er Reynstún somuleiðis mett, at vera nøktandi til økta virksemið í økinum. Kommunan vísti á, at møguliga kann arbeiðsvegur gerast inn frá Glyvursvegnum í byggitíðini, men skal hetta kannast nærmari í framhaldandi tilgongdini. Og ikki minst varð greitt frá um íbúgvarnar, sum skulu búgva í sambýlinum. Talan er um um brúkarar, ið eru illa fyri, og koma teir tí ikki at ávirka grannalagið nakað serligt.

Aðrar viðmerkingar frá grannunum vóru t.d., at myndirnar í framløguni vóru misvísandi, at grannar omanfyri á Reynsgøtu parkera í Reynstúni, og at fleiri bilar eru til hvørt húski, og tí er parkering á vegnum.

Síðani fundin hevur Almannamálaráðið sent kommununi skipanaruppskotið fyri ætlaðu byggingina. Umsitingin metir tað ikki vera neyðugt við eini serstakari byggisamtykt fyri økið og nýbyggingina í Reynstúni, grundað á ásetingarnar fyri A3 øki, ið eitt nú ásetir at loyvt er at byggja stovnar á økinum. Tað er einans neyðugt við serstakari byggisamtykt, um talan er um eina útstykking, og um byggingin ikki er í tráð við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu. Umsitingin metur ikki, at ætlaða byggingin kann kallast ein útstykking, tá talan er um ein bygning/ein stovn. Av tí at eingin serstøk byggisamtykt verður gjørd, verður heldur eingin almenn hoyring av málinum. Mett verður tí, at grannarnir, grundað á teirra mótmælið

eiga at verða kunnaðir um ætlaðu byggingina. Kunningarfundur hesum viðvíkjandi verður eftir ætlan hildin í viku 20.

**Skipanaruppskotið**
Á heystið 2018 bjóðaði Landsverk ráðgeving av nýggjum sambýli út í kapping. MAP Arkitektar vunnu kappingina, sum varð avgjørd í desember 2018, og varð skipanaruppskotið latið kommununi síðst í mars mánaða í ár, sí Fylgiskjal 2 - skipanaruppskot.

Hugsjónin í uppskotinum er, at búfólkini sum hava skerdar virkis førleikar skulu varðveita sínar kropsligu, sálarligu og sosialu førleikar so leingi til ber. Nærveran og sambandi við onnur menniskju er kjarnin í námsfrøðiliga arbeiðinum í heiminum, og eru fysisku karmarnir inni og úti tí einfaldir og sansastimbrandi, lætt er at finna vegin fram og at fáa samband við onnur búfólk og starvsfólk. Á staðnum eru góðir møguleikar fyri at skapa sansastimbrandi upplivingar fyri búfólk og familjur teirra. Lagt verður tí upp til, at búfólkini uppliva staðið við at eygleiða, hoyra, lurta og nerta.

Byggingin er skipað í tríggjar eindir, harav tvær eru búeindir við 9 íbúðum í hvørjari og eini felagseind, sum fevnir um starvsfólkahøli, felagskøk, vaskarí, vesi til gestir og avvarðandi, tøknirúm og sansarúm. Hvør búeind er somuleiðis skipað við 3 býlingum, sum fevna um tríggjar íbúðir og eitt felags tún. Innrætting av túnum, val av tilfari og litum kann skipast við luttøku av búfólkunum, soleiðis at tey eru við til at seta sín dám á heimið.

Atkoma til sambýlið er frá Reynstúni, og parkeringspláss við áleið 26 p-básum vera á økinum, um roknað verður við 1 p-bási pr. 50 fermetrar. Møguleiki er at gera almenna gøtu frá buss steðgiplássinum við Glyvursvegin og niðan til sambýlið og Reynsgøtu. Gøtusambandið kann verða til gagns fyri grannalagið í Reynstúni, og verður verandi gøtusamband óbroytt. Umsitingin ger neyðugar tillagingar um neyðugt.

Umsitingin hevur ásannað, at ætlaðu parkeringsplássini upp at Reynstúni og vendiplássið, sum ynskiligt verður gjørt nøktandi ikki er við í ætlanini. Heitt er á Landsverk um møguleikan fyri at flyta runt upp á hetta í framhaldandi tilgongini.

**Skjøl:**
Fylgiskjal 2 Reynstún - Skipanaruppskot (útg. 2), journal nr. 18/03494-24

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja skipanaruppskotið fyri nýtt sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki í Reynstúni á Argjum, og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 07. mai 2019:** Vísandi til at vendipláss og parkering skal verða við endan á Reynstúni verður málið útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við samtyktini í teknisku nevnd 7. mai 2019.

**Ískoyti:**
Kunnandi fundur var við íbúgvarnar í Reynstúni mánadagin 13. mai 2019. Kjakið til fundin bleiv rættiliga heitt, og varð tí avgjørt at taka ein fund millum byggiharran og umsitingina fyri at umrøða støðuna.

Hesin fundurin varð hildin 22. mai 2019 og møttu Almannamálaráðið, Almannaverkið og Landsverk, umframt borgarstjórin og umboð fyri kommunalu umsitingina. Niðurstøðan á fundinum varð, at umboð frá byggiharranum skuldu koma á fund í byggi- og býarskipanarnevndini 7. juni 2019 at leggja skipanaruppskotið fram, og skuldu allir býráðslimirnir somuleiðis bjóðast til hendan kunnandi fundin, soleiðis at spurningar ella ivamál til skipanaruppskotið kundu verða svarað beinleiðis av byggiharranum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðari á býarskipanardeildini mæla til at samtykkja skipanaruppskotið fyri nýtt sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki í Reynstúni á Argjum, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 04. juni 2019:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2019:** Landsstýriskvinnan í Almannamálaráðnum, umboð fyri byggiharran og MAP arkitektar greiddu frá og svaraðu spurningum í sambandi við skipanaruppskotið.

Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við stasetingini og mælir ístaðin til at staðseta stovnin við barnagarðin á Argjahamri og býlingin á Argjahamri.

Bjørg Dam atkvøður blankt.

**Tekniska nevnd 10. september 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Gjørt verður vart við, at skipanin av økinum er broytt, eins og ráðgevi greiddi frá á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini 7. juni 2019. Sostatt eru 8 parkeringspláss við innkoyringina til vardu bústaðirnar, og restin innast á stykkinum, uml. 50 m frá innkoyringini. *Støðumynd_Parkering_500-01 18/03494-38 lýsir hetta.* Tá byggingin er liðug, verður øll parkeringin tøk hjá grannalagnum at brúka og kemur sostatt grannunum til góðar.

**Skjøl:**
*Støðumynd_Parkering_500-01 18/03494-38*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á býarskipanardeildini og býarverkfrøðingurin mæla til at samtykkja skipanaruppskotið fyri nýtt sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki í Reynstúni á Argjum, at arbeiðsvegur verður gjørdur frá Glyvursvegnum í byggitíðini og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 05. november 2019:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigursson, tekur ikki undir við stasetingini og mælir ístaðin til at staðseta stovnin við barnagarðin á Argjahamri og býlingin á Argjahamri.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Tikið av skrá.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>27. februar 2020 | Blað nr.: 184 |
| | Formansins merki: |

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Tikið av skrá.

# 44/20 Útstykking á Hamrinum á matr. nr. 4a, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.01.2020 | 22/20 | 20/00130-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 20/20 | 20/00130-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 44/20 | 20/00130-1 |

**Upprunin til málið:**
Tørvur er á fleiri økjum til bústaðabygging. Týdningarmikið er at býurin mennist, og at fleiri øki fyrireikast til at nøkta tørvin í sambandi við býarvøksturin. Økið er partur av haga, omanfyri Hamaran á Argjum, partvís álagt við mold seinastu árini.
Økið er í byggisamtyktini lagt út til bygging. Sí journal nr. 20/00130-2.
Í økinum er barnagarður og skúli, og bussleiðin koyrir til.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Talan er um matrikulin 4a, sum er omanfyri verandi útstykkking á Hamrinum á Argjum. Atkoma til økið er frá frákoyring sum er fyrireikað frá verandi rundkoyring. Økið er veðurgott, og partur er longu lagdur út til byggiøki. Økið, ið er innanfyri byggisamtyktina, er á leið 30.000 fermetrar, økið markerað á kortinum, er á leið 50.000 fermetrar. Uppskot til skipan av økinum fer at lýsa tørv á støðd nágreiniligari.

Festari er á økinum, og má kommunan ogna sær hetta byggiøkið frá Føroya Jarðargrunni, um ætlanin skal setast í verk.
Skipan skal gerast av økinum. Við støði í skipanini skal útstykkingarætlan gerast og serstøk byggisamtykt verður neyðug. Um alt markeraða økið verður partur av útstykkingarætlan, verður neyðugt at broyta almennu byggisamtyktina umframt.

Biðið verður um játtan fyri at gera avtalu við uttanhýsis ráðgeva at byrja skipan av økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Partur av økinum liggur í byggisamtyktarøki A3 blandað bústaðabygging. Sambært byggisamtyktini er loyvt at byggja blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.
Útstykkingar kunnu gerast sambært serstakari byggisamtykt

**Upplýsingar frá umsitingini**
Festarin er kunnaður um ætlanina at útstykkja økið. Festarin viðmerkir, at hann fer at mótmæla ætlanini, tí at tað er sera óheppið fyri festið, um hetta verður veruleiki.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl:**
Kort, øki at keypa Hamarin á Argjum, matr. nr. 4a.pdf journal nr. 20/00130-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Leiðarin á býarskipanardeildini mælir til, at umsitingin fær heimild til at fara í tilgongd at keypa lendi frá Búnaðarstovuni, at umsitingin ger uppskot til skipan av økinum, umframt uppskot til hvussu víðari skal farast fram og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Marius Müller fór av fundinum meðan hetta málið varð viðgjørt

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

Marin Katrina Frýdal boðaði frá, at hon metti seg vera ógegniga at luttaka í viðgerðini av málinum, og í hennara stað luttók Jógvan Arge í viðgerðini.

# 45/20 Útstykking á Velbastað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.01.2020 | 21/20 | 20/00097-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 19/20 | 20/00097-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 45/20 | 20/00097-1 |
| 4 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 24.02.2020 | 4/20 | 20/00097-1 |

**Upprunin til málið:**
Býráðið hevur 20.06.2019 samtykt raðfestingar fyri kommunalar útstykkingar, har økið á Velbastað er raðfest í 2019-2020, sí skjal 19/02316-1 kommunalar útstykkingar.
Út frá omanfyristandandi verður tískil mett, at umsitingin eigur at fara undir at kanna møguleikan at stykkja út á Velbastað (sí kortskjal: Øki at útstykkja_kortskjal, journal nr. 20/00097-3).

Í 2019 vóru 249 íbúgvar á Velbastað, umleið 86 húskir. Velbastaður hevur seinastu árini veri bygdin í Tórshavnar kommunu við størsta tilflytaratali. Nógvu útstykkingarnar á Velbastað hava hálað til sín barnafamiljur og er Velbastaður í dag ein barnarík bygd. Vanligur leistur er at leggja nýggjar býlingar tætt at verandi býlingum, soleiðis at, vegir, rør og streymur kunnu gagnnýtast. Hesin leistur er tó torførur at fylgja á Velbastað, tí lendið er bratt, velt lendi og fjós er millum teir eldru býlingarnar, og gamli bygdarvegurin er illa egnaður til meira ferðslu. Tað eru trý nýggj bústaðarøki á Velbastað; undir Borgarhálsi, Gerðisbreyt og á Stórheyggi. Mett verður at hesi øki eru hóskiliga gagnnýtt í mun til brattlendi og tøkum byggilendi. Nógvi bøurin og fjósini ger at tað illa ber til at vaksa um bygdina millum teir eldru býlingarnar. Í byggisamtyktini fyri Velbastað er eitt upplagt øki tí, økið eystanfyri vegin; Norðuri í Trøð, sum eisini er lagt út sum sethúsaøki. Húsini á Velbastað eru vanlig sethús, og ongin tvíhús, rað- ella ketuhús eru í bygdini. Tí sampakkar hetta væl við verandi bygdadám.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Talan er um matriklarnar 3a og 1a. Tilsaman áleið 8300 fermetrar. Her er lendið munandi slættari enn býlingurin omanfyri; Undir Borgarahálsi. Væl ber til at binda í vatn og kloakkleiðingarnar, ið liggja oman gjøgnum matrikul 3a.
Vegurin; Norðuri á Trø er ein lutfalsliga smalur vegur. Vert er tí at kanna um vegurin kann flytast, breiðkast, ella bústaðarvegur kann gerast, soleiðis at hann kann koma at ganga oman av svinginum Norðuri á Heyggi og ígjøgnum byggilendi ístaðin.
Skitsa er gjørd av økinum, har uppskot til bústaðarveg er teknað við. Væl ber til at stykkja eini 12 grundstykkir út, ið liggja ávikavist um 400 til 600 fermetrar (sí Kort journal nummar 20/00097-2).

Umsitingin metir, at lættasti máti at fáa til vega byggiøki á Velbastað er, at kommunan ognar sær lendið frá Føroya Jarðargrunni.
Tosað varð við Landsverk um málið. Landsverk tekur undir við at byggjast kann fram við vegnum, men kann vera at Landsverk seta treytir um frástøðu til vegin.
Um so er, verður møguliga neyðugt at kommunan yvirtekur vegin.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Sambært byggisamtyktini fyri Velbastað er loyvt at byggja sethús við upp til tveimum íbúðum. Við serloyvi frá byggivaldinum, er loyvt at byggja tvíhús, rað- ella ketuhús.

**Upplýsingar frá umsitingini**

Kunnað varð um ætlan um útstykking á Velbastað á borgarafundi á Velbastað 06.11.2019. Festarin gjørdi vart við á fundinum, at hann fer at mótmæla ætlanini.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Kommunalar útstykkingar journal nr. 19/02316-1
Kort journal nummar 20/00097-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | x |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | x | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til, at umsitingin fær heimild til at fara í tilgongd at keypa matrikul 1a og 3a frá Búnaðarstovuni, at umsitingin gerð uppskot til skipan av økinum, umframt uppskot til hvussu víðari skal farast fram og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við Byggi- og býarskipanarnevndini.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

Málið beint í býráðið.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 24. februar 2020:** Staðbundna nevndin tekur ikki undir við uppskotinum,  men vil hava eina heildarætlan fyri báðar bygdirnar.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Tikið av skrá.

## 46/20 Almenn wc í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 24.02.2020 | 12/20 | 18/03758-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 24.02.2020 | 41/20 | 18/03758-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 27.02.2020 | 62/20 | 18/03758-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 46/20 | 18/03758-1 |

**Upprunin til málið:**
Sum liður í ætlanini at gera býin enn meiri borgaravinarligan fyri borgarar ið ferðast í kommununi, umframt eisini fyri ferðafólk ið vitja, nú ferðavinnan vindur upp á seg, er ætlanin at betra um almennu vesiviðurskiftini í kommununi. Vesini skulu helst eisini verða løtt at viðlíkahalda.

Ynskiligt er, at vesihentleikar eru í økjum, har fólk eru bæði tá ið hugsað verður um býarrúmini í bygda umhvørvinum, men somuleiðis eisini um fríøkini og frítíðarøkini í kommununi. Kommunan hevur seinastu árini arbeitt í størri og størri mun fyri at gera fríøkini í kommununi meiri atkomulig til uppihald og fríløtur. M.a. kunnu ringurin kring Havnina og lendisgøtur í bygdunum nevnast, har vit bjóða borgaranum, ferðafólki og øðrum at njóta frílendini við gøtum og uppihaldi í fríu náttúruni.
Har almennir bygningar eru, eigur støða at verða tikin til, um vesi longu eru, sum kundu verði knýtt at einari heildarætlan í kommununi.

Tær loysnir, sum higartil hava verið brúktar í kommununi til almenn vesi, hava í stóran mun verið bygningar, bygdir á staðnum, tillagaðir til endamálið. Hendan loysnin hevur við sær, at ymiskar loysnir eru, og at viðlíkahaldið harvið kann gerast dýrari, men sjálvandi kann tað eisini gera at hesir bygningar hóska serliga væl til umhvørvið.

Langtíðar rakstur er týdningarmikil, og fyri at tryggja einfalt viðlíkahald av bygningunum, eigur at verða hugsað um standard loysnir, so at umvælingar og skiftan av eykalutum kann gerast á tryggan hátt, og at stórdriftsfyrimunir verða av valdu loysnini.
Farið eigur at verða undir at lýsa skipanina við almennum vesum, við atliti at bjóða raksturin og viðlíkahaldið út.

Støða skal takast til, um øll vesi skulu vera til rørslutarnað, og um skiftiumstøður skulu vera. Her verður bæði hugsað um vanligt blæuskift, men eisini um umstøður at skifta fjølbrekaðum við liggilegu og lyftiskinnara.
Umsitingin kemur at umrøða hendan spurningin við MEGD, áðrenn nakað verður sett í verk, soleiðis at vesini verða nøktandi til tey, ið hugsast at skula nýta vesini.

Miðað verður eftir at finna eina standard loysn, sum er einføld, vøkur á at líta, kend og haldbar.

2 dømi um loysnir eru funnin, har kostnaðurin fyri at framleiða hesi vesi, somuleiðis er fingin til vega.

Fyri at fáa nágreiniligan kostnað, er neyðugt at bjóða verkætlanina út, og fáa tilboð frá veitarum, bæði til framleiðslu av vesinum, men somuleiðis ein kostnað fyri uppseting og tað,

ið hartil hoyrir. Møguliga verður kommunan partur av veitingini at seta vesini upp, tá hugsað verður um kloakkviðurskiftir osfr.

**Lýsing av heildarætlan**
Umsitingin hevur gjørt eitt yvirlit sum vísir verandi almenn vesi í kommununi, og eisini raðfestingar av, hvar mett verður at almenn vesi eiga at verða staðsett í framtíðini. Hugsað er um staðseting nærindis gøtuskipanir og virksemi í býnum, so sum frítíð- og ítrótt. Talan er bæði um almenn vesi í býarrúminum og eisini um almenn vesi úti í meira náttúrukendum øki og í bygdunum.

Nærri lýsing má gerast í hvørjum einstøkum føri, um møguligt er at knýta í kommunalu kloakkskipanina ella um skilabetri er at seta ein samlitanga upp, sum verður tømdur eftir tørvi. Tað kann eisini hugsast at vera skilagott at seta samlitanga upp til regnvatn, har langt er til kommunala vatnleiðing. Tað verður lýst nærri í hvørjum einstøkum føri.

Samlaður kostnaður fyri at seta eina royndareind upp er mettur til: 600-700 tkr.

| | |
|---|---|
| Keyp av vesieind til eitt vesi til rørslutarn er umleið: | 350-450 tkr. |
| Flutningur frá framleiðslu til Føroyar | 120 tkr. |
| Fyrireiking av lendi til at seta vesieindina á | 50 tkr. |
| Etablering av samlibrunni til frárenning | 50 tkr. |
| Íbindingar og íbindingargjald | 30 tkr. |

Ætlanin er at biðja um tilboð uppá keyp av fyrstu vesieindini, sum verður at seta upp á einum av støðunum, sum hava raðfesting 1.
Hetta kundi t.d. verið í Havnardali ella líknandi stað.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Onga viðmerking

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Onga viðmerking

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Onga viðmerking

**Umhvørvisárin**
Onga viðmerking

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Onga viðmerking

Áðrenn nakað arbeiði verður sett í verk, skulu øll loyvir fyriliggja og tryggjast skal, at almennu vesini uppfylla øll galdandi krøv, herundir eisini atkomu hjá rørslutarnaðum.

Kloakk- og aðrar leiðingar skal avtalast og skal samlitanga setast upp, sum verður tømdur eftir tørvi, so skal rottangatømingaskipanin góðkenna ætlanina, herundir hvussu ofta tað skal tømast, atkomu v.m.

**Skjøl**

18/03758-2 Heildarætlan almenn vesi í Tórshavnar kommunu.
18/03758-4 toilett heildarætlan og raðfesting (dagførd kort)

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**
Árlig játtan eigur at leggjast afturat til røkt og viðlíkahald á rakstrarkontu, sum varðar av almennu vesunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til,
- at tikið verður undir við heildarætlanini at betra um almennu vesiviðurskiftini í Tórshavnar kommunu og raðfestingini sambært skjali 18/03758-4, toilett heildarætlan og raðfesting.
- at játtaðar verða 550.000 kr. av konto 6275, fríðkan av kommununi L62037 framflutt íløga til brúgv oman fyri Sandagerði.
- at játtaðar verða 150.000 kr. av konto 6275, fríðkan av kommununi L00001 Løgujáttan fyri árið, til nýggja verkætlan, almenn vesi í Tórshavnar kommunu kto. 6275, til at gera eitt alment vesi í Havnardali.
- at heimila umsitingini at fara undir at bjóða ætlanina út og at seta hana í verk.
- At áðrenn fleiri nýggj wc verða tikin í nýtslu, skal ein rakstrarætlan fyriliggja og fígging til rakstur verða fingin til vega. Í hesum sambandi ger umsitingin eitt uppskot til at bjóða út raksturin av øllum almennum kommunalum toilettum í Tórshavnar kommunu.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 24. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at málið verður lagt fyri nevndina aftur, tá tilboðini fyriliggja.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at málið verður lagt fyri nevndina aftur, tá tilboðini fyriliggja.

**Fíggjarnevndin 27. februar 2020:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

# 47/20 Nýggj serstøk byggisamtykt á Argjaboða, matr. nr. 43g, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.03.2019 | 57/19 | 18/03069-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 97/19 | 18/03069-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2019 | 149/19 | 18/03069-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 243/19 | 18/03069-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 314/19 | 18/03069-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 275/19 | 18/03069-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 24.02.2020 | 43/20 | 18/03069-1 |
| 8 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 47/20 | 18/03069-1 |

**Upprunin til málið:**
Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti á fundi 11. apríl 2018 at taka undir við, at íbúðir verða bygdar á matr. nr. 43g, Argir, og at serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri økið.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tórshavnar kommuna hevur fingið umsókn um at byggja íbúðarhús við 27 íbúðum umframt felagshús á matr. nr. 43g, á Argjaboða, sí skjal *Støðumynd*. Økið liggur í C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og sambært ásetingunum í økinum kann bygging einans verða loyvd sambært serstakari byggisamtykt.

Um verkætlanina sigur umsøkjarin m.a.:

- *"Grundstykkið er bratt, við einum meðalhalli á 26%. (Í meðal 12 hæddarmetrar í mun til breiddina á grundstykkinum) Hetta merkir, at um byggjast skal á skilagóðan hátt er neyðugt við alternativum loysnum til eitt nú parkering"*
- *"... Sp/f West-trading arbeitt við eini byggiætlan, har lendið verður minst møguligt ávirkað, og at allir fasilitetir, ið neyðugir eru fyri, at fólk skal trívast og støðast í slíkum íbúðarøki, eru til staðar. M.a. er ætlanin, at eitt felagshús til samkomur og aðrar aktivitetir, er partur av byggiætlanini".*

Talan er um 27 íbúðir, sum eru 93 $m^2$ hvør og hava trý kømur. Allar íbúðirnar hava egna terassu, vásarúm, úthús og privat p-pláss í parkeringskjallara. Harumframt er eitt felagsrúm, sum er 200 $m^2$ og felags terassur, sí skjøl *Flatmynd* og *Parkering*. Umsitingin metir, at talan er um eitt íbúðarsnið, sum ikki so nógv er av frammanundan, tá hugsað verður um talið av kømrum og hentleikarnir, bæði privatar og felags, sum annars eru partar av verkætlanini.

Íbúðarbygningurin er uml. 14 m høgur og er í 4 hæddum – ein parkeringskjallari og 3 hæddir við íbúðum. Stórur hæddarmunur er í økinum og uml. 20 metur eru til nærmasta granna móti sunnan, so mett verður at hettar er hóskandi í økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Økisásetingarnar eru:
*§ 22. Ásetingar fyri umráðispartin C3 í 3. Grundumráði*

1. *Umráðisparturin verður í síni heild lagdur til miðstaendamál, t.e. handlar, skrivstovuhøli, ráðleggingarvirki og tænastuvirki, ið hava samband við hetta. Loyvt er eisini at byggja skúlar, almennar stovnar og íbúðir.*

2. *Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt, ið byggivaldið hevur góðkent fyri alt økið ella ein nattúrliga avmarkaðan part av tí.*
3. *Byggistigið fyri umráðispartin má ikki fara upp um 0,4.*
4. *Nýtslustigið fyri umráðispartin má ikki fara upp um 0,8.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Umsókn um byggiloyvi til íbúðarhús við 27 íbúðum á matr. nr. 43g, Argir* – journal nr. 18/00909.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongar ásetingar eru um mest loyvdu hædd fyri bygging í C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Tó, so er vanligt at nýta ásetingina í BK17 fyri hæddarviðurskifti í mun til frástøðu frá marki, 2.2.3.2 sum sigur, at hæddin á útveggi móti grannamarki í mesta lagi má vera 2,4 x fráleikan til grannamark og gøtu.

Hendan ásetingin inniber, at bygningurin, sum er 13,8 m høgur, skal standa minst 5,75 m frá marki. Móti suðuri stendur bygningurin uml. 2,5 m frá marki. Umsøkjarin søkir tí um at keypa uml. 78 $m^2$ frá kommunu at leggja afturat ogn síni suðureftir, sí skjal *Støðumynd,* soleiðis at kravið um fráleika kann verða hildið, og er góðkenning av uppskotinum til nýggja serstaka byggisamtykt treytað av, at umsøkjarin fær loyvi til tess.

Parkeringskjallarin er ikki taldur við í nýtslustigið, sum er uml. 0,79. Mett verður at hetta er ráðiligt, av tí at grundstykkið er bratt, og um nøktandi parkeringsviðurskifti skuldi fingist til bygningina, hevði inntrivið í umhvørvið verið munandi størri. Somuleiðis eru onnur dømir um, at kjallarahædd ikki verður tald við í nýtslustignum, t.d. serstaka byggisamtyktin fyri Dr. Jakobsens gøtu og Sverrisgøtu.

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Í máli 18/00909 – *Umsókn um byggiloyvi til íbúðarhús við 27 íbúðum á matr. nr. 43g, Argir* hevur tekniska deild hesa viðmerkingina:

*Vatnleiðing liggur í vegnum og er hon nøktandi í mun til fyriliggjandi verkætlan.*

*Verandi kloakkleiðing í økinum, klárar ikki at taka ímóti spillvatni frá27 íbúðum og má ein loysn finnast á hesum. Tað eru í høvuðsheitum tvinnar loysnir:*

1. *Nýggj útleiðing út á streymasjógv.*
2. *Pumpuskipan, sum megnar at pumpa spillvatnið upp í leiðingina, sum kemur frá útstykkingini undir Kongavarða og liggur nakað omanfyri matr. nr. 43g.*

*Talan er um lutfalsliga kostnaðarmiklar loysnir og tað fyriliggja ikki neyv tøl júst nú.*

**Skjøl**
*Serstøk byggisamtykt – tekstur,* journal nr. 18/03069-4.
*Framsíða suður*, journal nr. 18/03069-9.
*Parkering*, journal nr. 18/03069-9.
*Støðumynd*, journal nr. 18/03069-9.
*Yvirlitskort*, journal nr. 18/03069-9.

*Flatmynd*, journal nr. 18/03069-9.
*Framsíða eystur*, journal nr. 18/03069-9.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til nýggja serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 43g, Argir, treytað av at umsøkjarin fær loyvi at keypa lendið, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at uppskotið um nýggja serstaka byggisamtykt hevur ligið til almenna hoyring, hevur kommunan móttikið 4 mótmæli.
Nógv ymisk viðurskifti verða umrødd í mótmælinum, bæði viðurskifti sum eru beinleiðis tengd at byggisamtyktini, men eisini fleiri ið hava við onnur viðurskifti at gera, so sum høvuðsvegurin út á Argjaboða, spillivatn, manglandi yvirskipað ætlan fyri Argjaboðagøtu o.a.

1. Mótmæli
   - Vegurin ov vánaligur
   - Vegurin hevur m.a. verið nýttur sum grundgeving fyri at bussurin ikki kann koyra heilt út á Argjaboða.

2. Mótmæli
   - Vánaligur vegur, í støðum bert 1 spor og eingin gongubreyt.
   - Trupulleikar av parkeringsviðurskiftum í økinum.
   - Í 50 ár hevur eingin yvirskipað ætlan verið fyri Argjaboðagøtu, og tí er hon samansett av lappaloysnum.
   - Vanligt er, at útstykkingar hava krav um 2 sporaðan veg við 2 gongubreytum. Sama krav skal setast til hesa útstykkingina.

3. 51 undirskriftir frá íbúgvum á Argjaboðagøtu, Argjavegnum og Traðagøtu
   - Vegurin ov smalur og ótíðarhóskandi at taka ímóti øktari ferðslu.

4. Mótmæli
   - Verða ávirkaði av “skyggekast”
   - Verða ávirkaði av “óhindra innlits gener”
   - At útsýnið suðureftir verður ógvusliga ávirkað

- Ognin missur virði og at eingin taksatorvurdering
- Eingin borgarafundur verið
- Spillvatnið verður koyrt á sjógv miðskeiðis á matr. 43a, Argir. Eingin umhvørvisárinskanning gjørd.
- Málið ikki verið fyri ferðslunevndini.
- Brúgvin ov vánalig og einki vendipláss sunnast á Argjaboðagøtu
- Nógv yvirflatuvatn, førir til svartakálk og hálku.
- Børnini mugu ganga eftir hesum vegastrekki fyri at sleppa í skúla á Argjahamri.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Vegurin út á Argjaboða er vánaligur og eigur at verða dagførdur, áðrenn tað verður bygt meira í økinum. Eisini eigur kommunala spillvatnsskipanin at verða dagførd.

Økið er útlagt til bygging í almennu byggisamtyktini.

Um bygt verður á staðnum, so meta vit ikki at hetta kemur at ávirka grannaognina órímliga nógv viðvíkjandi skugga, innlits-gener og mistum útsýni. Um virðið á grannaognini verður størri ella minni av hesi verkætlan er trupult at meta um.

Grundað á vánaligu ferðsluviðurskiftini út á Argjaboða, eigur heildarætlan at verða gjørd fyri Argjaboða, harundir m.a. ferðsluviðurskifti og tekniskar leiðingar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla frá at samtykkja uppskotið um nýggja serstaka byggisamtykt, fyrr enn ein heildarætlan fyri Argjaboða fyriliggur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2019:**

Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Bogi Andreasen og Halla Samuelsen, samtykkir uppskotið um nýggja serstaka byggisamtykt og at kommunan fær vegin út á Argjaboða dagførdan og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið viðvíkjandi byggisamtyktini í býráðið og at beina málið um dagføringina av vegnum út á Argjaboða í teknisku nevnd og stovna nýtt mál hesum viðvíkjandi.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Atkvøtt varð um uppskot frá borgarstjóranum um at fáa málið aftur í nevnd, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini hin 11. september 2019 varð samtykt at beina uppskotið um nýggja serstaka byggisamtykt í býráðið, og at kommunan fekk dagført vegin út á Argjaboða. Hetta varð eisini samtykt á fundinum í fíggjarnevndini 13. november 2019.

Málið um vegin út á Argjaboða er upprættað sum eitt serskilt mál, journal nr. 19/04645

*"Dagføring av vegnum Argjavegur/Argjaboðagøta"*. Hetta mál hevur verið fyri teknisku nevnd, sum samtykti, at meðan arbeitt verður við at finna eina endaliga loysn, verða ferðsluljós við radara sett upp.

Fundur hevur verið við borgarar, sum búgva við Argjaveg og Argjaboðagøtu, sí *fundarfrásøgn frá borgarafundi j.nr. 18/03069-37.*

Á borgarafundinum varð avtalað, at ástaðarfundur við politikarum skuldi verða áðrenn endalig avgerð varð tikin.
Ástaðarfundur verður 24.02.2020.

**Skjøl:**
*j.nr. 18/03069-37 fundarfrásøgn frá borgarafundi 10-12-2019*

**Tilmæli:**
Tilmæli kemur á fundinum.

Ástaðarfundur var 24.02.2020, kl. 16.00, um vegin, har uml. 50 argjafólk vóru møtt, umframt politikarar og umsitingin. Umsitingin legði fram ferðslugrannskoðan, støðulýsing av vegnum og niðurstøðuna frá ferðslunevndini. Argjafólkini førdu fram, at vegurin er ov smalur sum er og at tað er serliga vandamikið fyri børn og gangandi, og tí eigur kommunan ikki at geva loyvi til meira bygging úti á Argjaboða, sum vil føra til meira ferðslu.

**Tilmæli:**
Vísandi til at økið, sum er, liggur í umráðispartinum C3 í 3. grundumráði, sum er byggiøki, lagt út til miðstaðaendamál, sum krevur serstakari byggisamtykt áðrenn bygt verður, mæla tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini til at nevndin samtykkir uppskotið til serstaka byggisamtykt og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. februar 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Tróndur Sigurðsson, atkvøður ímóti og vil hava vegin dagførdan út á Argjaboða, áðrenn bygging fer fram. Eisini at fáa lýst um tað ber til at fáa lagt nýggjan veg oman fyri vegin út á Argjaboða.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Atkvøtt varð um samtyktina hjá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 5 ímóti og einari blankari atvkøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam og Halla Samulsen.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

# 48/20 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.02.2020 | 64/20 | 20/00203-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 48/20 | 20/00203-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 27. februar 2020:** Framlagt.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Framlagt og góðkent.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Helena á Dam Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andreasen | Annfinn Brekkstein |
| Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal | Bjørghild Djurhuus |
| Gunvør Balle | Turið Horn | Bergun Kass |
| | Bjørg Dam | |
| | Jógvan Arge | |